| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 760 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 18. juni 2026 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 201/26-239/26

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen fór av fundi kl. 20.21
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Astrið Breckmann
Jón Kragesteen fyri Anju Weyhe mál nr. 202/26
Elin Heðinsdóttir Joensen kom á fund kl. 20.21 fyri
Bergur Robert Dam Jensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
Hermann Mortensen
David Andresen
Jeanette Ellefsen Blaasvær
Øssur Patursson

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Brekku Havmand

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 201/26 | 26/05114-1 | Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 18. juni 2026 | 763 |
| 202/26 | 25/03667-1 | Trivnaðarøki í Kollafirði | 764 |
| 203/26 | 26/00448-1 | Mál beind í nevndir 2026 | 769 |
| 204/26 | 25/05986-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924 | 771 |
| 205/26 | 26/03062-6 | Nýggjur skrivstovubygningur til Moldgoymsluna í Húsahaga | 783 |
| 206/26 | 25/11126-3 | Parkeringsskipan | 786 |
| 207/26 | 25/00338-1 | Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat - 19/00411 | 791 |
| 208/26 | 25/00421-2 | Náttúruøki í Dalinum Langa - 22/01129 | 793 |
| 209/26 | 25/07379-1 | Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún" | 796 |
| 210/26 | 26/00813-1 | Mannagongd í sambandi við større íbúðarverkætlanir | 801 |
| 211/26 | 26/04905-1 | Skiftingarhús í Nólsoy Skiftingarhús í Nólsoy | 804 |
| 212/26 | 25/01002-2 | Endurskoðan av ásetingum fyri E-neystaøki í almennu byggisamtyktini | 808 |
| 213/26 | 25/01098-6 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes - 22/04933 | 814 |
| 214/26 | 26/03880-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt Á Rætt, Kollafjørður | 819 |
| 215/26 | 25/08554-7 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a, Tórshavn | 822 |
| 216/26 | 26/03846-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1354a og 1354b – A2 og A3 øki | 830 |
| 217/26 | 25/09481-2 | Broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 199f, Kollafjørður í samb. við atgongd til heita keldu. Frá D1 til A1 | 833 |
| 218/26 | 25/09667-8 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 333, 331 og 330, Tróndargøta 36 og 40, City Church, Tórshavn | 837 |
| 219/26 | 25/10305-5 | Nýggj serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d, Tórshavn | 841 |
| 220/26 | 25/10368-5 | Íbúðarbygging á matr. nr. 859e, 869b, 858ab og 860a, Tórshavn | 844 |
| 221/26 | 26/04175-2 | Verkætlan frá Steinatúni til Frælsið | 848 |
| 222/26 | 26/04298-1 | Frípláss skipan til Tórshavnar musikkskúla | 849 |
| 223/26 | 26/04481-2 | Vanligur stuðul, KÍF Kappróður | 853 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 224/26 | 26/01674-2 | Nýtt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum | 855 |
| 225/26 | 25/05866-1 | Kanning av verandi støðu á kloakkleiðing við Sjósavnið | 857 |
| 226/26 | 26/01677-1 | Hosufóðring 2026 | 861 |
| 227/26 | 26/01691-3 | TV-kanningar av spillivatnsleiðingum 2026 | 864 |
| 228/26 | 25/05863-1 | Reinsiverk til vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377 | 866 |
| 229/26 | 26/00599-1 | Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn | 870 |
| 230/26 | 26/04400-1 | Kommunala fyrisitingin í Sjóvinnuhúsið | 874 |
| 231/26 | 25/00167-1 | Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi - 24/01098 | 877 |
| 232/26 | 26/04363-1 | Sólorkuskipanir á kommunalar bygningar | 882 |
| 233/26 | 26/04505-2 | Tórshavnar havn : Leigusáttmáli við AK-Sauna.fo í Kollafirðið | 885 |
| 234/26 | 26/02437-1 | Tórshavnar havn : Verkætlan nýggjur terminalur "Molin" | 887 |
| 235/26 | 25/00219-6 | Óbygt grundstykki. Matr.nr. 91s, Kollafjørður. | 890 |
| 236/26 | 25/06036-2 | Leigumál Almannaverkið - Matr.nr. 645a, Tórshavn. | 892 |
| 237/26 | 26/04735-1 | Umsókn um avtøku av servittutti um víðarisølu, matr. nr. 135nn, Hoyvík | 894 |
| 238/26 | 26/00100-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026 | 897 |
| 239/26 | 25/06061-1 | Eldradepil í Kollafirði | 900 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 763 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Til viðgerðar**

# 201/26 Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 18. juni 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 201/26 | 26/05114-1 |

**Málslýsing:**
Birgir Nielsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Astrið Breckmann, eru loknar.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Tikið til eftirtektar.

## 202/26 Trivnaðarøki í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 20.05.2025 | 13/25 | 25/03667-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 13.11.2025 | 22/25 | 25/03667-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 95/26 | 25/03667-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 133/26 | 25/03667-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 09.06.2026 | 9/26 | 25/03667-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 140/26 | 25/03667-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 202/26 | 25/03667-1 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin í Kollafirði ynskir trivnaðarøki í Kollafirði og eitt borgarahús.

Staðbundna nevndin sigur:
Fyri at samla bygdirnar og økja um trivnaðin í økinum, manglar ein miðdepil – eitt torg og eitt borgarahús, sum stendur í sama stað. Hetta málið hevur undanfarna nevnd arbeitt nógv við og eru vit sera nøgd við miðstaðarætlannina, sum var løgd fram fyri nevndina seint í seinastu setu. Vit ynskja at arbeiðið skal fara í gongd beinanvegin.

Umsitingin kunnar um málið.

**Kollafjarðarnevndin 20. mai 2025:** Umrøtt. Nevndin mælir til, at kommunan ognar sær neyðugt øki í sambandi við miðstaðarætlanina fyri Kollafjørð.

**Ískoyti**
Kommunan er í samráðingum við eigararnar av lendinum.

Kunnað verður um málið.

**Kollafjarðarnevndin 13. november 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Politiskt er ynski at koma í gongd við at menna eitt miðsavnandi uppihaldsøki í miðstaðnum í Kollafirði.

Ein heildarætlan fyri miðstaðin í Kollafirði er gjørd. Sí skjal nr. *25/03667, Heildarætlan Kollafjørður_mál nr. 25_02604.*

**<u>Miðsavningarøkið:</u>**
Á síðu 8 og 9 í Heildarætlanini verður miðsavningarøkið lýst. Ætlanin er, at gera eitt miðsavningarøki á grøna økinum beint vestan fyri grótbrúnna um Botnánna. Økið er kommunalt, og er áleið 1.835 $m^2$ til støddar og kann tískil rúma fleiri endamálum.

Her er talan um slættan, sum er á tí norðara áarbakkanum niðan móti fleiri almennum bygningum í bygdini. Mælt verður til, at økið verður skipað sum ein fløttur, so tað kann inntakast til alskyns felagstiltøk og hátíðarhald í bygdini.

Møguleikin er somuleiðis at skipa økið við eitt nú bálplássi, møguleikanum til konsertir o.a.

Lagt verður upp til, at Ormurin Langi frá gitna kvæðnum hjá Sjóvarbóndanum verður tema í økinum.

Harumframt skal lendisgøta gerast í økinum, soleiðis at økið kemur at hanga saman við kringliggjandi økjum, og soleiðis at økið kann brúkast til at ganga túrar í osfr.

Kommunan yvirtók lendið fyri nógvum árum síðani, men av tí at vetrarbitið ikki varð endaliga avgreitt, so verður neyðugt at fáa hetta avgreitt, samstundis sum økið verður planlagt, og áðrenn verkætlanin verður framd í verki.

**Felagsveltan:**
Á síðu 12 verður økið eystan fyri Vegin við Sjógv, partur av matr. nr. 107a, og innan fyri landsvegin, lýst sum eitt øki til felagsveltu, uppihald, nýtslu av ánni og gøtusamband inn undir brúnna og út á sandin.

Fyrr hevur hetta økið verið eitt virkið stað til eplavelting, har bøndur dyrkaðu eplir, ið vóru ein partur av okkara landbúnaðarligu siðmentan. Heildarætlanin leggur upp til, at økið skal gagnnýtast til felagsveltu, har fólk kunnu dyrka grønmeti og frukt. Við evt. at byggja felags vakstrarhús og gagnnýta jarðhitan frá hitakeldu í Kollafirði, kann tað gerast møguligt at dyrka serligar fruktir og grønmeti.

Felagsveltan hevur til høvuðsendamál at skapa samanhald millum borgararnar í bygdini, og skal felagsveltan røkka sínum deilendamáli um at fáa dyrkað jørðina aftur, so er tað týdningarmikið at virksemið er sjálvrikið. Tískil er týdningarmikið at fáa savnað fólk til veltuvirksemið, áðrenn bygging av vakstrarhúsum osfr. verður sett á breddan.

Heildarætlanin leggur somuleiðis upp til, at ein demningur verður gjørdur tvørtur um ánna, soleiðis áin gerst djúpari, og kann geva børnum møguleika at nýta hana til leik, sum til dømis við at byggja flaka ella nýta gummibát.

Hetta kann umframt at skapa gleði og ítróttarligt virksemi, eisini veita børnunum djúpari samband til náttúruna.

Økið er partur av festinum Sjóvarhagi, og tí skal avtala gerast við festaran, samstundis sum økið verður planlagt, og áðrenn nakað kann serast í verk á økinum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Avtala má gerast við avvaraðandi partar, sum varða av lendunum. Inntil endalig avtala er fingin í lag við partarnar, verður lagt upp til, at økini verða planløgd, soleiðis at tað er púra greitt, hvat skal gerast á økjunum, tá endaligar avtalur er fingnar við avvarðandi partar.

Stjórnarstovan varðar av samráðingum við lendisánararnar, meðan Býarskipanardeildin varðar av planleggingini av økjunum.

**Skjøl:**
*Skjal nr. 25/03667-4, Heildarætlan Kollafjørður_mál nr. 25_02604*.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 766 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62060 | Trivnaðarøki í Kollafirði | 6275 | L62060 | | Trivnaðarøki í Kollafirði | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kemur seinni |

**Tilmæli:**

Kommunustjórin, teknisku stjóri og býararkitekturin mæla til:

- At taka upp samráðingar við avvarðandi partar, sum varða av lendunum, sum ætlanin er at inntaka til trivnað í bygdini.
- At miðsavningarøkið verður boðið út í sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi.
- At játtaðar verða kr. 500.000 til sniðkapping og eftirfylgjandi gerð av útboðstilfari av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til nýggja verkætlan undir kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt við tí nágreingin, at punkt eitt má avgreiðast, áðrenn farast kann víðari við málinum, og at tá punkt eitt er avgreitt, verður málið lagt fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**

Á seinasta fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini varð samtykt, at punkt 1 mátti avgreiðast, áðrenn farast kundi víðari við málinum, og at tá punkt 1 var avgreitt, skuldi málið leggjast fyri nevndina aftur.

<u>Viðv. økinum vestan fyri grótbrúnna um Botnánna, partur av matr. nr. 107o.</u>

Økið er kommunalt, og er áleið 1.835 m$^2$ til støddar. Kommunan hevur yvirtikið økið frá Sjóvarhaga í 1996, og kommunan er tískil eigari av lendinum, men hevur Ognarmørkin rætt til bit á hesum lendi. Ognarmørkin skal tískil endurgjaldast fyri missin av hesum biti, og hevur fundur verið við Ognarmørkina hesum viðvíkjandi. Enn er eingin endalig semja funnin, men hevur Ognarmørkin játtað, at kommunan kann fara undir sniðkapping av økinum.

Tó Ognarmørkin hevur rætt til bit á lendinum, so kann Ognarmørkin ikki nokta kommununi at gera nýtslu av sínum ognarrætti á hesum matrikli. Mælt verður tí til, eisini hóast endalig semja um endurgjaldið enn ikki er avgreitt, at kommunan útskrivar sniðkapping av økinum.

Ein sniðkapping um, hvussu økið skal háttast, merkir ikki, at kommunan kemur at gera inntriv í økið. Fyrst skal fyriskipast ein sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi. Tað vil siga, at áðrenn nakað kann setast í verk í økinum, so verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir upp til fleiri ferðir. Ætlanin er at samráðast við Ognarmørkina, meðan sniðkappingin verður skipað, soleiðis at tá semja er viðv. endurgjaldinum fyri vetrarbit, so kann verkætlanin bjóðast út í heildararbeiðstøku.

<u>Viðv. økinum eystan fyri Vegin við Sjógv, partur av matr. nr. 107a.</u>

Økið er partur av sjóvarhaga festinum, og festarin er bjóðaður til fundar. Enn hevur fundurin ikki verið, hóast kommunan í fleiri umførum hevur sent fundarboð. Somuleiðis hevur Búnaðarstovan sent festaranum hoyringsvar um ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan frættir aftur frá Búnaðarstovuni, tá hoyringssvarið frá festaranum er komið.

Av tí at lendisviðurskiftini ikki eru endaliga avgreidd við festaran enn, so verður hesin parturin av heildarætlanini ikki settur í verk í núverandi løtu.

Hóast hesin parturin av heildarætlanini ikki verður settur í verk í núverandi støðu, so verður mælt til, at gonguleiðir út á Ósan verða raðfestar, tvs. at ein gonguleið undir landsvegin og út í Ósan og ein gonguleið um brimgarðin, soleiðis at gerst lættari hjá borgarum at koma til økið og gera gagn av tí.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6275 | LK62060 | Trivnaðarøki í Kollafirði | 6275 | L62060 | | Trivnaðarøki í Kollafirði | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kemur seinni |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til:

- At miðsavningarøkið á matr. nr. 107o verður boðið út í sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi.
- At gonguleiðir verða gjørdar út á Ósan, herundir at arbeiðini verða boðin út og sett í verk
- At játtaðar verða kr. 500.000 til sniðkapping, gerð av útboðstilfari til Trivnaðarøkið og gonguleiðir til Ósan av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til nýggja verkætlan undir kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó skal návgreinast undir punkt 2, at tað er gonguleiðin umvegis brimgarðin.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Kollafjarðarnevndin 09. juni 2026:** Málið varð umrøtt.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við byggi- og býarskipananevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í nevnd, ið fall við seks atkvøðum fyri, seks ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Heidi Lava Elgeirsdóttir, har skotið verður upp, at tikið verður undir við tilmælinum við teirri broyting, at 300.000 kr. verða játtaðar afturat á løgukontu 6275 til gonguleið undir landsvegin og træbrúgv um Botnánna í samráð við Landsverk, ið varar av lendinum, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi:Heðin Mortensen.

Anja Weyhe luttók ikki í viðgerðini av málinum.

| | Býráðsfundur<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 769<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

## 203/26 Mál beind í nevndir 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 3/26 | 26/00448-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 26/26 | 26/00448-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 73/26 | 26/00448-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 104/26 | 26/00448-1 |
| 5 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 174/26 | 26/00448-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 203/26 | 26/00448-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Framlagt.

| | Býráðsfundur<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 771<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

## 204/26 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 77/25 | 25/05986-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 90/25 | 25/05986-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 135/25 | 25/05986-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 184/25 | 25/05986-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 220/25 | 25/05986-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.02.2026 | 36/26 | 25/05986-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.02.2026 | 53/26 | 25/05986-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 68/26 | 25/05986-1 |
| 9 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 76/26 | 25/05986-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 99/26 | 25/05986-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 60/26 | 25/05986-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 18.05.2026 | 81/26 | 25/05986-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 27.05.2026 | 131/26 | 25/05986-1 |
| 14 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 179/26 | 25/05986-1 |
| 15 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 204/26 | 25/05986-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 772<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekstur og tilfar kemur áðrenn fundin.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 2.251.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 2.251.000 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 71.185.391,65 |
| Áður játtað | Upphædd: | 68.935.343,38 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**
Fleiri avleiddar verkætlanir eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sum verða lýst niðanfyri. Talan er í høvuðsheitum um hesi arbeiði:

**Uttandura arbeiði**
*Stuðlaveggur,* sí skjal 1 & sí skjal A-C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6
*Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll,* sí skjal 2, j.nr. 25/05986-7
*Gøta, trappa í lendi og tvey portur til FIFA vøll,* sí skjal 2 j.nr. 25/05986-7 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-8
*Klæðing av rimaverki, sí skjal 2B, j.nr. 25/05986-9*
*Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum, veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10*
*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður,* sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

**Innandura arbeiði í verandi stovni**
*Køkur*
*Umbygging í verandi stovni*
*Skilaveggir, ovnar, køliskáp o.a.*
*Hæve/sænkeborð – broyting av skiftirúmum*
*Annað*
*Stuðlaveggur*
Avbjóðingar hava verið við lendisviðurskiftum og uttanumøkinum á eystanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Stórur hæddarmunur hevur verið við ovara benið og vegin. Fyri at økið kann vera trygt og at arbeiðið ikki verður steðgað upp hjá báðum arbeiðstakarum á staðnum, Búsetur og RTS, hevur verið neyðugt gera eykaarbeiðið á stuðlavegg framvið vegnum mótvegis økinum við Dagstovnin á Hamrinum. Umsitingin hevur verið í samráðingum við arbeiðstakaran, RTS, um at gera stuðlaveggin við uttanumøkið hjá Dagstovninum á Hamrinum, tí stuðlaveggurin liggur á arbeiðsøkinum hjá RTS. RTS hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið at gera stuðlavegg á 50 m, sum 2m høgur og 20cm tjúkkur, íroknað fundament til stuðlavegg 50 m x 0,4 m x 0,4 m. Verkætlanin L31011 hevur fyribils fíggjað hetta arbeiðið, sí skjal 1, skjal 1A, skjal 1B, skjal 1C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6.

Samlaður prísur fyri at hava gjørt hesi arbeiðið er áljóðandi tls.

| | |
|---|---|
| Tilboð á stuðlavegg (RTS) | 349.260,00 u/mvg |
| Prosjektering (LBF) | 20.366,75 u/mvg |
| Kvalitetsikring/eftirlit (LBF) | 5.205,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **374.831,75 u/mvg** |

*Umbygging og nýtsla av FIFA vølli við Dagstovnin á Hamrinum.*
Dagstovnurin á Hamrinum hevur tørv á at fáa eina loysn viðvíkjandi málinum um FIFA vøllin.
Manglandi atgongd til sparkivøllin skapar eina ótrygga støðu, tá skúlabørn skulu á vøllin í fríkorterum og tá børn í frítíðini spretta net meskarnar í málinum upp fyri at fáa atgongd. Tí er bráðfeingistørvur at fáa loysn á málinum.

Skúlin á Argjahamri hevur havt tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum.

Børnini í grannalagnum hava eisini tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum. Byggiprosjekt er sum nú er á staðnum, har byggihegn er sett rundanum vøllin og spæliplássið hjá dagstovninum er flutt, soleiðis at eingin atgongd er til vøllin, uttan gjøgnum høvuðsportrið til dagstovnin.

Umsitingin hevur verið í samskifti við Eigarafelagið á Hamrinum, sum FIFA vøllurin av fyrstani tíð hevur verið bygdur/ætlaður til. Loysnin á málið verður, at tá ið byggiprosjektið er liðugt verður rás, trappa í lendi og tvey portur eystanfyri FIFA vøllin gjørt til børnini á dagstovninum og hjá børnum í grannalagnum annars at nýta um kvøldarnar og í frítíðini sum heild, tá ið stovnurin er stongdur, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8

Eigarafelagið uppi á Hamrinum hevur viðmerkingar at bøta skaðan á verandi hegn rundanum og gera tvey portur, rás, trappu í lendi, sum framvíst, er ein nøktandi loysn.
Eigarafelagið viðmerkir kortini, at vøllurin ikki er í góðum standi, og at vøllurin tíðum er dekkaður við sandi í pørtum av vøllinum, soleiðis at mann ikki kann brúka vøllin. Ynskið er at fáa nýtt graslíki á vøllin og at ein betri loysn verður funnin við at eingin sandur kemur á vøllin, ella í munandi minni mát. Umsitingin hevur kannað málið saman við arbeiðstakaranum og er komin til ta loysn at skerma vøllin betri av frá plássinum við at klæða rimaverkið, soleiðis at børnini ikki sleppa at koyra sand inná vøllin, sí skjal 2B_Klæðing av rimaverki, j.nr. 25/05986-9.

Umsitingin somuleiðis biðið um tilboð á veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10.

*Afturbøting av verandi hegni við FIFA vøll*
Verandi hegn rundanum FIFA vøllin varð skatt í vetur. Umsitingin hevur biðið Búsetur kannað málið, hvat ið skilabest er at gera. Búsetur boða frá, at hegnið rundanum er sera høgt og viðbrekið og tað ber illani til at dimensionera og uppbyggja eitt fundament, sum tolir føroyska veðurlagi, tá ið hegni er somikið høgt. Fyri stoyping stórum fundamentum mugu gerast størri inntriv á vøllin og økið annars. Búsetur leggur upp til at seta skrástívarar í, afturbøta verandi pelar og at lækka hegni í til 4 metrar, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki við garði/stakitti*
Ynski er frá stovninum at fáa avskerma vøggustovuøkið og barnagarðsøkið við garði. Hetta hevur ikki verið við í prosjektinum. Búsetur hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið, áljóðandi 76.053,00 u/mvg, sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur at veita eitt samlað tilboð á ymisk arbeiðið við FIFA vøllin, sí sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr.  25/05986-7 og 25/05986-8.

| | |
|---|---|
| Gera gøtu, trappu í lendi og tvey portur til FIFA vøll: | 106.024,00 u/mvg |
| Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll: | 108.000,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **261.614,24 u/mvg** |

**Innandura arbeiði**
Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur um at gera eina samlað loysn og heildartilboð á tilbygging av køki og goymslu í verandi stovni, veiting og montering av nýggjum av køki, ymiskum eykaarbeiði í verandi stovni. Hetta arbeiðið umfatar:

- Verandi veggur við køk verður niðurtikin og berandi límdrakari verður bygdur ístaðin
- Nýggjur køkur sum víst í prinsippi í hjáløgdu skitsu. Ovnar (1 industri + 1 vanligur), 2 kóki plátur á 80 cm uml, og avtrekk verður á somu síðu uttan til høgru, sum verandi.
- Eymhetta/ur skulu monterast í loft.
- Industri vaskimaskina - flutt út mótvegis útiveggi. Vask verður eftir flutt út mótvegis útveggi.
- Rustfrí borðpláta.
- Niðurtøku av  verandi foldiveggi og umgerð av goymslurúmi.
- Nýggj høg skáp úr góðari góðsku v/foldivegg.
- Avmontering og eftirmontering av radiatori v/rørføringum.
- Í køkstilboðnum skal prosjektering av køkim´samskifti skal gerast av professionellum køksveitara - alt neyðugt samskifti til brúkarans krøv og ynski (eftirjusteringar) av hyllum skáp við øllum, sum hartil hoyrir - skal verða íroknað
- Yvirskáp ynskjast ikki men heldur góðar hyllar og høgskáp(serliga í trýkantinum, har sum ovnar eru)
- Eitt køliskáp skal vera undir borðinum nær við oynna
- 4 nýggj frystiskáp
- Køliskáp og ovnar í stovunum í verandi stovni
- Fleiri gardropur í verandi stovni í sambandi við, at stovnurin verður broyttur frá vøggustovu til barnagarðsstovu
- Broytingar av borðum og vøskum o.a.
- Veiting og montering av skilaveggjum millum w.c. kummur. BH ynskir tilboð á avmontering/flyting av vaski(flutt-stillað hægri), veiting og montering av nýggjum kranum í vøskum, burturtakan av einum skiftiborð við vaski og veiting og montering av nýggjari borðplátu.

- Broytingar í skiftirúmum. 2 hæve/sænkeborð til 4 vøggustovur, somuleiðis ynskir mann eyka funktiónir inn í skiftirúmini fyri 4 vøggustovur.
- Skilaveggir / spanskveggir
- Nýggj køliskáp og ovn í tveimum stovum í verandi stovni
- Starvsfólkarúm
- Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

Búsetur hevur veitt samlað tilboð á hesi arbeiði, sum er áljóðandi: 975.776,00, sí skjal 4, j.nr. 25/05986-12

**Samlað fígging**
Samlað fígging til avleiddar verkætlanir, ið eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sí skjal 5, j.nr. 25/05986-13.

**Uttandura arbeiði**

| | |
|---|---|
| Stuðlaveggur | 374.831,75 u/mvg |
| Ymiskt við FIFA vøll | 261.614,24 u/mvg |
| Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður | 86.153,00 u/mvg |
| Skjal 2B_Klæðing av rimaverki | 30.000,00 u/mvg |
| Skjal 2C_Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum | 196.800,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | 949.398,99 u/mvg |

**Innandura arbeiði**
*Skiftirúm – puslirúm*
*Starvsfólkarúm*
*Klárgera rúm til nýggjan køk*
*Nýggjur køkur*
*Hvítvørur til nýggjan køk*
*Barnagarður í verandi stovni*
*Flyta gardropuskáp*
*Nýggj gardropuskáp*
*Flyta vaskirennur*
*Nýggj w.c. kumma*
*Spanskveggir*
Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

| | | |
|---|---|---|
| Til samans uttan mvg. | 975.776,00 | u/mvg |

| | | |
|---|---|---|
| Samlað fyri innandura og uttandura arbeiði u/mvg | 1.925.174,99 | u/mvg |
| Ókendar útreiðslur | 192.517,50 | u/mvg |
| Til samans uttan mvg | 2.117.692,49 | u/mvg |
| | | |
| **Til samans við mvg (6,25%)** | **2.250.048,27** | **v/mvg** |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri

- At játtaðar verða 2.251.000 kr. á Løgukonto L31011, Útbygging – Dagstovnurin á Hamrinum. Fíggjað av tøkum peningi frá 2024.
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at fíggingin verður játtað av meirinntøkum fyri 2024.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Kári Johansen skjýtur upp at bjóða arbeiðið út.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Kára Johansen.

Fyri atkvøddu: Sunnuva Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Í móti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála.

5 atkvøddu fyri og 8 atkvøddu ímóti málinum, sum sostatt fall.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Sunnuvá Dahl Høgfeldt.

Í móti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Málið varð sostatt samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

## Ískoyti :

## Parkeringsøki

Upprunaliga var ætlað, at parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum skuldi verða boðið við verkætlanini Bónus og íbúðir á Hamrinum. Tilboðsveitarin á hesari verkætlan hevur boðað frá, at tey standa ikki við tilboð sítt. Hendan verkætlanin skal bjóðast út av nýggjum seinni. Parkeringsøkið er planerað og hevur verið nýtt sum skúrpláss og atkomu hjá Búsetur í byggitíðini í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum. Nú sum Dagstovnurin á Hamrinum er um at vera liðugur, er neyðugt er at taka støðu til leist at gera eina fyribils loysn til parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Verkætlanin Dagstovnurin á Hamrinum má hava í minsta lagi 26 parkeringsbásar afturat, til tess at hava nøktandi parkerings- og somuleiðis atkomuviðurskifti.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við verandi arbeiðstakara, P/F Búsetur, at standa fyri arbeiðnum at gera eitt fyribils parkeringspláss. Talan er um eitt tilboð á fínplanering, asfaltering av berilagi á økið og fyrireika avvatning og uppstriking av parkeringsbásum. Av tí at tung ferðsla kemur at virka til eina komandi verkætlan á Bónus og íbúðir á Hamrinum - og harvið slíta hetta økið verður bíðað við at asfaltera ovara slitlagið til seinni.

Búsetur hevur veitt tilboð at gera hetta arbeiðið áljóðandi:

**1.042.348,50** u/mvg

Ì hesum kostnaði eru soljóðandi postar:

Klárgering av p-øki við 0-32 skervur t=50mm:
Asfaltering av p-øki við Ab16, t=50 mm:
Avvatning
Garður 40 m
Kantsteinar uml. 80 m

**Fjarhiti**
Í verkætlanini er ikki settur kostnaður av til fjarhita. Umsitingin hevur funnið ein leist at knýta fjarhitan í glyvursvegin. Umsitingin hevur fingið tilboð á fjarhita fingið tilboð á Grevstur og tyrving av fjarhita innføring frá glyvursvegnum til Dagstovnin á Hamrinum áljóðandi 149.480 u/mvg. Afturat hesum varð grivið frá fýrrúminum á nýggja Dagstovninum á Hamrinum og lagt fjarhitarør út í uttanumøki, soleiðis at kundi fáa ræsarúm at arbeiða. Avtalað er at Búsetur og TK deila kostnað 50/50 tí at byggskrá ikki fevndi um fjarhita, áljóðandi 29.328,00. Samlaður kostnaður á Fjarhita er áljóðandi:

149.480 u/mvg,
29.328 u/mvg
178.808 u/mvg

**Innbúgv**
Umsitingin hevur boðið út innbúgv til verkætlanina Dagstovnurin á Hamrinum.
3 tilboð komu inn:

| | |
|---|---|
| ELDING ELRISIN | 2.333.468,17 u/mvg. |
| INNVENTARTÆNASTAN | 1.760.014,40 u/mvg. |
| STOKHOLM | 1.617.197,12 u/mvg. |

Eftir sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara Stokholm vóru nakrar tillagingar gjørdar á verkætlanina. Endaliga tilboðið var áljóðandi: 1.695.815,92 u/mvg.

Ì útboðnum er somuleiðis øll leys útgerð, smá køksútgerð og allar smáar leikur íroknaðar. Hetta seinasta varð ikki við í upprunaligu kostnaðarmetingini. Settar vóru av 1.282.195,00. Munurin er sostatt 413.620,92 kr u/mvg, sum resta í.

**Ymiskt**
Ynski frá stovninum at fáa gjørt ymiskar tillagingar í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum:

| | |
|---|---|
| KT Ùtgerð | 69.669,83 |
| Eyka leikur uttanumøki | 271.586,77 |

| | |
|---|---|
| Kurvar til garderobur | 11.340,00 |
| 6 Stk Quooker | 64.084,50 |
| Ymisk El eykaarbeiði | 87.985,52 |
| Samlað | 504.666,62 |

**Prís og lønarvøkstur**
Umsitingin hevur í sáttmálasamráðingum við Búsetur gjørt avtalu um, at Búsetur og Tórshavnar kommuna deila prís og lønarvøksturin í verkætlanini.

Ì heildararbeiðstakarasáttmála millum Tórshavnar kommuna og Búsetur stendur:
*Samlaða prísjavnanin frá 3. ársfjórðingi 2022 og frameftir, verður býtt við eini helvt til byggiharran, og eini helvt til arbeiðstakaran, bæði um javningin hevur við sær, at prísurin hækkar ella lækkar.*

Samlaða talið á prís og lønarvøkstur í verkætlanini er mett til áljóðandi 4.800.000 u/mvg. Hetta svarar til eina upphædd áljóðandi 2.400.000 u/mvg., sum Tòrshavnar kommuna skal gjalda í prís og lønarvøkstri í verkætlanini.

**Fígging**
Samlaði kostnaður á parkeringsøkið og prís og lønarvøkstur:

| | |
|---|---|
| Parkeringsøkið | 1.042.348,5 u/mvg |
| Fjarhiti | 178.808 u/mvg |
| Innbúgv – munur | 413.620,92 u/mvg. |
| Ymiskt | 504.666,62 u/mvg. |
| Prís og lønarvøkstur | 2.400.000 u/mvg |
| Samlað | 4.797.096 u/mvg |

Við 6,25% mvg er samlaði kostnaðurin at gera hetta arbeiðið:

4.823.159,29 v/mvg.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 5775 | LK57047 | FC Hoyvík Felagshús og skýli | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 3.000.000 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 1.050.000 |
| 2775 | L31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 800.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 4.850.000 mió |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 76.008.550,94 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Ì mun til verkætlanina Dagstovninum á Hamrinum mælir umsitingin til, at uttanhýsis frágreiðing verður gjørd av byggi prosessini og galdandi reglugerðum og mannagongdum í samband við bygging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður undir við fyriliggjandi kostnaðum og tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri.
- At játtaðar verða 4.850.000 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
    a. 3 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir konto 5775
    b. 1,05 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875
    c. 0,8 mió. kr. verða játtaðar av verkætlan L31020, Tillagingar á dagstovnaøkinum, undir konto 3175

- At umsitingin fær heimild at gera arbeiðssetning við uttanhýsis ráðgeva í samband við at gera eina frágreiðing í hesum málinum.

- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí broyting at fíggja verður við 1 mió. kr. av 3175 Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð og 2 mió. kr. av 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum og 1 mió. kr. av Løgukarmi LK 57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir kontu 5775 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við mentamálanevndini, við tí broyting at

a. verður fíggjað við 1 mió. kr. av 2775 Eldradepilin í Kollafirði, 1 mió. kr. av kontu 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum, 1 mió kr. av kontu 6109 røkt av bygningum

b. 1,05 mió. kr. verða fíggjað av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875, men arbeiðið verður boðið út.

c. og 0,8 mió kr. av kontu 6275, LK62999  Fríðkan í býnum.

Útreiðslurnar nevndar a, b og c verða játtaðar aftur á kontu í sambandi við fíggjarætlan 2027.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, ið varð samtykti við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum í móti og ongar blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

**Ískoyti**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ **Ja** ☐ **Nei**
**Játtan:**

**Vanlig játtan** ☐
**Eyka játtan** ☒
**Lokað verkætlan** ☐

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 7.900.000,00 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 72.253.000,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**

**Ískoyti**

Tríggjar verkætlanir hava lænt pening frá verkætlan L31011 Dagstovnurin á Hamrinum í byggitíðini. Hóast tað í málslýsingunum stendur, at talan er um eitt lán, sum skal berast verkætlanini aftur í samband við fíggjarætlanina fyri 2026, so er tað vegna ósketni ikki gjørt, tá fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt. Talan er um hesar verkætlanir, sum hava fingið fígging frá L31011 Dagstovnurin á Hamrinum, men sum ikki er afturgoldið:

Verkætlan Upphædd

| | |
|---|---|
| 118/24 Nýggjur durur til fimleikahøllina í skúlanum á Argjahamri | 1.018.000,00 |
| 153/24 Skipan av nýggjum frítíðartilboðum til 3. - 6. flokk | 4.000.000,00 |
| 189/24 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 2.830.000,00 |
| Tilsamans | 7.848.000,00 |

**Fígging**
Møguleiki er at fíggja omanfyristandandi kostnað av løgukarmi LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Upphæddin á 7.900.000 verður afturgoldin á løgukarm LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Hetta verður gjørt í fíggjarætlanini 2027.

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 2775 | LK27012 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 7.900.000,00 |

**Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á mentamáladeildini, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður undir við at fyriliggjandi leisti, sum lýst omanfyri.
- At játtaðar verða 7.900.000,00 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
    a. at 7.900.000,00 verða játtaðar av løgukarmi LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum undir konto 2775.
    b. at fíggjardeildin stendur fyri, at 7.900.000 kr. verða afturgoldnar á løgukarm LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Hetta verður gjørt í fíggjarætlanini 2027.
- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. mai 2026:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bergur Robert Dam Jensen, atkvøður blankt, av tí at vantandi haldføri er í skjølunum, sum liggja við.

**Ískoyti:**
**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, stjórin fyri Heilsu- og umsorganartænastuni og verkætlanarleiðarin mæla til:

At tikið verður undir við at fyriliggjandi leisti, sum lýst omanfyri.

- At játtaðar verða 7.900.000,00 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
  a. at 7.900.000,00 verða játtaðar av løgukarmi LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum undir konto 2775.
- b. at 7.900.000 kr. verða afturgoldnar á løgukarm LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Hetta verður gjørt í fíggjarætlanini 2027.

- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 205/26 Nýggjur skrivstovubygningur til Moldgoymsluna í Húsahaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2026 | 126/26 | 26/03062-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 114/26 | 26/03062-6 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 181/26 | 26/03062-6 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 205/26 | 26/03062-6 |

**Upprunin til málið**
Tørvur er á nýggjum skrivstovubygningi til starvsfólkini á mold- og avgrevstrarplássinum í Húsahaga.

**Lýsing av málinum**
Endamálið við verkætlanini er at skapa nøktandi hølisviðurskiftir til starvsfólkini, ið starvast á mold- og avgrevstrarplássinum í Húsahaga.

Í Húsahaga starvast 3 starvsfólk, 1 starvsfólk røktar skrivstovuuppgávurnar, meðan tveir mans arbeiða við avgrevstrinum. Verandi starvsfólkaumstøður eru út av lagi vánaligar. Í Húsahaga er eitt skapilsi av eini gamlari bingju, sum virkar sum skrivstova og starvsfólkarúm við vesi. Bingjan er gomul og í sera vánaligum standi. Bingjan er staðsett heilt innast Undir Húsareyni, og so statt er verandi staðseting heldur ikki við til at stuðla undir virkseminum á staðnum, har tað er tørvur á at fylgja við, hvørjir bilar koma á staðið við útgrevstri.

Neyðugt er tí at fara undir at byggja ein nýggjan bygning til virksemið, sum verður staðsettur heilt við byrjan av vegnum Undir Húsareyni, tætt við Oyggjarvegin. Sí valdu staðsetingina til nýggja bygningin, sí skjal nr. *26/03062-7, Staðseting skrivstovubygningur í Húsahaga*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 4. grundumráðið í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum ásetur:

1. 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tilíkt.
2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
   a) Loyvt er at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.
   b) Á jarðarstykkjum omanfyri 5.000 $m^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja 60 $m^2$ í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 $m^2$ gólvvídd.
   c) Á jarðarstykkjum undir 5.000 $m^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja 30 $m^2$ gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.
   d) Loyvt er at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar.
   e) Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði.
   f) Øll bygging í 4. grundumráði sambært § 26, stk 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Áðrenn Býarskipanardeildin yvirtók Moldgoymsluna og setti nýggja rakstrarstovnin, Lendis- og kirkjugarðstænastuna á stovn, hevði býráðið samtykt í septembur 2025 at játta kr. 1.000.000 til nýggjan skrivstovubygning til virksemið. Sí mál nr. *25/03238, Raðfestingar á løgukonto 7175, Renovasjón – 2025*.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 784 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Nú er tíðin búgvin at seta tilgongdina og eftirfylgjandi arbeiðið viðv. skrivstovubygninginum í gongd.

Í hesum sambandi hevur Býarskipanardeildin heitt á ráðgevarafyritøkuna Fjalar um at hjálpa við fyrireiking av verkætlanini, at standa fyri prosjektering og útboði av verkætlanini, harumframt at hava eftirlit við byggingini. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku.

Bygningsdeildin saman við starvsfólkum á Lendis- og kirkjugarðstænastuni hava gjørt innleiðandi arbeiðið við at lýsa tørvin og gera uppskot til staðseting og innrætting av skrivstovubygninginum, sí skjal nr. *26/03062-8, Skrivstovubygningur idéupplegg.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*25/03238, Raðfestingar á løgukonto 7175, Renovasjón – 2025*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er heilt stutt umrøtt við Byggimálsdeildina, og verður mælt til, at tá talan er um bygging av bygningi, sum hoyrir til verandi virksemið á staðnum í 4. grundumráði, at søkt verður um frávik frá ásetingunum, tá søkt verður um byggiloyvi. Slík fráviksmál verða løgd fyri Byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan í hvørjum einstøkum føri.

Býarskipanardeildin hevur somuleiðis ætlanir um at fáa gjørt serstaka byggisamtykt fyri økið, har Mold- og avgrevstrarplássið í Húsahaga verður lýst.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
*26/03062-7, Staðseting skrivstovubygningur í Húsahaga*
*26/03062-8, Skrivstovubygningur idéupplegg*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Tá tilboðini verða tøk, verða fíggjarligu avleiðingarnar lýstar nærri, og verður komið aftur í nevnd eftir nøktandi fígging til arbeiðið.
Í fyrstu atløgu verður játtanin á rakstrarkonto 6212, áljóðandi kr. 1.000.000 flutt á nýggja verkætlan undir kt. 6275.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6212 | | Fríðkan av býnum, Lendisliðið | 6275 | | | Skrivstovubygningur í Húsahaga | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Ókent |
| Áður játtað | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 12.000 |

**Tilmæli**:
Tekniskur stjóri, býararkitekturin og leiðarin á Lendis- og kirkjugarðstænastuni mæla til at:

- heimila umsitingini at prosjektera og bjóða byggingina av skrivstovubygninginum í Húsahaga út í høvuðsarbeiðstøku,
- umsitingin kemur aftur í nevnd, tá tilboðini eru innkomin,
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026:** Samtykt við tí viðmerking, at henda orðing gerst partur av tilmælinum:

"At játtanin á kr. 1 mió verður flutt av rakstrarkontu 6212, Fríðkan av býnum, Lendisliðið, á nýggja verkætlan Skrivstovubygningur í Húsahaga, undir kontu 6275 Fríðkan av býnum (íløgur)."

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 206/26 Parkeringsskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 22/26 | 25/11126-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 39/26 | 25/11126-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 61/26 | 25/11126-3 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.05.2026 | 66/26 | 25/11126-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 118/26 | 25/11126-3 |
| 6 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 190/26 | 25/11126-3 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 206/26 | 25/11126-3 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 9901848 Parkerinsskipan í Tórshavnar kommunu, har kommunan og Føroya Fútadømi avtalaðu í 2003 at dagføra parkeringskipanina í kommununi og sum liður í menningin var millum annað farið undir at brúka eina innkrevjara- og telduskipan, TicketMan, sum parkeringansararnir skuldu brúka.

**Lýsing av málinum**
Parkerignsskipanin, sum Føroya Fútadømi/Føroya Politi saman við Tórshavnar kommunu hevur nýtt í meiri enn 20 ár, treingir til umfatandi dagføringar. Størsta avbjóðingin er tann parturin í skipanini, sum fyrisitur innkomin parkeringsgjøld. Talan er um eina gamla skipan, sum samankoyrir ásett gjøld fyri ólógliga parkering saman við skrásetingini hjá Akstovuni. Skipanin er nú vorðin ótíðarhóskandi og hevur umsitingin hjá Føroya Politi havt trupult við at senda kommununi kvatrárligar fíggarligar uppgerðir. Av somu orsøk hava trupuleikar verið við fíggjarstøðuni á rakstarkonto 7610 Parkeringsskipanin.

Umsitingin hevur kannað møguleikarnar fyri at dagføra skipanina og komin til ta niðurstøðu at royna aðra skipan. Í hesum sambandi hevur umsitingin kunnað seg um skipanina hjá Tunnilsfelagnum og Vága Floghavn. Skipanin hjá Tunnilsfelagnum hevur vist seg at virka sera væl og hóast at hendan skipan ikki í verandi líki kann nýtast av kommuni, so hevur umsitingin fingið eina fyribils kostnaðarmering frá Formula, sum eigur skipanina hjá Tunnilfelagnum, til at gera eina líknandi skipan til Tórshavnar Kommunu.

Skipanin hjá Formula verður ein skipan, har dátur frá parkeringsansarum verða tengd saman við upplýsingum frá Akstovuni og upprættað sum ein kreditor sak. Saman við rokniskaparskipanini hjá Føroya Politi, verður giro send til avvarandi bileigara, antin talgilt ella fysiskt.

Í sama viðfangi er neyðugt at dagføra skipanina ið parkeringsansarnirnir brúka úti á gøtunum, til at skráseta ólógligar parkeringar. Skipanin, ið er umsitin av veitaranum Schweers er ótíðarhóskandi og hevur veitarin í fleiri ár hildi einari gamlari útgávu av skipanini koyrandi einans vegna Tórshavnar Kommunu. Tískil hevur umsitingin eisini fingið eina fyribils kostnaðarmeting frá Schweers uppá at dagføra skipanina til eina nýggjari útgávu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 30. apríl 2025:
§ 58 e, stk. 9 Landsstýrismaðurin kann áseta, at eftirlitið við, at reglurnar, ið nevndar eru í stk. 1, verða hildnar, heilt ella partvíst verður latið viðkomandi bý- ella bygdaráði eftir samráðing at umsita. Landsstýrismaðurin setur greiniligari reglur um starvið hjá kommunalum parkeringsvørðum.

§ 58 e ,Stk. 7. Landfútin kann lata serligum parkeringsvørðum heilt ella fyri ein part at hava eftirlit við, at reglurnar, ið nevndar eru í stk. 1, verða hildnar. Landsstýrismaðurin setir greiniligari reglur um starvið hjá parkeringsvørðum.

§ 58 e ,Stk. 8. Útreiðslurnar av parkeringsvørðum verða goldnar úr landskassanum ella eftir samráðing við viðkomandi bý- ella bygdarráð av viðkomandi kommunu.

§ 58 e ,Stk. 9. 4) Landsstýrismaðurin kann áseta, at eftirlitið við, at reglurnar, ið nevndar eru í stk. 1, verða hildnar, heilt ella partvíst verður latið viðkomandi bý- ella bygdaráði eftir samráðing at umsita. Landsstýrismaðurin setur greiniligari reglur um starvið hjá kommunalum parkeringsvørum.

Kunngerð nr. 138 frá 22. desember 2000 um innkrevjing av gjaldi fyri ólógligan steðg ella ólógliga parkering:
§ 1. Gjaldið fyri brot á tær í § 58 e, stk. 1, í ferðslulógini fyrisettu reglur um steðg og parkering, skal rindast Føroya Landfúta innan 10 dagar frá tí degi, tað er álagt. Verður roynt at krevja gjaldið frá eigaranum (nýtaranum) eftir § 58 e, stk. 4, í ferðslulógini, fær hann eina freist at rinda gjaldið upp á minst 10 dagar roknað frá tí degi, hann hevur fingið boð um gjaldskravið.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
25/11126-1 Tilfar frá stýrisfundinum í dag – Parkeringsskipan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Verður fíggjað av rakstrarkontu 7610, Parkeringsskipanin.

Umsitingin hevur móttikið tilboð frá Formula upp á eina dagførda parkeringsskipan álj. kr. 335.707 (u/mvg). Umsitingin hevur eisini móttikið tilboð frá Schweers upp á eina dagførda skrásetingarskipan álj. Kr. 88.920,50 (u/mvg).

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til játta kr. 500.000,- til endamálið at fáa eina dagførda parkeringsskipan.
Alternativt fíggjað av løgukontu 8175 Vegir (íløgur) LK81999 Vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin er komin eftir, at rakstrarkonta 7610 Parkeringsskipanin hevur stórt trot og kann tí ikki brúkast til at fíggja nevndu skipan.

Tí er neyðugt at skipanin verður fíggjað av konto 8175 Vegir (íløgur) LK81999 Vegaverkætlanir sum eykajáttan.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 7610 | | Parkeringsskipanin | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fíggja dagføringina av parkeringsskipanini av løgukarminum LK81999 Vegaverkætlanir undir kontu 8175 Vegir (íløgur) sum eykajáttan og beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Útsett.

**Ískoyti**
Undir konto 8175 Vegir (íløgur) er annar løgukarmur LK81998 Parkering, og í 2025 eru ásettar kr. 700.000 fyri fíggjarárið.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 789 | Forkvinnunnar merki: |

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81998 | Parkering | 7610 | | Parkeringsskipan | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fíggja dagføringina av parkeringsskipanini álj. kr. 500.000 av løgukarminum LK81998 “Parkering” undir kontu 8175 Vegir (íløgur) sum eykajáttan og beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. mai 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at arbeiðið ikki er boðið út, og at kommunan heldur skuldi farið undir eina tilgongd at øll skuldu goldið fyri at parkera í býnum í ein parkeringsgrunn, sum kommunan eigur og rekur.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skúla, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at arbeiðið ikki er boðið út, og at kommunan heldur skuldi farið undir eina tilgongd at øll skuldu goldið fyri at parkera í býnum í ein parkeringsgrunn, sum kommunan eigur og rekur.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, einari atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Súna Mørk og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen Guttormur í Skála, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

Blankt atkvøddi: Høgni Vilhelmsen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 791 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 207/26 Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat - 19/00411

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.06.2026 | 88/26 | 25/00338-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 138/26 | 25/00338-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 207/26 | 25/00338-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 25/00338-1 |

**Upprunin til málið**
Loka verkætlan

**Lýsing av málinum**
Verkætlanin "Útbygging, Býlingshúsið vesturi á Flat" er liðug og kann lokast.

Mælt verður til at loka verkætlanina at flyta avlopið á 390 tús. kr av konto 3175 - L31010 til konto 6110 og oyramerkja upphæddina til ventilatión í Sankta Jósef barnagarði.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐

| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 792<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 3175 | L31010 | Útbygging, Býlingshúsið vesturi á Flat |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6110 | | Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað | |

| **Upphædd** |
|---|
| 390.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjóri, tekniski stjóri, deildarleiðari fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:

- verkætlan verður lokað,
- avlopið verður flutt á konto 6110 og
- upphæddin verður oyramerkt til ventilatión í Sankta Jósef barnagarði.

**Mentamálanevndin 03. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

## 208/26 Náttúruøki í Dalinum Langa - 22/01129

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 160/26 | 25/00421-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 208/26 | 25/00421-2 |

**Upprunin til málið**
Ynski var um at gera Dalin Langa til eitt enn betri náttúruøki hjá borgarunum í eystara parti av Hoyvík at nýta til rekreatión, og var heildarætlan boðin út til 4 veitarar í 2022.
Ætlanin var íroknað at gera fleiri gøtusambond, sum gera tað møguligt at ganga ein rundtúr í økinum og uppliva náttúruna, gróðurseta fyri at skapa lívd og framhevja náttúrukensluna í økinum og at gera uppihaldspláss við ymiskum aktivitetum, t.d. náttúruspælipláss, útferðarpláss og annað. Sí *skjal nr 25/00421 Upprunaliga málslýsing, mál 22_01129, náttúruøki í Dalinum langa.*

**Lýsing av málinum**
4 tilboð um heildarveiting komu inn, har veitararnir skuldu gera uppskot til skipan av økinum.
Urtagarðstænastan vann útboðið, sí *skjal nr. 25/00421-1, Tilboð Urtagarðstænastan.*
Tillagingar í mun til upprunaliga tilboðið blivu gjørdar.
Millum annað varð tættari vøkstur plantaður framvið Kirkjugarðsleiðini, planting av fuchsia tikin úr, av tí at hon verður mett innræsin.
Í upprunaætlanini var ætlanin býtt í 12 ymisk øki, har spælipláss, parkøki, hegnvøkstur og trævøkstur var lýst.
Í Býráðssamtyktini 15. desember 2022, varð samtykt at gera sáttmála við arbeiðstakara uppá tilboðsupphæddina 5.390.618 kr u/mvg.
Ætlanin fyri spæliplássini var ikki lýst nóg neyvt, og var tí tikin úr, áðrenn sáttmáli varð gjørdur við arbeiðstakara. Avtalað varð, at umsitingin kundi skipa hesi og seta tey í gongd seinni.
Sáttmáli varð gjørdur við arbeiðstakara áljóðandi 3.919.642,- u/mvg.

Umsitingin viðgjørdi hvat ynskiligt var at fáa til spæliøki í ætlanina og er niðurstøðan at spæli-/uppihaldsøkini verða skipað við:
- Náttúruspæliøki við Myllutjørn
- Súkkluspælipláss (pump-track) á fløtuna
- Fríðka verandi spælipláss
- Ein spælileið fram við gøtuni norðanfyri Myllutjørn
- Ein skreiðibani (heilárs) niðarlaga í dalinum

Mett verður, at tað er upplagt høvi at skipa súkkluspæliøki í økinum sum hevur nógvar so nógvar barnafamiljur. Við hesum fáa børnini betri møguleika at læra at súkkla, og verða eggjað at velja súkkluna sum spæl.

Sáttmálaarbeiðið:
Arbeiðið at planta og gera gøtuna eystanfyri dalin byrjaði í 2023.
Skipað var fyri plantudøgum saman við íbúgvum, vinnuvirki og skúlum í grannalagnum.
Í økinum eru plantað uml 50.000 trø og runnar, smb ætlanini.
Sum heild hevur vøksturin fingið frið, og hevur komið seg væl, so viðarlundarkenslan er byrjað.
Gøta er gjørd á eystaru síðu á Dalinum Langa, umframt samband millum nýggju gøtuna og Kirkjugarðsleiðina, soleiðis at Dalurin nú verður brúktur til trivnað og uppihald og ikki bara er ein gjøgnumgongsleið ígjøgnum dalin.

**Upplýsingar frá umsitingini**
<u>Gøtur at leggja afturat.</u>
Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi við røktaríbúðum, skulu gøtur gerast, so gøtusamband er tá ið tað verður liðugt.

<u>Beinkir:</u>
Harumframt verður neyðugt at seta fleiri beinkir upp í náttúruøkinum, og við Myllutjørn, so nógv hvílipláss eru til tey sum ganga á gøtunum. Hetta kann raðfestast beinanvegin í summar.
<u>Ábøtur:</u>
Økið við Myllutjørn treingir til at verða hampað og at gjørdar verða ábøtur. Hetta kann verða raðfest av somu játtan.
<u>Súkkluspæliøki við Myllutjørn.</u>
Samstarv er við Fjallasúkklufelagið, sum skal undir at byggja oyggjaleikabreyt í Flatnahaga til oyggjaleikir í 2027.
Fjallasúkklufelagið hevur serfrøðingar á økinum, at byggja tílíkar súkklubreytir í Føroyum, úr Kanada og aðra staðir, og er tí avtalað við tey, at fara undir at gera økið markerað við grønum *sí skjal nr 25/00421-7 Súkkluspælipláss við Myllutjørn*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Jnr 20/00622 Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl:**
*Skjal nr 25/00421 Upprunaliga málslýsing, mál 22_01129, náttúruøki í Dalinum langa*
*Skjal nr 25/00421-7 Súkkluspælipláss við Myllutjørn*
*Skjal nr. 25/00421-1, Tilboð Urtagarðstænastan.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Tøk játtan til liðugtgerð av verkætlanini er 1.829.921,00 kr, og er ætlanin at fara undir at:
- Seta fleiri benkur upp í økinum, soleiðis at høvi verður at seta seg á njóta økið.
- Hampa og gera ábøtur á Myllutjørn, plattin osfr.
- Gera súkkluspæliøki *Jnr 25/00421-7 Súkkluspælipláss við Myllutjørn*(grøna markeringin, og um peningurin røkkur eisini reyða markeringin).

**Tilmæli**:
Tekniskur stjóri og býararkitekturin mæla til at:
- Kunnað verður um málið við tí nágreinan, at verkætlanin heldur fram, og farið verður nú undir at seta fleiri benkur upp, hampa og gera ábøtur á Myllutjørn og verður farið undir at gera súkkluspæliøki í bakkan norðanfyri Myllutjørn og møguliga eisini at gera ein bungu súkklubana (pump-track) á fløtuna.
- Málið verður beint í býráðið til kunningar

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2026:** Kunnað varð um málið. Málið verður beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Kunnað varð um málið.

# 209/26 Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 108/25 | 25/07379-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 143/25 | 25/07379-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 202/25 | 25/07379-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 232/25 | 25/07379-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 209/26 | 25/07379-1 |

**Upprunin til málið**

Vánaliga inniluftin í bygninginum í Steinatúni, hevur verði ein trupulleiki í nógv ár. Seinastu 2-4 árini er trupulleikin versnaður, tí tað er farið at leka inn ígjøgnum bæði tekju og fasadur. Starvsfólk hava gjørt vart við seg fleiri ferð. Í samráð við trygdarnevndina leggur leiðslan tí fýra mál til politiska støðutakan:

- Hetta mál; 25/07379_Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún"
- Mál; 25/07477_Bráðflyting av Teknisku Fyrisiting til Sjóvinnuhúsið
- Mál; 25/07478_Flyting av KT- og Fíggjardeild
- Mál; 25/07479_Leigumál á fyrstu hædd í Steinatúni flytast

Málini hanga saman, men hava hvørt sítt tilmæli um játtan og víðari framferð.

**Lýsing av málinum**

*Bygningurin:*

Í 2013 keypti Tórshavnar Kommuna bygningin í Niels Finsens gøtu 15, frá táverandi BankNordik. Bygningurin, nú vanliga róptur "Steinatún", var innrættaður av nýggjum til skrivstovur til kommunala fyrisiting á trimum hæddum. Í dag heldur Tekniska fyrisiting til á fjórðu og triðju hædd, og KT- og Fíggjardeildin á aðru hædd. Fyrsta hædd var í 2016 og 2017 innrættað til trý leigumál, og innandura torg.

Upprunaligi bygningurin stóð liðugur í 1958, tá P/F Føroya Banki flutti inn. Bygningurin hevur øll árini, verið nýttur sum banka- og skrivstovubygningur.

Høvuðskonstruktiónin í bygninginum er jarnbetong við faststoyptum betongflísum á útsíðunum.
Bygningurin hevur onga bjálving í útveggjunum. Á innsíðuni á útveggjunum er "skinnið" einans ein tunnur forsatsveggur t.e. pláta á timburskelett.

Trappur eru í báðum endum av bygninginum, og nøkta tí minsta kravið til rýmingarleiðir. Gamla lyftan lýkur hinvegin ikki nútíðar krøv (BK 17) um felags atkomuveg.

Bygningurin hevur ikki mekaniska luftskiftisskipan, og upprunaliga hitaskipanin er ótíðarhóskandi.

*Standurin:*

Trupulleiki av ringari inniluft er staðfestur í fleiri kanningum av luftgóðsku og arbeiðsumhvørvi annars. Í fleiri ár hava trupulleikar verið av lekum. Kanningar av ávísum bygningslutum staðfesta, at álvarsamir fylgiskaðar kunnu standast av lekunum. Vætan millum skinn og hold elvir til soppavøkstur og harvið er inniluftin ótolandi fyri starvsfólk, sum arbeiða nærhendis har tað lekur ella hevur likið inn.

Virksemið á fyrstu hædd gevur nógvan hita frá sær, og tí hevur serliga onnur hædd havt trupulleikar av alt ov høgum hita. Á triðju hædd er vætan í luftini alt ov høg, og á fjórðu hædd (loftshæddin) er trupult at regulera hita og kulda, alt eftir um tað er summar ella vetur. Samanumtikið er luftgóðskan ring, ikki minst tí at bygningurin er ov trongur til talið av starvsfólkum.

Í fleiri umførum eru smærri umvælingar gjørdar. Í 2022 vórðu fimm stór vindeygu skift á fyrstu hædd. Í 2024 og 2025 varð hol sett á forsatsveggir á triðju hædd. Staðfest var, at rennistokkar og sjálv kopartakrennan lekur í støðum. Blikksmiðurin, sum umvældi takrennuna, gjørdi hetta við tjøru, tí ikki bar til at lodda í verandi kopar, tí hetta er tunt og slitið við microholum í.

Í juli mánaði 2025 var Teknologisk Institut í bygninginum og gjørdi fleiri "destruktivar" kanningar av bygningslutum og arbeiðs- og inni umhvørvinum annars. Kanningin staðfestir at tað generelt er funnið "vækst af skimmelsvampe". Kanningin mælir til at *"Medarbejdere der oplever gener, bør få lavet en individuel lægefaglig vurdering af sammenhængen med den registrerede skimmelsvampevækst. Indtil der foreligger en afklaring bør medarbejdere med gener ikke have længerevarende ophold i bygningen".*

Kanningin mælir til at tryggja klimaskermin og síðani at útføra eina *"skimmelrenovering"* Eisini verður mælt til *"en grundig gennemgang af varmeanlægget, da der er tegn på at der er problemer med høje temperaturer i bygningen"*

Í juli 2025 sendi Trygdarnevndin fyri fyrisitingina út spurnarblað um sjúkueyðkenni. Spurnarblaðið varð sent til starvsfólk á aðru, triðju og fjórðu hædd. Umleið 80 % av starvsfólkunum svaraðu spurnarblaðnum. Deildin fyri almanna heilsu fer at greina tølini nærri. Pál Weihe luttók á kunningarfundi hin 26.08.2025 og vísti í hesum sambandi til omanfyri nevndu kanningar.

*Høvuðsmvæling*
Útsíður og tekjan eru í so mikið ringum standi, at neyðugt er at høvuðsumvæla "klimaskermin" t.e. alt uttara skalið. Væntandi skal kopartekjan skiftast og rennistokkar staðsetast uttaná fasaduna. Vindeygu og úthurðar við inndekningum mugu skiftast og gerast av nýggjum. Støða má takast til um flísafasadan skal varðveitast og umvælast í verandi ella broyttum líki.

Í mun til innrætting, atkomuviðurskifti og tekniskar installatiónir eigur hetta at lagast til eina ávísa nýtslu, soleiðis at hóskandi loysnir verða valdar. Nýggj lyfta eigur at verða gjørd, sum í minsta lagið lýkur krøvini til felags atkomuveg, umhugsast skal um lyftan eisini eigur at rúma eini ambulansubøru.

Tað er umráðandi at fyrireika høvuðsumvælingina væl og virðiliga.

Mælt verður til at gera skipanaruppskot, sum tekur støðu til framtíðar nýtslu og innrætting í bygninginum. Uppskotið eigur at taka útgangsstøði í "Urtagarðsbýnum", sum er heildarætlan, ið Býarskipanardeildin læt gera í 2022.

Samstundis kann nýggi klimaskermurin detailprosjekterast. Høvuðsumvæling av klima-skerminum kann møguliga bjóðast út fyri seg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- Mál; 25/07477_Bráðflyting av Teknisku Fyrisiting til Sjóvinnuhúsið
- Mál; 25/07478_Flyting av KT- og Fíggjardeild
- Mál; 25/07479_Leigumál á fyrstu hædd í Steinatúni flytast

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

| Býráðsfundur<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 798 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/07379-3 Tíðarætlan
25/07379-2 Kanning frá Teknologisk Institutt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Víst verður til leysliga kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanin. Stór óvissa er tengd at verkætlanini, tí enn er ógreitt, hvat bygningurin fer at verða nýttur til. Eingin løgukarmur er fyri hetta í 2025.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | Høvuðsumvæl ing av bygninginum Steinatún |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Mettur kostnaður umleið kr. 54 mió. |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 / 2029 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Møgulig sparing |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at stovna sjálvstøðuga verkætlan nevnd "Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún", sum verður at fíggja av løgukarmi fyri 2026, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at hetta verður fíggjað av meirinntøkunum í 2025.

**Ískoyti**
Fyri at seta ferð á arbeiðið, at fáa fyrireikað høvuðsumvælingina av bygninginum í Steinatúni er neyðugt, umframt at stovna verkætlanina "Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún", eisini at peningur verður játtaður til hesa verkætlan til fyrireiking og projektering. Ásannandi, at slíkt arbeiði kann verða umfatandi er tað trupult at áseta neyva meting av neyðugari játtan. Mælt verður til at gera skipanaruppskot, sum tekur støðu til framtíðar nýtslu av bygninginum og fara undir at detail prosjektering av klimaskerminum. Mett, at neyðugt er við 4 mió kr. til at arbeiða við hesum í fyrstu atløgu.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | Høvuðsumvæling av bygningi Steinatún | 4.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Uml. 54 mió kr. |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2029 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ikki kent enn |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla fíggjarnevndini til at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini. Harumframt at játta kr. 4 mió. kr. til verkætlan, sum verður at fíggja av meirinntøkum fyri 2024 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at ein bygginevnd verður sett eftir vanligum leisti, og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum í fyrstu syftu.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddi: Ongin

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddi: Ongin

Blankt atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Málið varð sostatt samtykt við aðru viðgerð við 8 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

**Ískoyti**
Á býráðsfundi 23. oktober 2025 varð samtykt at seta bygginevnd.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim fyri meirilutan og ein lim fyri minnilutan.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Samtykt at velja Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgna Vilhelmsen í bygginevndina.

# 210/26 Mannagongd í sambandi við størri íbúðarverkætlanir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 33/26 | 26/00813-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 60/26 | 26/00813-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 210/26 | 26/00813-1 |

**Upprunin til málið**
Nógvar umsóknir um íbúðarverkætlanir verða sendar kommununi árliga. Tørvur er á at skipa tilgongdirnar við hesum verkætlanunum, soleiðis at tilgongdin verður greið hjá øllum pørtum, umsøkjarunum, umsitingini og politisku skipanini.

**Lýsing av málinum**
Sum partur av verkætlanini "Býarskipan 2025", mál nr. 25/04377, varð arbeitt við, hvussu tilgongdin við privatu íbúðarverkætlanunum skal vera.

Tað hevur verið sera ymiskt, hvussu verkætlanir koma inn í kommununa, og hvussu hesar hava verið viðgjørdar. Í summum førum hava mennarar vent sær beinleiðis til politisku skipanina fyri at fáa viðhald í verkætlanini, áðrenn hon hevur verið send inn til kommununa. Í øðrum førum eru verkætlanir sendar kommununi, og so hevur umsitingin viðgjørt umsóknina fyri síðani at leggja hana fyri politisku skipanini.

Tað verður mett týdningarmikið, at tilgongdin verður greið fyri allar partar – eisini soleiðis at mennararnir føla, at allar íbúðarverkætlanir verða viðgjørdar eins.

Somuleiðis hevur tað víst seg týdningarmikið, áðrenn umsitingin arbeiðir ov nógv við eini verkætlan, at politiska skipanin fær møguleikan at umrøða verkætlanina við tí endamáli at taka støðu til, hvørt tað er ynskiligt, at umsitingin arbeiðir víðari við verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til kommunalu tilgongdina fyri verkætlanir, sí skjal nr. *25/00813-2, Tíðarætlan_tilgongd.*
Tilgongdin er skipað í trý yvirskipað løg, sum eru:

- Mennarin (hetta lagið lýsir, hvønn leiklut mennarin hevur í tilgongdini)
- Kommunan (hetta lagið lýsir, hvørjar ymisku uppgávurnar eru í umsitingini, nær verkætlanin verður viðgjørd politiskt, og nær hon verður send landinum til endaliga góðkenning)
- Borgarin/almenningurin (hetta lagið lýsir, nær verkætlanin verður almenn)

Tilgongdin er drúgv, frá tí at mennarin sendir kommununi fyrsta hugskotið, og inntil byggisamtyktin er tillagað ítøkiliga hugskotinum.

Føroyar hava ikki somu siðvenju innan byggisamtyktarøkið, sum onnur lond ella aðrar útlendskar kommunur hava.
Okkara serstøku byggisamtyktir eru at javnseta við "lokalplanir" í Danmark. Tó so, so eru okkara serstøku byggisamtyktir als ikki líka ásetandi sum t.d. danskar "lokalplanir". Tískil gevur tað meining, at serstøku byggisamtyktirnar verða tillagaðar til ítøkiligu íbúðarverkætlanirnar, so hvørt tær verða mentar.

Harafturat eru staðbundin viðurskiftir sera týdningarmikil fyri at meta um, hvør bygging kann hóska seg til ávísa staðið. Hvussu nógv og hvat slag av bygging økið tolir, er alt eftir ítøkiliga staðnum og aðrari bygging í nærumhvørvinum.

Somuleiðis er íbúðarbygging lutfalsliga nýggjur bústaðarháttur í Føroyum. Vit hava eina sera drúgva byggimentan innan sethúsabygging, men tá tosað verður um byggimentanina í sambandi við íbúðarbygging í Føroyum, so er hon enn lutfalsliga nýggj og í stórari menning. Menningin gongur bæði upp á, hvussu føroyingurin ynskir at búseta seg, í hvørjum funktionellum rammum ynskiligt er at liva, samstundis sum at býarskipan til íbúðarbygging og byggisiðurin/arkitekturin innan hesa bygging enn er í stórari menning.

So leingi sum vit ikki hava ment henda bústaðarhátt at hóska til okkara gomlu byggimentan og arkitektur, so verður mett, at tað er ráðiligt at stórar íbúðarverkætlanir verða mentar í samstarvi við mennararnar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 25/04377, Býarskipan 2025

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
Skjal nr. *25/00813-2, Tíðarætlan_tilgongd*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | x | x | x | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | x |
| Sosialar avleiðingar | | x | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilgongdin við íbúðarverkætlanum verður skipað sambært skjalinum *25/00813-2, Tíðarætlan_tilgongd,* og at málið verður beint í býráðið til endaliga støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á seinasta fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini spurdi nevndarlimur inn til hvat tilfar umsitingin krevur frá umsøkjara í samb. við íbúðarbygging í kommununi.

Umsitingin hevur gjørt eitt skjal, ið vísir, hvørji viðurskifti eiga at verða lýst, tá umsøkjari sendir inn umsókn um at gera eina nýggja serstaka byggisamtykt, sí skjal *26/00813-5, Tilfarð, ið skal latast inn*. Skjalið er deilt í tvey, og vísir tað á, hvørji viðurskifti skulu lýsast, tá man er í ávikavist stiginum, tá hugskotið verður ment, nevnt "Hugskot" í skjalinum og tá ítøkiliga uppskotið til byggisamtykt verður gjørt, nevnt "Umsókn" í skjalinum. Tað er ikki vist, at tað er viðkomandi at lýsa øll viðurskiftini, sum standa í skjalinum, men umsøkjari skal taka støðu til, um tað er viðkomandi at upplýsa ella ikki.

<u>Lýsing av skjalinum "Hugskot":</u>

Lýsir tilfarið, ið skal latast inn í sambandi við umbøn um fund. Hetta er tilfar, ið lýsir fortreytirnar fyri verkætlanini, verandi umstøður og eina heilt yvirskipaða lýsing av, hvat verkætlanin snýr seg um. Hetta er t.d. lýsing av eigaraviðurskiftum, um ætlanin er í samsvari við aðrar ætlanir og politikkir kommununar, hvørji náttúru og dýrdarvirði eru í verandi øki, og flytføri, umframt ein yvirskipað lýsing av ætlaðu verkætlanini.

Tá tilfarið er latið inn, kann fundur skipast millum umsitingina og umsøkjara, har ætlanin verður umrødd, og um neyðugt verða onkrar tillagingar gjørdar. Við støði í tilfarinum og fundinum, verður ætlanin lýst fyri politisku skipanini, soleiðis at hon kann taka støðu til, um hetta er ein ætlan, arbeiðast skal víðari við. Hetta fyrsta stigið tryggjar, at politiska skipanin er kunnað um, og tekur støðu til, um ynskið er at fremja lýstu verkætlan, áðrenn umsiting og umsøkjari nýta óneyðuga nógva orku at framleiða endaligt tilfar og gera uppskotið til serstøku byggisamtyktina.

Lýsing av skjalinum "Umsókn":
Lýsir tilfarið, ið skal latast inn í sambandi við ítøkiligu verkætlanina. Hetta skal lýsa verkætlanina, og hvørja ávirkan verkætlanin hevur á økið kring hana. Hesin listin er býttur í trý:

- Bygda umhvørvið, ið m.a. skal lýsast við byggilistarligum meginreglum, tekningum av værkætlanini og skipanini av økinum og myndum, ið vísa dámin.
- Náttúra, ið m.a. skal lýsast við nyttuvirði og dýrdarvirði í økinum, áðrenn og eftir at verkælanin er framd.
- Flytføri, ið m.a. skal lýsast við vegaíbindingum, p-plássum og samferðsluloysnum.

Hetta tilfarið skal geva eina nøktandi lýsing av verkætlanini, soleiðis at uppskot til serstaka byggisamtykt kann gerast.

**Skjøl:**
*Skjal nr. 26/00813-4, Umsókn um byggisamtyktarmál – tilfar at lata inn*.
*Skjal nr. 26/00813-5, Tilfarð, ið skal latast inn*

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini 9. februar 2026, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 211/26 Skiftingarhús í Nólsoy Skiftingarhús í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 162/26 | 26/04905-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 159/26 | 26/04905-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 211/26 | 26/04905-1 |
| 4 Nólsoyarnevndin | 22.09.2026 | 7/26 | 26/04905-1 |

**Upprunin til málið**
Borgarar í Nólsoy hava havt ynski frammi um betri umstøður at skifta klæði, tá svimjast skal á sjónum. Ynski er at kommunan lat byggja ein umklæðingarhús, eins og á Hvítanesi og við sandin í Sandagerði onkustaðni í økinum við Malarenda.

**Lýsing av málinum**
Í Nólsoy er áhugin at svimja á sjónum stórur, og umstøðurnar til at dyppa og svimja eru serstakliga góðar við sandin í Bátahylinum. Aloftast verður farið á sjógv beint norðanfyri dráttin.

Ein avbjóðing er tó, at umstøðurnar at skifta í og úr svimniklæðum ikki eru nøktandi. Í verandi løtu verður eitt privat neyst hinumegin Malarendavegin nýtt at skifta í eftir vælvild frá eigaranum. Men tíðum stendur útbúnaður, sum. t.d. traktorur, inni í neystinum, og tá er sera trongligt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið við Malarenda liggur í ymiskum umráðispørtum í almennu byggisamtyktini fyri Nólsoy.
Partur av økinum liggur í umráðispartinum B1, við hesum ásetingum:

**§ 3. Ásetingar fyri umráðispart B1**

1 Umráðisparturin verður lagdur til endamál, ið hava við havnarakstur, skipaferðslu, samferðslu og fiskivinnu at gera og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

2 Byggistigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, ikki fara upp um 0,5.

3 Hús skulu ikki vera hægri enn 8,5 m til hægsta punkt við útvegg.

4 Bygging skal ikki verða sett nærri bryggjutromunum enn 12 m.

Annar partur av økinum liggur í umráðispartinum C, sum er við hesum ásetingunum:

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispart C**

1 Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging, stovnum, framsýningarhølum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentanarligum stovnum og tílíkum, og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

Miðstaðarbygging má einans vera hús, sum verða innrættaði til handlar, skrivstovur, stovnar, gistingarhús, matstovur, mentanarligir stovnar og tílíkt.

2 Bygging verður einans loyvd sambært eini byggiætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

Natúrligt avmarkað øki í mun til lendi, skap, mørk (t.d. vegir) bygging, dámin í økinum o.a.

3 Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.

4 Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Skiftingarhúsini, sum kommunan hevur latið bygt við sandin í Sandagerði (matr. nr. 980) og við dráttin á Hvítanesi (matr.nr. 118), eru hús er til støddar sum ein vanligur hjallur við eini vídd á umleið 2,5 x 3 metur og við flagtekju. Sí tilvísingarnar í skjali nr. *26/04905-2, Verkætlanarlýsing - Skiftingarhús í Nólsoy.* Í báðum førum er talan um hús, sum eru sett í økini sum flytbarar bygningseindir.

Kostnaðarmetingin av hesi verkætlanini er kr. 300.000.
Á leið helmingurin er kostnaður fyri bygging av sjálvum húsinum, og hin helmingurin er lendisarbeiði og fríðkan av økinum.

Staðseting
Í samb. við at staðseta eitt tílíkt skiftingarhús, so verður mælt til, at tað verður staðsett á matr. nr. 126a í Nólsoy, á grøna økinum beint við dráttin við Malarenda. Sí kortskjølini í skjali nr. *26/04905-2, Verkætlanarlýsing - Skiftingarhús í Nólsoy.*
Henda staðseting er tætt uppat, har farið verður á sjógv.

Býarskipanarliga verður mett, at tað hevur týdning, at eitt slíkt skiftingarhús verður staðsett rættiliga nær sjóvarmálanum, so at fólk fáa skift tætt upp at har farið verður á sjógv. Somuleiðis er tað týdningarmikið, at tey sum gera gagn av at svimja á sjónum ikki skulu yvir um ein bilveg á veg út á sjógv, tá hetta kann gerast vandamikið.
Eitt slíkt skiftingarhús eigur at vera sjónligt og lætt at finna, og umframt hetta, verður mett, at eitt minni skiftingarhús í siðbundnum føroyskum neystasniði við flagtekju í júst hesum økinum, kann hetta gerast eitt samleikamennandi tekki fyri bygdina.

Avbjóðingar við staðsetingini:
Byggisamtyktin: Í verandi løtu er tíverri eingin byggisamtykt í Tórshavnar kommunu, sum beinleiðis rúmar sjóbundnum trivnaðar- og vælveruvirksemi, sum t.d sjósvimjing og tilhoyrandi umklæðingarhølum. Hetta kemst allarhelst av, at hetta við vælveru við sjóvarmálan ikki hevur verið ein siðvenja, men hevur virksemið tikið dik á seg millum manna í nýggjari tíð, og tað hevur neyvan ligið fremst í huganum, tá byggisamtyktirnar vórðu smíðaðar.
Við øðrum orðum loyvir eingin byggisamtykt, at eitt varandi skiftingarhús verður staðsett við sjóvarmálan í Tórshavnar kommunu.
Um talan er um eina fyribilsverkætlan við flytbarum bygdum eindum, er støðan ein onnur, men um varandi loysnir skulu finnast fyri at hýsa slíkum virksemi, mugu tillagingar allarhelst gerast á eina ella fleiri byggisamtyktir.

Á hesum økinum á matr. nr. 126a liggur størsti parturin av økinum í B1 byggisamtykt, og minni parturin liggur í C byggisamtykt.
Hvørgan av hesum byggisamtyktunum loyvir einum skiftingarhúsi, og tískil verður neyðugt, tá søkt verður um byggiloyvi, at søkja byggivaldið um frávik frá ásetingunum.

Veitingarkervi:
Um ljós og hitalampur skulu hugsast í skiftingarhúsið, og um møguleiki skal vera at skola sær her, verður neyðugt at leggja leiðingar út til økið.
Ein el-leiðing má leggjast í eina grøv út í hetta økið, har umleið 26m eru yvir til nærmasta SEV skáp.
Vatnleiðing má leggjast slakar 50m oman í hetta økið á sama hátt,
Bæði el og vatn má leggjast tvørtur um Malarendavegin í eina grøv, sum skal hampast aftur.

Matrikkulviðurskifti:
Nevnast skal, at ein gamal neystamatrikkul (matr. nr. 3a) liggur beint innanfyri og tvørt fyri hesa ætlaðu staðsetingina. Talan er um privat grundøki, og tískil má eigarin hoyrast um ætlanina at staðseta eitt skiftingarhús her.
Mett verður tó, at kommunan eigur hevd í sambandi við nýtsluna av hesum økinum av tí at hetta hevur verið kommunalur farvegur í longri tíð.

Friðingarmynduleikar:
Av tí at byggjast skal lutfalsliga nær sjónum mugu viðkomandi friðingarmyndugleikar hoyrast, áðrenn verkætlanin kann fara av bakkastokki.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin vil undirstrika, at um hendan verkætlanin skal bera á mál eru møguleikarnir teir, at antin má søkjast um frávik frá ásetingunum í umsóknini um byggiloyvi. Ella má tilgongdin setast í verk at broyta galdandi byggisamtykt, ella at tillaga ásetingarnar fyri byggisamtyktina.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**
Skjal nr. *26/04905-2, Verkætlanarlýsing - Skiftingarhús í Nólsoy.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | x | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj sak | Upphædd |
| 6275 | LK62998 | Fríðkan, bygdir og økir | 6275 | L62052 | Fríðkan av bygdunum | Skiftingarhús í Nólsoy | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Kr. 300.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 - 2027 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kr. 50.000 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at:
Staðseta eitt skiftingarhús, sambært viðheftu tekningunum og kortum í skjali nr. *26/04905-2, Verkætlanarlýsing - Skiftingarhús í Nólsoy.*
- á matr. nr. 126a í Nólsoy.
- Hoyra viðkomandi náttúruverndar og friðingarmyndugleikar í málinum.
- kr. 300.000 verða játtaðar av kt. 6275, LK62998, Fríðkan bygdir og økir, á kt. 6275, L62052 Fríðkan av bygdum.
- Søkja um byggiloyvi, bjóða arbeiðið út og seta verkætlanina í verk.
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og til kunningar í staðbundnu

nevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2026:** Ein minniluti, Anja Weyhe og Heidi Lava Elgeirsdóttir, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina og til kunningar í staðbundnu nevndini.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Annfinn Brekkstein og Høgni Vilhelmsen, vilja hava tað til hoyringar í staðbundnu nevndini, áðrenn politisk støða verður tikin.

Heidi Lava Elgeirsdóttir krevur málið fyri býráðið til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, vilja hava tað til hoyringar í staðbundnu nevndini, áðrenn politisk støða verður tikin.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen,

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 808<br><br>Forkvinnunnar merki: |

## 212/26 Endurskoðan av ásetingum fyri E-neystaøki í almennu byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 139/26 | 25/01002-2 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 09.06.2026 | 11/26 | 25/01002-2 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 212/26 | 25/01002-2 |

**Upprunin til málið**
Seinastu árini hevur Tórshavnar kommuna móttikið fleiri umsóknir um at byggja og innrætta neyst kring Kollafjørð, sum eisini kunnu nýtast til frítíðarhús. Galdandi byggisamtykt fyri E-økir loyvir neystabygging, men gevur ikki loyvi at innrætta neystini til frítíðarhús.

Hetta málið er framhald av mál nr. *24/01759, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir í Kollafirði*, sum snýr seg um at gera uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt fyri neystabygging kring Kollafjørð og at vísa á økir, har tað framyvir skal bera til at partvíst innrætta neyst til frítíðarhús. Sí uppskot til serstaka byggisamtykt, skjal nr. *24/01759-9, Uppskot – Serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir.pdf.*

Málið hevur ligið til hoyringar í tíðarskeiðinum 7. november 2024 til 19. desember 2024. Tá ið hoyringsfreistin var farin hevði kommunan móttikið tvey mótmælir/broytingaruppskot. Sí *skjal nr. 25/01002-6, Hoyringarskriv til uppskot frá 2024 og viðmerkingar frá umsitingini*, sum bæði fevnir um móttiknu hoyringsskrivini, umframt viðgerð av teimum.

Eftir at umsitingin hevur gjøgnumgingið innkomnu hoyringsskrivini, gjørdist tað greitt, at tað helst er greiðari at endurskoða almennu ásetingarnar fyri økispartin E-neystaøkir í almennu byggisamtyktini í staðin fyri at gera uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt fyri neystabygging kring Kollafjørð.

**Lýsing av málinum**
Málið hevur tikið drúgva tíð vegna ymisk og mótstríðandi áhugamál í sambandi við bygging við sjóvarmálan til frítíðar- og neystavirksemi. Umsitingin mælir tí til at endurhugsa uppskotið, so málið ikki snýr seg um at víðka eina serstaka byggisamtykt fyri øll neystaøkini í Kollafirði, men heldur at gera eitt uppskot um broyting í almennu byggisamtyktini fyri E øki. Endamálið er at leggja viðkomandi økir í kommununi til neystaøkir, har møguleiki er fyri lutvísari innrættan til frítíðarvirksemi, og onnur økir, sum venda sær til meira siðbundið vinnu- og tænastuvirksemið, ið hevur við sjógvin at gera.

Verandi ásetingar fyri økispartin E-neystøkir í almennnu byggisamtyktini eru soljóðandi:

**§ 21. Ásetingar fyri umráðispart E í 3. grundumráði**

1 Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttavirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

2 Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Henda áseting er ikki galdandi fyri sundurbýti og samanlegging av matriklum, um øki er bygt og um broytingin ikki viðførir stórvegis broytingar fyri nýtsluna í økinum.

Natúrligt avmarkað øki í mun til lendi, skap, mørk (t.d. vegir) bygging, dámin í økinum o.a.

3 Loyvd skelting í hesum umráðisparti er sum víst á talvu niðanfyri og sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina skeltisreglugerð, góðkend av býráðnum 19 september 2024 mál nr. 22/02144

| | Tænastu-skelti | Lýsingar-skelti | Vinnu- og stovnsskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

Tað eru fleiri avbjóðingar við verandi ásetingum:

- Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt.
- Ikki er loyvt partvíst at innrætta neyst til frítíðarhús.
- Sjóvarmálin er ikki tryggjaður almenninginum.
- Einki verður skrivað um stødd, takhall, útsjónd og tilfar.
- Tað er eingin munur á vanligum neystum og øðrum virksemi, sum t.d. vinnuligum virksemi, sum hevur við sjógvin at gera.

Av tí at mett verður, at omanfyri nevndu avbjóðingar eiga at verða loystar meiri alment, so hevur umsitingin gjørt uppskot til tveir nýggjar umráðispartar:

- <u>Umráðispartur E1, Neysta- og frítíðarøki</u>, sum er lagt til neystabygging, sum lutvíst kann innrættast til frítíðarhús, og smábáta-, frítíðar og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera.
- <u>Umráðispartur E2, Neysta- og vinnuøki</u>, sum verður lagt til smábáta-, vinnu-, frítíðar- og ítróttavirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

Sí uppskot til ásetingar í skjal nr. *25/01002-5, Uppskot til broyting av ásetingum fyri E-neystøki*, og sí somuleiðis *skjal nr. 25/01002-5, Alm. Byggs – Broytingar á s. 26-28 og 33*, har ásetingarnar eru settar inn á síðu 26-28 í almennu byggisamtyktini.

Felags fyri báðar umráðispartar eru ásetingar viðv. skipan av øki, bygningsskapi og tilfarsvali.
Í báðum umráðispørtum kann býráðið víkja frá reglum við serligari heildarætlan, og er endamálið, at bygging í ávísum førum skal skipast, soleiðis at atlit verður tikið at serligum dámi, umhvørvi ella nýtslu. Í hesum sambandi kunnu frávik gerast, sum bæði víðka ella avmarka loyvda bygging í mun til galdandi ásetingar.

<u>Umráðispartur E1 – Neysta- og frítíðarøki:</u>
Í hesum umráðispartinum er áseting, sum nágreinar, at neyst kunnu lutvíst innrættast til frítíðarhús við teirri treyt, at møguleiki er at hava bát í niðastu hædd. Umráðisparturin verður sambært uppskotinum galdandi fyri E økini í Kollafirði, undantikið á Todnesi, og í ávísum førum við dagførdum mørkum.

Í uppskotinum verður E neystaøki á Todnesi broytt til 4. grundumráði, av tí at økið er heilt innan fyri 25 m byggilinju til landsvegin, og av tí at landsverk ikki fer at geva loyvi til ný- og umbygging til endamálið. Verandi neystavirksemið kann tó halda fram á hesum staði.

Fyri neystaøkið á Kjalnesi, sum lutvíst er innan fyri byggilinjuna hjá Landsverki, mælir umsitingin frá, at økið verður ment til lutvísa innrætting til frítíðarhús, grundað á stuttu frástøðuna til landsvegin, sum somuleiðis er í einum krøppum svingi. Ístaðin mælir umsitingin til, at økið verður broytt til E2 neystaøki, sum loyvir vanligum neystavirksemi, tó uttan møguleika fyri lutvísa innrætting til frítíðarhús.

<u>Umráðispartur E2 – Neysta- og vinnuøki:</u>
Í hesum umráðispartinum er áseting, sum útleggur økið til vinnu- og tænastuvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera.

Henda ásetingin verður galdandi á Kjalnesi og við bátahylin á Argjum, og endamálið er at menna og varðveita økið til bátavirksemi. Ásetingin loyvir, at byggjast kunnu egningarskúrar í byggisniði, sum lýst niðanfyri, umframt virksemi í vinnuflokking millum 1-4 *(sí vinnuflokking í Tórshavnar kommunu).*

Sí skjal nr. *25/01002-8, E-økir - Áðrenn og eftir broyting, uppskot mai 2026.*

At enda verður mælt til at broyta almennu byggisamtyktina í Kap. III § 3. Øki til bilstøðil, sum staðfestir at í 3. grundumráði skal í minsta lagi vera 2,5 pláss pr hús, harav 0,5 á felagsparkeringsøki. Broytingin snýr seg um at leggja afturat, at

*“Parkering fyri umráðispartarnar E1 og E2 verður gjørd sambært eini heildarmeting”.*

Grundgevingin er, at tað ikki verður mett hóskandi at krevja parkeringspláss til neyst, sum í fleiri førum vera bygd út í mark, og at parkering meira hóskandi eigur at vera skipað á frammanundan útbygdum vegakervið, t.d. við bátabrúgvar og almenn parkeringspláss. Á henda hátt verða bøur og fjøra eisini vard fyri óneyðugum inntrivi.

*Sí skjal nr. 25/01002-5, Alm. Byggs – Broytingar á s. 26-28 og 33,* har ásetingin er sett inn á síðu 33 í almennu byggisamtyktini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økini, sum uppskotið fevnir um, eru í umráðispartinum E í 3. grundumráði, har hesar ásetingar eru:

§ 21. Ásetingar fyri umráðispart E í 3. grundumráði

1 Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttavirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

2 Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Henda áseting er ikki galdandi fyri sundurbýti og samanlegging av matriklum, um øki er bygt og um broytingin ikki viðførir stórvegis broytingar fyri nýtsluna í økinum.

Natúrligt avmarkað øki í mun til lendi, skap, mørk (t.d. vegir) bygging, dámin í økinum o.a.

3 Loyvd skelting í hesum umráðisparti er sum víst á talvu niðanfyri og sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina skeltisreglugerð, góðkend av býráðnum 19 september 2024 mál nr. 22/02144

| | Tænastu-skelti | Lýsingar-skelti | Vinnu- og stovnsskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**Aðrar upplýsingar frá umsitingini**
Síðani 2022 hevur serstøk byggisamtykt verið galdandi fyri neystaøkið á matr. nr 208, 211c, 211a og 209b, Kollafjørður. Sí mál nr. *20/04637, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neyst, matr. nr. 208, Kollafjørður*. Í dag er hetta einasta neystaøkið í Kollafirði, har loyvt er partvíst at innrætta neyst til frítíðarbústað.

Í 2024 gjørdi umsitingin eitt uppskot, sum hevði til endamáls at víðka økið, ið serstaka byggisamtyktin fyri neystaøki í Kollafirði er galdandi fyri, soleiðis at onnur E-neysaøkir í Kollafirði somuleiðis vóru fevnd av somu serstøku byggisamtykt. Sí mál nr. *24/01759, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir í Kollafirði*.

E økið á Kjalnesi var upprunaliga undantikið, av tí at Landsverk mælir frá frítíðarvirksemi á hesum økinum, vegna stuttu frástøðuna frá landsvegnum, sí skjal nr*. 24/01759-2, Svar viðv. bygging av neystum innanfyri byggilinju.pdf*.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndina 8. apríl 2024 varð samtykt at leggja neystaøkið á Kjalnesi afturat.

So statt er tað, sum nú verður mælt til, ikki í samsvari við upprunaliga politiska samtyktina í mál nr. *24/01759, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir í Kollafirði*, og hinvegin í samsvari við tilmælið frá Landsverki, sum sambært §§ 6 og 7 í Landsvegalógini eru hoyringspartur, og sum kunnu sýta tílíkum virksemi á hesum staðnum í samb. við viðgerð av ítøkiligum byggiloyvum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Mál nr. 24/01759, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir í Kollafirði*
*Mál nr. 20/04637, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neyst, matr. nr. 208, Kollafjørður*

Harafturat eru onnur mál, sum hava við neyst og bygging í neystaøki at gera, og sum so ella so hava verið tikin við í viðgerðini:

- *Mál nr. 25/01095 Umsókn um byggiloyvi / serstaka byggisamtykt til neyst/frítíðarhús á matr. nr. 192a, í Líðini, Kollafirði - 22/05125*
- *Mál nr. 25/01087, Umsókn at broyta neystaøkið á Kjallnestanga á matr. nr. 42, 41, 37b, 29b og 31b, Kollafirði til frítíðarhúsøki - 23/0256.*
- *Mál nr. 26/00050, Umsóknin um at broyta byggisamtyktina frá 4. grundumráði til neystaøki, matr. nr. 192a, 199h og 185a, Kollafjørður*

- *Mál nr. 26/00930 Tórshavnar havn - øki til egningarskúrar við bátahylin á Argjum (23/06142)*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er umrøtt saman við Byggimálsdeildina, sum hevur gjørt viðmerkingar til ásetingarnar.

Málið verður sent staðbundnunevndini fyri Kollafjørð og friðingarmyndugleikunum til viðmerkingar.

**Skjøl**
*Skjal nr. 24/01759-9, Uppskot – Serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir.pdf*
*Skjal nr. 25/01002-6, Hoyringarskriv til uppskot frá 2024 og viðmerkingar frá umsitingini*
*Skjal nr. 25/01002-5, Uppskot til broyting av ásetingum fyri E-neystøki*
*Skjal nr. 25/01002-8, E-økir - Áðrenn og eftir broyting, uppskot mai 2026*
*Skjal nr. 25/01002-5, Alm. Byggs – Broytingar á s. 26-28 og 33*
*Skjal nr. 24-01759-2, Svar viðv. bygging av neystum innanfyri byggilinju.pdf*

**Staðbundnu nevndina:** ☒ Ja ☐ Nei

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At góðkenna uppskotið um broyting av almennu byggisamtyktini soleiðis at:
    - Umráðispartur E1 og E2 kemur ístaðin fyri verandi umráðispart E-neystaøki, sambært skjalinum *25/01002-5, Alm. byggs - Broytingar á s. 26-28 og 33.*
    - Umráðispartur E1 og E2 vera galdandi fyri neystaøkir sambært kortskjalinum *25/01002-8, E-økir - Áðrenn og eftir broyting, uppskot mai 2026.*
    - Áseting verður løgd afturat almennu byggisamtyktini, soleiðis at parkeringsnormurin fyri E1 og E2 verður gjørdur samb. heildarmeting, sambært skjalinum *25/01002-5, Alm. byggs - Broytingar á s. 26-28 og 33.*
- At beina málið í býráðið og til kunningar í staðbundnu nevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 09. juni 2026:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Anja Weyhe legði fram broytingaruppskot, ið er soljóðandi: Tikið verður undir við tilmælinum við tí broyting, at matr. nr. 212b, 203r og 199a somuleiðis verða fevndir av ásetingini E1 – Neystaøki, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Astrið Breckmann.

Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot, ið er soljóðandi: Tikið verður undir við tilmælinum við tí broyting, at matr. nr. 212b, 203r og 199a og neystini á Kjalnesi somuleiðis verða fevndir av ásetingini E1

– Neystaøki, ið varð samtykt við elluvu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála

Blankt atkvøddi: eingin.

## 213/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes - 22/04933

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 133/25 | 25/01098-6 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 227/25 | 25/01098-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 3/26 | 25/01098-6 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 10/26 | 25/01098-6 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 62/26 | 25/01098-6 |
| 6 Hvítanesnevndin | 11.06.2026 | 8/26 | 25/01098-6 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 213/26 | 25/01098-6 |

**Samanumtøka av málinum**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær gjørdust partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdardám og tílíkt.

Hetta málið er eitt framhald av málinum 22/04933, har byggisamtyktin fyri Hvítanes verður viðgjørd. Sí upprunamálslýsing í skjali nr. *25/01098-10, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes*.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum verður mælt til, at Hvítanes fær sína egnu almennu byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Hvítanes, eru hesi ymisku økini í bygdini:
A: Miðstaðarendamál
B: Sethúsabygging
E: Almenn endamál
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst
F: Neyst og bátapláss
Onnur endamál

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:
A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging

D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í upprunaliga málinum um Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes (22/04933) og síggjast í skjalinum *Hvítanes økisásetingar - áðrenn og eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot um nýggja byggisamtykt fyri Hvítanes varð samtykt í býráðnum 30. mai 2024 og fór til almenna hoyring millum 18. september og 30. oktober 2024. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið tvær viðmerkingar frá borgarum, umframt viðmerkingar frá náttúrufriðingarnevndini.

***Viðmerking 1 (sí Viðmerking til broyting í byggisamtykt fyri Hvítanes,msg)***
Grundstykkið 125b er sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum um endurskoðan, partvíst í sethúsaøki og partvíst í 4. grundumráði. Í skrivinum verður heitt á býráðið at rætta kortskjalið, soleiðis at matr. nr 125b verður heilur innan fyri sethúsaøki A.

***Viðmerking 2 (Mótmæli til broyting av byggiøkið á matr 98.docx)***
Mótmælt verður at broyta part av matr. nr 98, til byggilendi (sethúsaøki A). Í mótmælinum verður grundgivið ímóti hesi broyting út frá, at bygging á matr. nr 98 er innan fyri 100 m frá bakkatromini á fjøruni í Akkersvík, og krevur sambært § 2 stk. 2 nr. 1 í náttúrufriðingarlógini loyvi frá friðingarmyndugleika. Víst verður á, at villdunnur, æðupør og sjófuglur reiðrast í nærøkinum, og at økið verður nógv vitjað av ferðafólki.

Mælt verður tí heldur til at broyta matr. nr 98 og atliggjandi matr. nr 108a við Akkersvík til D1-Frílendi til tess at verja serstaka náttúruøkið.

***Viðmerkingar frá náttúrufriðingarnevndini (sí 5600-88130-00059-24 - Útskrift úr gerðabókini.pdf)***
Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu letur tað vera upp til Tórshavnar kommunu og góðkennandi myndugleika at økja um A1 øki fyri matr. nr. 125b, men ger vart við ásetingar í náttúrufriðingarlógini § 2 stk. 2 nr. 3 um, at ikki er loyvt innangarðs at byggja nærri enn 300 m at áum, sum eru meira enn 4 m breiðar í botninum. Á Hvítanesi er nærmasta sethúsabygging umleið 10 m frá ánni í gomlu bygdini. Við atliti til verandi bygging ásetur nevndin tí, at ikki kann byggjast nærri enn 10 m frá áum, sum eru minst 4 m breiðar á Hvítanesi.

Viðv. viðmerking 2 staðfestur náttúrufriðingarnevndin, at økið talan er um (matr. nr 98), er nærri enn 100 m frá fjøruni ella bakkanum við Akkersvík, á Kortal.fo mált til at vera frá áleið 40 m til umleið 60 m frá fjøruni. Nevndin kann ikki geva undantak ella loyva bygging á matr. nr. 98, vísandi til nevndu ásetingar í lógini.

Harafturat tekur náttúrufriðingarnevndin ikki undir við at broyta ásetingar fyri nýtt neystaøki, har loyvt er partvíst at innrætta frítíðarhús á matr nr 118 við mølina/Gjónna á Hvítanesi, fyrr enn ítøkiligar tekningar eru komnar nevndini í hendi. Grundgevingin er, at økið er nærri bakkatromini enn 100 m og fevnt av ásetingunum í § 2 stk. 2 nr. 1 í náttúrufriðingarlógini, og tí at nevndin ivast í, hvussu bygging á staðnum kemur at taka seg upp í landslagnum so nær sjóvarmálanum, tí um veturin kann tað vera sera stórur uppgangur av brimi inn yvir økið, har neystaøkið og øki til frítíðarhús ætlast at verða.

Náttúrufriðingarnevndin ynskir tískil at síggja tekningar og visualiseringar av ætlanini, áðrenn avgerð kann takast.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Umsitingin hevur viðgjørt viðmerkingarnar og mælir til, partvíst at ganga viðmerkingunum á møti, soleiðis at uppskotið um endurskoðan verður dagført sambært nýggja kortskjalinum *Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025.*

Í nýggja uppskotinum eru matr. nr 98 og matr. nr 108 varðveittir í 4. grundumráði, og ikki D1 øki, sum mælt varð til sambært Viðmerking 2. Orsøkin er, at verandi áseting (landbúnaðarøki) loyvir ikki bygging, og tænir harvið endamálinum um at verja serstaka dámin við og kring Akkersvík.

Neystaøkið varð í fyrra uppskotinum víðkað sambært markinum á matr. nr 118. Uppskotið var ikki grundað á ítøkiliga byggiætlan, men heldur ein staðfesting av verandi umstøðum, og er kommunan ikki til reiðar við ítøkiligari ætlan fyri, hvussu byggjast skal fram við leiðini oman á støðna/dráttin. Mælt verður tískil til at rætta markið við neystaøkið til upprunaliga/galdandi økið, og at D1 verður galdandi fyri part av matr. nr 118. Ásetingin fyri neystaøki (E) verður broytt sambært upprunaliga broytingaruppskotinum, og verður nýggja ásetingin, sum loyvir partvísa innrættan til frítíðarbústað galdandi fyri neystini, sum í dag standa á økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 22/04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes
- 20/04243 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar

**Skjøl**
Jr nr. 22/04933-5 - *Serstøk byggisamtykt fyri Hvítanes - áðrenn broyting*
Jr nr. 22/04933-3 - *Hvítanes - endurskoðað 11.01.24*
Jr nr. 22/04933-2 - *Hvítanes økisásetingar - áðrenn og eftir broyting*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – áðrenn broyting*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – eftir broyting, Uppskot til fyrru hoyring*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025*
Jr nr. 22/04933-9 - *Viðmerking til broyting í byggisamtykt fyri Hvítanes.msg*
Jr nr. 22/04933-10 - *Mótmæli til broyting av byggiøkið á matr 98.docx*
Jr nr. 22/04933-4 - *5600-88130-00059-24 - Útskrift úr gerðabókini.pdf*
Jr nr. 25/01098-10, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum, *25/01098-9 - Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025*, við hesum broytingum:
- Matr. nr 98 verður verandi í 4. grundumráði.

- A1 økið verður víðkað, soleiðis at tað fylgir matr. nr. 125b.
- Markið fyri neystaøkið E verður rættað, soleiðis at tað fylgir markinum fyri verandi neystaøki.

- og at beina málið í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið var til hoyring í tíðarskeiðnum 29. oktober til 10. desember 2025. 16. november 2025 móttók kommunan eina umsókn um broyting av byggisamtykt matr. nr 90a, sum snýr seg um at leggja 520 fermetrar í sunnara enda av matriklinum til sethúsaøki (sí *Umsókn um broyting - matr. nr. 90a á Hvítanesi (umsókn og kort)*.

Talan er um byggisamtyktarmál, ið er viðkomandi fyri endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, og verður umsóknin tískil viðgjørd sum partur av hesum málinum.

Grundgevingin fyri broytingin er, at onki byggiøki er eftir til sethús á Hvítanesi, síðani vegurin til Eysturoyartunnilin varð liðugur.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Í 2019 varð søkt um at broyta byggisamtykt til sethúsaøki á sama matrikli. Tá var søkt um, at 8000 $m^2$ skuldu broytast til bústaðarøki, samsvarandi eini útstykkingarætlan við pláss fyri 5 sethúsum, (sí mál 19/04302).
Málið varð viðgjørt í Hvítanesnevndini, og kom nevndin ikki til felags niðurstøðu. Ístaðin vísti Hvítanesnevndin á 3 møguleikar:

1) Nesið skal varðveitast sum tann náttúruperla, sum tað er.
2) Umsóknin skal gangast á møti
3) Byggisamtyktin fyri Hvítanes eigur at vera endurskoðað í síni heild, heldur enn sambært einstøkum umsóknum.

Í viðgerð av málinum frá 2019, vísti umsitingin á niðurstøðu frá aðrari umsókn frá 2017, har eigari av matr. nr. 99a og 99b (sunnan fyri gongurásina út á nesið) søkti um at broyta byggisamtyktina til F fríðtíðarøki. Ætlanin var at stykkja út og gera lágvaksin summarhús á økinum. Málið var til hoyringar í Náttúrufriðingarnevndini, Yvirfriðingarnevndini og Hvítanesnevndini.
Náttúrufriðingarnevndin var sinnað at geva undantaksloyvi. Yvirfriðingarnevndin gav tó ikki loyvi til broytingina. Grundgevingin var, at undantaksloyvi ikki kann gevast sambært § 2, stk. 5 í løgtingslóg um náttúrufriðing, av tí at eyðkenni í økinum hevði broytst, um loyvt varð at byggja.

Í 2020 mælti býarskipanardeildin frá at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr 90a, og er umsitingin framvegis av tí fatan, at nesið í mest møguligan mun eigur at verða varðveitt. Í mun til grundgeving um væntandi byggilendi á Hvítanesi, vísir umsitingin á, at møguleiki er at útstykkja til bústaðarendamál sambært galdandi byggisamtykt og sambært uppskotinum um endurskoðan, eitt nú á umleið 4500 $m^2$ byggilendinum á matr. 132a, og fram við Gerðisvegi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/04302 Umsókn um broyting í ásetingunum fyri byggisamtyktina á matr. nr. 90a, Hvítanes
25/10203 Umsókn um broyting í ásetingunum fyri byggisamtyktina á matr. nr. 90a, Hvítanes

**Nýggj skjøl**
Jr nr. 25/10203-1 - *Umsókn um broyting - matr. nr. 90a á Hvítanesi (umsókn og kort)*

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til ikki at ganga umsóknini á møti, og at halda fast í uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, sambært uppskotinum *25/01098-9 – Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025.* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Nevndin ynskir at ganga umsóknini á møti.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Málið beint aftur í nevnd.

**Ískoyti**
Málið varð beint aftur í nevnd soleiðis at umsóknin (*Umsókn um broyting - matr. nr. 90a á Hvítanesi (umsókn og kort))* kann gangast á møti, og sethúsaøkið sunnast á matr. nr 90a, við nesi á Hvítanesi, verður galdandi fyri 520 $m^2$.

Umsitingin metir tó framvegis, at hetta øki eigur at varðveitast óbygd, vegna høga náttúruvirðið á nesinum. Harafturat rúmar seinasta uppskotið um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes fleiri møguligum framtíðar útstykkingum, sum kunnu nøkta ein hóskandi vøkstur á Hvítanes komandi árini. Sambært uppskotinum eru omanfyri 9000 $m^2$ av óbygdum A øki í bygdini, sum rúmar uml. 10 sethúsum, og tá er planeraða økið á matr.nr. 83a, ikki íroknað.

Mett verður, at verandi uppskot, sí skjal nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025,* nøktar ein framtíðartørv á økjum til sethús á Hvítanes, og tá talan ikki er um heildarplanlegging og einans nøktar tørvin hjá einum privatum borgara, so verður ikki mett ráðiligt at broyta byggisamtyktina samsvarandi ynskinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at halda fast í uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, sambært uppskotinum *25/01098-9 – Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025.* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum og beina málið til hoyringar í staðbundnu nevndini og síðani í býráðið.

Birgir Nielsen og Kári Johansen taka støðu á seinni fundi.

**Hvítanesnevndin 11. juni 2026:** Staðbundna nevndin ynskir at nesið verður varðveitt. Vísast kann til, at nevndin áður hevur mælt til, at økið skal verða náttúru- og frítíðarøki við gøtum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 214/26 Nýggj serstøk byggisamtykt Á Rætt, Kollafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 136/26 | 26/03880-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 214/26 | 26/03880-1 |

**Upprunin til málið**
Vegurin Á Rætt leiðir til 12 grundstykkir og umleið 33 parkeringsbásar. Planeraðu grunstykkini eru millum 160-185 $m^2$ og vóru sundurbýtt í 2017. Vegurin og planeringin eru umleið 10 ár eldri. Hetta málið snýr seg um at gera serstaka byggisamtykt fyri økið, soleiðis at byggjast kunnu íbúðir á økinum sum er lagt til A1 sethúsabygging. Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa øki, soleiðis at vegurin Á Rætt í framtíðini kann leingjast og pláss verður fyri fleiri raðhúsalíknandi bygningsrondum, til íbúðarbygging við hóskandi frástøðu frá landsvegnum umframt atgongd til at fríøkir.

**Lýsing av málinum**
Vegurin á Rætt snarar norðureftir, og niðanfyri vegin er eitt økið omanfyri 2000$m^2$ útstykkjað og planerað til møguliga raðhúsabygningsrond. Í uppskotinum um serstaka byggisamtykt verður økið skipað í 4 byggiøkir, soleiðis at tað umframt økið, sum í dag er planerað, eisini verður møguleiki at leingja vegin suður- og norðureftir, so at íbúðarbygging kann staðsetast á matr. nr. 175a og 171a. Vegurin fer tá at ganga tvørtur um D1 frílendi, sum sambært uppskotinum framhaldandi skal standa óbygd og leggjast av sum frílendi. (sí *Serstøk byggisamtykt fyri Á Rætt, Kollafjørður, uppskot mai 2026*)

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri umráðispart A1 í 3. grundumráði:

1. Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
   Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur
   sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.

4. Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.

6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.

7. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

8. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

9. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.

10. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$.

12. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9.

Ásetingar fyri umráðispart D1:

1. Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.

2. Bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í samskifti við landsverk (sí mál 25/10959) verður greitt frá týdninginum, at íbúðarbygging verður hildin uttanfyri 25 m byggilinju frá landsvegnum, og er byggiøkið tillagað sambært hesum kravi.

Umsitingin mælir til at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at markið fyri A1 økið fylgir serstøku byggisamtyktini, og til hetta krevst at partur av 4. grundumráði verður broyttur til A1, umframt at D1 økið verður víðkað, sí *Almena byggisamtyktin - Áðrenn broyting, uppskot mai 2026* og *Almena byggisamtyktin - Eftir broyting, uppskot mai 2026*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
*26/03880-2 Serstøk byggisamtykt fyri Á Rætt, Kollafjørður, uppskot mai 2026*
*26/03880-6 Almenna byggisamtyktin - Áðrenn broyting, uppskot mai 2026*
*26/03880-6 Almenna byggisamtyktin - Eftir broyting, uppskot mai 2026*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við uppskotinum um nýggja serstaka byggisamtykt fyri á Rætt, Kollafjørð, og at broyta almennu byggisamtyktina sambært skjalinum *Almenna byggisamtyktin - Eftir broyting, uppskot mai 2026*, og at málið verður beint í býráðið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 821 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 215/26 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.01.2026 | 27/26 | 25/08554-7 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 13/26 | 25/08554-7 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 138/26 | 25/08554-7 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 158/26 | 25/08554-7 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 215/26 | 25/08554-7 |

**Upprunin til málið**
Tá ið fyrrverandi eigari av matr. nr. 1233a og 1233b heitti á kommununa, at gera serstaka byggisamtykt fyri umrøddu matriklar, vísti kommunan á, at alt óbygda økið (matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b) millum Skotarók og Oyggjarvegin eigur at verða skipað í síni heild, og at dámurin so vítt møguligt skal hóska til útstykkingina, Skotarók, sunnan fyri økið, sum er skipað við sethúsabygging.

Av tí at eigarar av øllum matriklunum í økinum ikki samdust um eina felags loysn, varð stig tikið til fundir við eigararnar á sumri 2023, og gjørdi umsitingin eitt boð uppá eina skipan av økinum. Serstaka byggisamtyktin millum Skotarók og Oyggjarvegin kom í gildi 28. apríl 2025. Sambært serstøku byggisamtyktini kunnu í mesta lagi 60 íbúðir byggjast, og verður økið við einum nýggjum bústaðarvegi sundurbýtt í tvey byggiøkir, har byggjast kann upp í 2 hæddir niðanfyri vegin og upp í 3 hæddir omanfyri vegin (sí *Serstøk byggisamtykt millum Skotarok og Oyggajrvegin við átekning*).

Í vár móttók kommunan uppskot um ítøkiliga heildarætlan fyri allar matriklarnar millum Skotarók og Oyggjarvegin, umframt eina ítøkiliga umsókn um íbúðarverkætlan á matr. nr 1233a og b. Heildarætlanin fyri økið sýnir eina góða skipan av øllum økinum, har byggingin tekur atlit til byggingina sunnan fyri økið, samstundis, sum økið verður optimerað við fleiri íbúðareindum. Sí partar av heildarætlanini í skjal nr. *25/08554-13 – 26.01.15_Heildarætlan - Við oyggjarvegin.*

Uppskotið fyri matr. nr 1233a og b lýsir eina bústaðarverkætlan við 30 bústaðareindum, og er hugsað út frá eini møguligari framtíðar skipan av ferðsluni, við rundkoyring við Vestara Ringveg og Oyggjarvegin, sum verður knýtt í nýggja bústaðarvegin til íbúðarbyggingina á matr. nr 1233a og b.

Samlað verður mett, at nýggja innlatnað heildarætlanin fyri alt økið gevur góða meining í mun til at gagnnýta lendið innan fyri verandi bý. Av tí at henda samlaða heildaræltanin sýnir fleiri bústaðareindir, umframt at byggingin í pørtum av økinum fer upp í 4 hæddir, so snýr hetta málið seg um at broyta byggisamtyktina, soleiðis at skipanin av økinum verður optimerað og harvið gevur býnum best gagn.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur síðani apríl havt leypandi fundir við umsøkjarar, umframt at arbeitt hevur verið við eini dagførdari býarskipan fyri kommununa, sum tekur atlit til bygging av fleiri bústøðum, samstundis sum fyrilit verða havd fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði. (sí mál *Býarskipan 2025*). Uppskotið frá umsøkjara lýsir fyrst og fremst bygging á norðastu matriklunum (matr. nr 1233a og 1233b), men er samstundis gjørt við eini heildarætlan fyri, hvussu tað óbygda økið kann mennast í framtíðini, sí skjal *25/08554-13, 26.01.15_Heildarætlan - Við oyggjarvegin.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b liggja í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har tað m.a. er ásett:

- Byggistigið má ikki fara upp um 0,3 og nýtslustigið 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir.

- Hús mugu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Somuleiðis er *Serstøk byggisamtykt millum Skotarok og Oyggajrvegin við átekning* galdandi fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at tilfarið frá ráðgevum lýsir eina skynsama lendisnýtslu og dámliga skipan av økinum. Umframt nøktandi fríøki og felagshentleikar stendur skapið og hæddin á bygningum ikki í andstøðu til sethúsaøkið sunnan fyri. Verkætlanin kann byggjast í fleiri stigum, men í hesum sambandinum verður tað mett neyðugt at strika orðing, sum nágreinar, hvussu nógvar íbúðareindir kunnu byggjast tilsamans. Mett verður, at tað ikki er neyðugt at áseta ítøkiliga íbúðartalið 60, og at ásetingin kann gera samlaðu bygningina fløkjasliga at menna, og kann avmarka eina smidligari menning av íbúðarnýtslu í framtíðini.

Framtíðar ferðsluloysnin, sum lýst í tilfarinum frá ráðgevum, er áhugaverd og eisini møguliga tann rætta. Í máli nr. *25/10810*, *Íbinding frá útstykkingarætlan við Oyggjarvegin á matr. nr. 55-1233a,* er samtykt, at umsitingin skal arbeiða víðari við málinum um staðseting av rundkoyring á Vestara Ringvegi og møguligari alternativari loysn. So statt er verandi atkoma til økið, soleiðis sum verandi serstaka byggisamtykt lýsir.

Umsitingin metir tað vera týdningarmikið, at íbúðarbygging á matr. nr. 1233a ikki forðar hesi ferðsluloysnini í framtíðini, og verður byggiøki A í fylgiskjal 2 tískil flutt samsvarandi eini møguligari framtíðar rundkoyring í økinum. Sí skjal *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 13.01.26.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *J.nr. 25/04377 - Býarskipan 2025*
- *J.nr. 25/01093 - Heildarætlan fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b - 22/07222*
- *J.nr. 25/10810 - Íbinding frá útstykkingarætlan við Oyggjarvegin á matr. nr. 55-1233a*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- J.nr. 25/01093-5 - *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin við átekning*
- J.nr. 25/01093-12 - *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 13.01.26*
- J.nr. 25/01093-12 – *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin - markeraðar broytingar.*
- J.nr. 25/08554-13 – *26.01.15_Heildarætlan - Við oyggjarvegin*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Skotarók og Oyggjarvegin sambært *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 13.01.26, har m.a.:*

- Markið fyri nøgd av búðeindum verður strikað
- Snið á íbúðarbygging verður nágreinað sambært tilfari frá ráðgevum
- Atlit verður tikið til møguliga framtíðar ferðsluloysn við rundkoyring

Og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

Birgir Nielsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Atkvøddu blankt: Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekstein

Birgir Nielsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Uppskotið, *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 13.01.26,* lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 6. februar til 20. mars 2026. Tá ið freistin at viðmerkja var farin, hevði kommunan móttikið fýra hoyringarskriv, sí skjal nr. *25/08554-23, Viðmerkingar, mars 2026*. Niðanfyri er ein samanumtøka av viðmerkingunum og svar frá umsitingini.

**<u>Hoyringskriv 1 (borgari)</u>**
Borgari mótmælir at byggja á økinum, av tí at útsýnið til vakra klettalandslagið oman fyri Oyggjarvegin skal varðveitast. Høg íbúðarbygging forðar útsýninum, og mett verður, at byggingin er óneyðug, av tí at lendið ikki skal takast til nýggja bygging, so leingi fleiri íbúðir standa í gerð, umframt at hús standa tóm í býnum.

*<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>*
Økið, ið serstaka byggisamtyktin fevnir um, er lagt av sum byggilendi, meðan klettalandslagið oman fyri Oyggjarvegin sambært galdandi byggisamtykt er í 4. grundumráði, og ikki byggilendi. Harvið verður klettalandslagið sambært uppskotinum varðveitt. Um bygt verður fult út sambært uppskotinum um serstaka byggisamtykt, fara húsini frá ávísum støðum í býnum, at forða útsýninum til og frá klettalandslagnum, men metir umsitingin ikki, at talan er um útsýnis- ella miðingarlinju, ið er orsøk til at friða økið umkring. Hinvegin metir umsitingin, at tað framhaldandi er tørvur á nýggjum búeindum, og at hendan ætlanin kann gerast liður í at avmarka ella fyribyrgja bústaðarneyð í kommununi.

**<u>Hoyringskriv 2 (eigari av matr. 1378)</u>**
Eigari av matr. nr. 1378 mótmælir, at broytingin verður framd uttan at hava verið skrivliga eftirspurdur. Somuleiðis verður kravt innlit í málini:

25/04377 – Býarskipan 2025
25/01093 – Heildarætlan fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b – 22/07222
25/10810 – Íbinding frá útstykkingarætlan við Oyggjarvegin á matr. nr. 55-1233a
Og í skjalið Part av heildarætlanini skjal nr. 25/08554-13-26.01.15 Heildarætlan við Oyggjarvegin

Eigarin krevur eisini rætt til endurgjald í sambandi við broyting av serstøku byggisamtyktini.

Mótmælt verður eisini, at rundkoyring verður gjørd í økinum. Eigarin skrivar, at rundkoyringin frá Oyggjarvegnum er óneyðug, tí nýggja rundkoyringin vestan fyri Hotel Føroyar loysir ferðsluforðingar í økinum. Hinvegin fer nýggja rundkoyringin at forða ferðsluni við norðara og vestara ringveg serstakliga, tá kavi og frostveður er.

At enda verður víst til, at pumpustøð, sum pumpar vatn úr byrgingini í Havnardali liggur undir ringvegnum móti matr.nr 1233a.

<u>*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*</u>
Tað er rætt, at umsitingin ikki sendi málið beinleiðis til hoyring, og er hetta av misgáum. Eigari hevur fingið innlit í umbidnu skjølini, og verður uppskotið framyvir sent eigara til hoyring.

Viðvíkjandi endurgjaldskravinum verður byggisamtyktarbroytingin ikki mett at vera orsøk til tess, m.a. tí at serstaka byggisamtyktin loyvir fleiri búeindum, og er talan meira sannlíkt um eina virðisøking.

Viðv. møguligari rundkoyring, so er endalig støða ikki tikin til hetta í núverandi støðu. Serstaka byggisamtyktin leggur bara upp til, at eitt øki verður lagt av, har tað ikki kann byggjast, soleiðis at møguleikin at knýta í Ringvegin við rundkoyring kann fremjast í framtíðini. Arbeitt verður við at gera eitt nøktandi ferðslumodell fyri allan býin, sum skal hjálpa til við at taka endaliga avgerð um hvussu ferðslan verður avgreidd í framtíðini, eisini hvussu íbindingar skulu gerast, t.d. á hesum vegastrekkinum.

Viðv. pumpustøðini, so er at siga, at økið liggur og hevur ligið sum byggiøkið í fleiri ár, harumframt er annað byggiøkið kring hetta økið, sum eisini er knýtt í kommunalu vatnveitingina. Kommunan hevur ábyrgd av at veita vatn til ognina.

<u>**Hoyringsskriv 3 (advokatur umboðandi fyrrverandi eigara av matr. nr. 1233a og b og eigara av grundøki omanfyri Oyggjarvegin, matr. nr. 1233c og 1233d og 1233l.**</u>
Fyrrverandi eigarar av matr. nr 1233a og b hava verið í eini tilgongd at selja ognina og verið í samskifti við kommununa, har tey hava spurt inn til møguleika at byggja í 4 hæddum. Tey fingu í hesum sambandi svarið niðanfyri frá býararkitekturinum, eftir fund 12. Juni 2023:

*"kommunan er ikki sinnað, at broyta byggisamtyktina fyrr enn ein samlað ætlan fyriliggur fyri alt økið, eisini matr. nr 1378, hettar merkir, at eigararnir fyri matr. nr. 1233a/b, 1378 og 1235a, saman koma við eini heildarætlan fyri allar matriklarnar, soleiðis at ein samlað serstøk byggisamtykt kann gerast fyri alt økð."*

Víst verður á, at heildarætlanin bert umboðar nýggju eigarar av matr. 1233a og sostatt er ikki ein heildarloysn, sum allir eigarar taka undir við.

Um byggisamtyktin nú verður broytt, í stríð við tað, sum kommunan hevur boðað fyrrverandi eigarunum av. matr. nr. 1233a frá, kann væntast, at eitt endurgjaldskrav kann verða sett fram móti kommununi, tí um fyrrverandi eigarar vistu, at byggsamtyktin kundi verða broytt, so at byggjast kundi í fýra hæddum, er onki at ivast í, at tey høvdu fingið meira fyri ognina.

At enda verður vegna eigara av matr. nr. 1233c og 1233d og 1233l, mótmælt, at byggisamtyktin verður broytt til tess at loyva hægri bygging, av tí at hetta tekur útsýnið og viðførir eina virðisminking fyri ognirnar omanfyri. Tí verður heitt á kommununa, sum kompensatión, at taka hesar ognir við í byggisamtyktarbroytingina, soleiðis at ein møgulig bygging omanfyri Oyggjarvegin somuleiðis sleppur munandi hægri upp.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
Umsiting ásannar, at tað er óheppið at broyta eina serstaka byggisamtykt, so stutt eftir at verandi serstaka byggisamtykt kom í gildi, 28. apríl 2025. Til fundin 12. juni. 2023, sum sipað verður til í mótmælinum, varð sagt, at eigarar sjálvir kundu gera eina heildarætlan. Kommunan móttók onga slíka og gjørdi tí eina einfalda heildarætlan fyri økið. Nýggi eigarin fyri matr.nr. 1233c og b hevur framleitt meira nágreinandi heildarætlan, ið umsitingin metir vera betri enn ta galdandi.

Umsitingin metir somuleiðis, at ein partvís øking í hæddarásetingum kann fremjast á ein hátt, sum hóskar til kringliggjandi økið, og at uppskotið umboðar eina meira skynsama lendisnýtslu uttan eina øking í byggi- og nýtslustignum, í mun til galdandi byggisamtykt.

Viðv. endurgjaldskravinum, verður ikki mett, at henda broytingin í byggisamtyktini er orsøk til endurgjald til fyrrverandi eigarar. Býarskipanarlógin áleggur kommunum sum býarskipanarmyndugleiki at skipa býin. Fyrra uppskot til serstaka byggisamtykt varð gjørt út frá eini einfaldari heildarætlan fyri økið, og tá kommunan hevur fingið eina meiri nágreiniliga heildarætlan, sum í størri mun tekur atlit til grannalagið, uttan samstundis at økja um byggi- og nýtslustigi, verður mett ráðiligt at tillaga serstøku byggisamtyktina fyri økið. Hetta er partur av uppgávuni, sum áliggur kommununi sambært Býarskipanarlógini.

Í dag er økið omanfyri Oyggjarvegin 4. grundumráði (landbúnaður), og verður økið sambært kommunuætlanini, fyribils ikki raðfest sum býarvakstrarøki. Umsitingin metir ikki, at økta hæddin á eini møguligari bygging yvir av matr. nr. 1233c 1233d og 1233l viðførir eina virðisminking á hesar ognirnar, og kommunan brúkar ikki býarskipanina til kompensatión. Byggisamtyktir og býarskipanir eru amboð at menna býin til tær framtíðarætlanir, sum verða politiskt raðfestar.

Harumframt metir umsitingin tað vera óheppið, um fleiri ognir verða knýttar at hesum vegastrekkinum, uttan at hetta verður gjørt sum ein heildarplanlegging. Og til seinast, verður Oyggjarvegurin mettur at verða býarmarkið móti vestri/norði.

**Hoyringskriv 3 (grannar á Skotarók)**
Grannar á Skotarók (15 undirskriftir) krevja, at TK ger nøktandi árinskanning og ferðslukanning av núverandi ferðslu og letur gera eina ferðsluframskriving, sum kann verða brúkt sum grundarlag, tá komandi ferðsluviðurskifti skulu planleggjast. Uttan eina tílíka kunnu hvørki kommuna, grannar ella byggiharri vita, hvørjar avleiðingar uppskotið fer at hava, og hvørjar ferðsluloysnir vera galdandi fyri grannarnar.

Harumframt verður verður mótmælt at skipa gjøgnumkoyrandi ferðslu millum Skotarók og økið, sum byggisamtyktin verður galdandi fyri. Høvuðsgrundgevingarnar eru:
- at Skotarók upprunaliga ikki er gjørd til gjøgnumgangandi ferðslu.
- at Skotarók í dag er ein friðarligur smalur blindvegur.
- at ongi felags parkeringspláss eru á gøtuni, og tískil verður parkerað á gongubreyt og úti á vegnum, tá ið grannar hava størri tiltøk so sum føðingardagar osv.
- at fleiri barnafamiljur búgva á gøtuni, har smábørn eru von at ferðast trygt við sera lítilari ferðslu í dag.
- at ein ætlað gjøgnumgangandi ferðsla vil økja munandi um ferðsluna á Skotarók, sum fer at gera trygdina munandi verri - bæði fyri børn og onnur á gøtuni.

Í skrivinum vanta grannarnir tveir møguleikar:
- Møguleiki 1. At bilaferðsla ikki sleppur frá nýggja íbúðarøkinum og til skotarók og harvið verður ferðslan óbroytt.
- Møguleiki 2. At skotarók verður gjørdur til ein blindveg við sunnara enda, soleiðis at ferðslan til og frá Skotarók verður leidd umvegis nýggja ferðsluloysn við eini møguligari rundkoyring við Vestraringveg / Oyggjarvegin.

Mótmælt verður eisini at loyva bygging upp í 15,5 m, av tí at hetta fer alt ov vítt í mun til almennu byggisamtyktina. Spurt verður, hví grannar ikki eisini sleppa upp í somu hædd. Nærmastu grannar ynskja at vera partshoyrdir, og biðið verður um fund við avvarðandi ábyrgdarpersónar í TK skjótast gjørligt, so møguleiki er at greiða nærri frá og umrøða møguleikar til loysnir.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
15. apríl vóru íbúgvar í Skotarók á fundi við borgarstjóra, tekniska stjóra og umboð frá teknisku deild og greiddu frá teirra sjónarmiði. Sum víst hevur verið á, finnast fleiri møguligar ferðsluloysnir, ið sannlíkt umboða ymsar fyrimunir, vansar og kostnaðir.

Fyri grannar í Skotarók er ítøkiliga ferðsluloysnin viðkomandi, tá ið nýggjur vegur millum Oyggjarvegin/Vestara Ringveg verður knýttur saman við Skotarók, og eru grundgevingarnar í mótmælinum, sum frámæla meira ferðslu viðkomandi í hesum sambandinum.
Umsitingin leggur dent á, at fyribils er ongin ítøkilig ætlan fyri at knýta Skotarók við eini rundkoyring í Vestara Ringvegin, tó so at uppskotið um heildarætlan varðveitir møguleikan fyri hesum.

Umsitingin er samd í, at tá Skotarók í dag er blindur vegur, so vil ein íbinding gera, at fleiri bilar frá Skotarók fara at koyra umvegis hetta strekkið, og tað verður meiri ferðsla í økinum. Umsitingin væntar tó, at íbúgvar við Skotarók fara at ynskja íbindingina, tá hon verður møgulig, og tí sýnir skipanin í serstøku byggisamtyktini ein veg, sum verður knýttur í Skotarók. Hetta merkir tó ikki, at vegirnir verða bundnir saman, og kunnu ferðsluforðingar gerast, soleiðis at einki koyrandi samband verður á hesum strekkinum.

Ein ferðslukanning hevði sannlíkt givið eina betri fatan av fyrimunum og vansum við ymsum ferðsluloysnum, men umsitingin metir tað ikki vera ráðiligt at gera eina tílíka, áðrenn eitt yvirskipað ferðslumodell er tøkt. Arbeiðið er í gongd við at dagføra ferðslumodellið, umframt at finna ítøkiligu íbindingarloysnina til útstykkingina fyri norðasta partin av heildarætlanini, sí mál nr. *25/10810, Íbinding frá útstykkingarætlan við Oyggjarvegin á matr. nr. 55-1233a*. Umsitingin mælir tískil frá at gera eina ferðslukanning fyrr enn eitt ítøkiligt ferðslumodell er tøkt.

Tá endalig støða verður tikin til, hvussu ferðslan skal verða, og um nýggja útstykkingin skal knýtast í Skotarók, tá skal støða somuleiðis verða tikin til, um grannar skulu partshoyrast eftir fyrisitingarlógini.

Í mun til øktu hæddina verður víst á grundgevingar omanfyri, og at talan er um hædd til mønu við fallandi takhalli. Mest loyvda hædd á framsíðum, ið venda norður/suður, t.e. við markinum til Skotarók, er ásett 10 m omanfyri vegin og 7 m niðanfyri vegin. Talan er um eina øking í mun til A1 øki, men er endamálið at skapa ein býling, sum í hædd tekur atlit til grannalagið, og samstundis gagnnýta lendið til fulnar. Umsitingin mælir til at halda fast við ásettu hæddarásetingarnar.

Tá spurt verður, hví grannar á Skotarók ikki eisini sleppa at byggja hægri, so verður víst til, at økið liggur í A1 ásetingunum og í eini skipaðari sethúsaútstykking. Umsitingin ásannar, at um økið varð planlagt í dag, so hevði tað ikki verið ósannlíkt, at loyvt hægri bygging. Økið er planlagt til eina sethúsaútstykking, og tískil hevði tað ikki verið upplagt at broytt ásetingarnar í núverandi støðu, ella í hvussu er, eigur støða at takast til hetta í serskildum máli, sum kannar og viðger avleiðingarnar av eini tílíkari broyting.

Nærmastu grannar skulu sambært fyrisitingarlógini hoyrast, tá ið byggimál fyriliggur í grannalagnum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkir, at uppskotið krevur 2 $m^2$ av felagshentleikum per íbúð, og vísir á, at vanligt er at krevja 4 fermetrar per íbúð. Hetta verður tí broytt í nýggjum uppskoti.

Í samskifti við eigara av matr. nr. 1233a og b verður staðfest at byggistigið av misgáum er lækkað úr 0,3, sum er vanligt í A3 økjum til, til 0,25. Hóast byggiverkætlanin megnar at vera innan fyri hetta markið, so mælir umsitingin til at hækka byggistigið aftur til 0,30, soleiðis at tað svarar til onnur A3 økir í kommununi.

**Nýggj skjøl**

Skjal nr. *25/08554-23, Viðmerkingar, mars 2026*
Skjal nr. 25/01093-27 *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 19.05.26*

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**
*25/10810, Íbinding frá útstykkingarætlan við Oyggjarvegin á matr. nr. 55-1233a*

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Skotarók og Oyggjarvegin sambært *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 19.05.26, har:*

- Felaghølið fyri hvørja íbúð hækkar úr 2 $m^2$ til 4 $m^2$.
- Byggistigið verður økt úr 0,25 til 0,30

Og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Málið útsett.

**Ískoyti**
Á seinasta fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini varð ynski sett fram um at nágreina viðurskiftini viðv. vegaíbindingini millum nýggja vegin í komandi útstykking og Skotarók.

Á fundi 05.06.2026 umrøddi umsitingin ynskið frá byggi- og býarskipanarnevndini, um at fáa málið lýst nærri, í mun til ferðsluviðurskiftini og mótmælini í samband við møguliga íbinding millum Skotarók og nýggjan veg til útstykkingina, sambært serstøku byggisamtyktini.

Annað viðkomandi mál varð umrøtt. Sí mál *16/03844, Útstykking á matriklunum 1235a og 1235b, Tórshavn*, har eigari av matr. nr. 1235a, beint norðanfyri Skotarók, í 2016 søkti um útstykkingarloyvi til 5 grundstykkir. Ætlanin var tá at binda í Skotarók, og kundi Landsverk ikki góðkenna útstykkingarætlanina fyrr enn Tórshavnar kommuna hevði gjørt eina nýggja góðkenda og varandi íbinding til Hjaltarók/Skotarók, sum eisini fevnir um út og tilkoyring til matr. nr. 1235a.
Íbindingin millum Oyggjarvegin og Skotarók hevur ongantíð verið ætlað at vera endalig. Landsverk hevur ikki mett íbindingina nóg trygga, og legði í ummæli til mál nr. *16/03844, Útstykking á matriklunum 1235a og 1235b, Tórshavn* sostatt krav til Tórshavnar kommunu um at tryggja nøktandi og varandi vegatkomu til Skotarók/Hjaltarók.

Eftir umrøðu í umsitingini, so er niðurstøðan framvegis, at vegalinjan til traðirnar á matr. nr. 1233a og 1378 og 1235a skal bindast í Skotarók, eins og galdandi serstaka byggisamtykt staðfestir.
Henda niðurstøða er grundað á, at:

- Býarskipanarliga vildi hetta til eina og hvørja tíð verið besta fakliga tilmæli, eisini vísandi til, at verandi íbinding millum Oyggjarvegin og Skotarók/Hjaltarók tekniskt ikki er besta loysn í mun til sýnið o.a.
- Tað er ikki byggisamtyktin, sum nágreinar hvussu ítøkiligu ferðsluviðurskiftini verða avgreidd við eitt nú bummi, skelting, ferðsluforðing osfr. Tí verður mælt frá, at staðfesta ítøkiliga ferðsluloysn í serstaku byggisamtyktini, bæði tí hetta kann forða smidligari og neyðugari viðger av málinum í framtíðini, og tí at hetta ikki er praksis í øðrum serstøkum byggisamtyktum.
- Tað verður mett skilagott við eini vegaskipan ella forðing, ið tálmar ferðslu til og frá Skotarók, men av tí at tað er ivasamt nær nýggjur vegur verður bundin í Skotarók, er tað somuleiðis ivasamt hvørji gerandisligu ferðsluviðurskiftini eru tá.
- Tað finnast fleiri dømir kring allan býin um vegir, ið hava fingið ymisk sløg av ferðsluforðingum og í ymiskum tíðarskeiðum hava verið skipaðir við einvegis ferðslu. Hetta kann eisini gerast galdandi fyri hesa íbindingina.
- Tað verður mett, at íbinding kann gagna Skotarók, t.d. í mun til kavarudding og koyring í kavaveðri.

Til seinast er at viðmerkja, at mælt verður til, at ítøkilig ferðsluloysn verður viðgjørd í ítøkiligu útstykkingarmálunum, sum fara at verða viðgjørd í framtíðini. Útstykkingarmál, sum knýta í eina verandi útstykking verða altíð send grannum til hoyringar og verða altíð viðgjørd av Byggi- og býarskipanarnevndini.

| | Blað nr.: 829 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Forkvinnunnar merki: |

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**
*16/03844, Útstykking á matriklunum 1235a og 1235b, Tórshavn*

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Skotarók og Oyggjarvegin sambært *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 19.05.26, har:*

- Høvuðsvegurin, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, framhaldandi verður knýttur í Skotarók, eins og verandi serstaka byggisamtykt ásetur,
- Felagholið fyri hvørja íbúð hækkar úr 2 $m^2$ til 4 $m^2$.
- Byggistigið verður økt úr 0,25 til 0,30

Og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2026:** Ein minniluti, Anja Weyhe og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Annfinn Brekkstein og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Bergur Robert Dam Jensen.

Elsa Berg legði fram broytingaruppskot, at tikið verður undir við tilmælinum, men at Høvuðsvegurin í fyrsta punkti í tilmælinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, verður tikið úr serstøku byggisamtyktini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Kári Johansen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Bergur Robert Dam Jensen.

# 216/26 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1354a og 1354b – A2 og A3 øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 137/26 | 26/03846-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 216/26 | 26/03846-1 |

**Upprunin til málið**
Í 2023 varð almenna byggisamtyktin ovast og omanfyri við Villingadalsvegin broytt frá A2 (blandaða bústaða- og miðstaðabygging) til A2 (Høg bústaðarbygging) í samband við ætlanir um íbúðarbygging. Síðani 2025 hevur serstøk byggisamtykt verið galdandi fyri matr. nr. 1357, 1356, 1355 og 1354a og 1354b, ið hevur til endamáls at skipa økið í 3 økir í 2, 4 og 5 hæddum (sí, *Áteknað. Serstøk byggisamtykt fyri Villingadalsvegin).*

Sambært galdandi ætlan verður lægri íbúðarbygging skipað á matr. nr. 1354b, ið er næst sethúsaøkinum í Javnagøtu, men til tess at fremja hesa ætlan er neyðugt at ummatriklera markið millum privata matr. nr. 1354a og kommunala matr nr. 1354b. Av tí at matriklarnir 1354a og b í dag eru neyvt innanfyri hvør sína byggisamtyktaráseting (ávikavist A3 og A2), vil eitt møguligt makaskifti merkja at matriklarnir liggja í tveimum ymsum byggisamtyktum, og hevur matrikkulstovan áður ikki góðtikið tílíka ummatrikulering.

Á býráðsfundi 19. mars 2026 varð samtykt at almenna byggisamtyktin verður broytt sambært ætlaða makaskiftinum.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur móttikið tilfar, sum lýsir ætlaðu markaumskipanina, og fyriheldur hendan seg til serstøku byggisamtyktina. Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini, sí kortskjølini. Hesi lýsa dagførda markið millum A2 og A3 økið bæði við og uttan matriklar, soleiðis at umráðisparturin A2 verður galdandi fyri matr. nr. 1354a og sostatt fyri alt økið, har serstaka byggisamtyktin er galdandi. Hetta fer at loyva markaumskipanina, og sostatt ætlaðu íbúðarbyggingina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Skipan av økinum er nágreinað í serstakari byggisamtykt, sum deilir matrikkul 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b í trý økir. Í serstøku byggisamtyktini er m.a. ásett fyri øki A, at byggjast kann í 2 hæddum, umframt nýttum lofti. Øki B kann byggjast í 4 hæddum, umframt nýttum lofti, og øki C kann byggjast í 5 hæddum, umframt nýttum lofti.

Ásetingarnar fyri A2 eru:

1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.
   Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2. Virkini skulu flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu
3. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Henda áseting er ikki galdandi fyri sundurbýti og samanlegging av matriklum, um øki er bygt og um broytingin ikki viðførir stórvegis broytingar fyri nýtsluna í økinum.
4. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.
5. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.
6. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 831 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

Ásetingarnar fyri A3 eru:

1. Umráðisparturin verður lagdur til blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
2. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
3. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
4. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
5. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkrað øki. Henda áseting er ikki galdandi fyri sundurbýti og samanlegging av matriklum, um øki er bygt og um broytingin ikki viðførir stórvegis broytingar fyri nýtsluna í økinum.
6. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
7. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd.
8. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
9. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
10. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 m til hægsta punkt við útvegg.
11. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
12. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 4, 6, 7, 8, 9 og 10, og fyriskipað, at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju.

### Upplýsingar frá umsitingini

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- J.nr. 25/02294 - Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn
- J.nr. 26/00420 - Umsókn um marknaumskipan av matr. nr. 1354a og 1354b, Tórshavn

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

### Skjøl

- J.nr. 26/03846-2 - *Áðrenn broyting – uttan matriklar*
- J.nr. 26/03846-2 - *Eftir broyting – uttan matriklar*
- J.nr. 26/03846-2 - *Áðrenn broyting – við matriklum*
- J.nr. 26/03846-2 - *Eftir broyting – við matriklum*
- J.nr. 25/02294-17 - *Áteknað. Serstøk byggisamtykt fyri Villingadalsvegin*

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 832<br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við uppskotinum at broyta markið millum A2 og A3 økið í almennu byggisamtyktini sambært skjalinum *Eftir broyting – við matriklum,* og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen,.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 217/26 Broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 199f, Kollafjørður í samb. við atgongd til heita keldu. Frá D1 til A1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 1/26 | 25/09481-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 67/26 | 25/09481-2 |
| 3 Kollafjarðarnevndin | 09.06.2026 | 6/26 | 25/09481-2 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 217/26 | 25/09481-2 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 08.09.2026 | 12/26 | 25/09481-2 |

**Upprunin til málið**
Á matr. nr. 199f í Kollafirði er jarðhitahol, har sera nógv heitt vatn rennur úr. Ognin er privat ogn, og um kommunan skal fáa atgongd til heita vatnið, hevur eigarin av ognini sett sum treyt, at byggisamtyktin fyri økið skal broytast. Byggisamtyktin fyri ognina er D1 – fríøki, og eigarin ynskir at byggisamtyktin verður broytt til A1 – sethúsaøki.

**Lýsing av málinum**
Bústaðarøkini í Kollafirði eru skipað við økjum við bygging, atskild av fríøkjum. Hesin strukturin sæst best í bústaðarøkjunum í Líðini og Norðuri í Sundum, sí øki markerað við reyðum í skjalinum *Grønur strukturur*. Endamálið er at varðveita grannaløgini og bygdaidentitetin. Aðaltátturin við skipanini av hesum økjunum sæst heilt aftur til 1987, og stendur soleiðis skrivað í býarskipanini fyri Kollafjarðar kommunu frá 1987: "Ætlanin er at útbyggja bústaðaøkini í avmarkaðum eindum sundurskild av grønum opnum fríøki. Hugsanin er her at skapa: Heildarmynd yvir byggingina, møguleika fyri betur at stýra útbyggingini og at fremja grannalagskensluna.", sí skjal *Býarskipan Kollafjørður 1987 og Galdandi býarskipan 1978-1990.* Á kortinum sæst, at bygging er staðsett innan fyri øki, ið eru løgd sum fríøki, og tískil verður tað ikki mett sum, at ein feilur er hendur, og fríøki er lagt oman yvir øki við sethúsum, men heldur eitt tilætlað val, tí ynskið er at varðveita ein ávísan dám og bygdaidentitet.

Umsitingin hevur áður viðgjørt umsóknir um broyting av byggisamtykt í hesum, og líknandi økjum í Kollafirði, sí mál *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð,* har tað varð viðgjørt í sambandi við viðgerð av viðmerkingum til endurskoðanina, og mál *Umsókn um serloyvi til broyting av byggisamtyktini fyri stykkið á matr. nr. 25, Kollafirði,* sum somueliðis er ogn við ástandandi sethúsum í einum líkandi øki Norðuri í Sundum í Kollafirði. Í hesum málum hevur umsitingin lýst viðurskiftini omanfyri og mælt til ikki at broyta byggisamtyktina, av tí at ynskt verður at varðveita og virða yvirskipaða strukturin í bústaðarøkjunum í Kollafirði og aðaltáttin í gomlu býarskipanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.
- Bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað at D1 øki er lagt oman á verandi sethús, leggur nakrar óhepnar bindingar á ognina, men fremur tann ynskta býarskipanarliga strukturin, ið er við til at varðveita bygdadámin í Kollafirði.

Um sethús liggja í D1 øki, verður tað loyvt teimum at viðlíkhalda húsini og gera neyðugar ábøtur, men loyvt verður ikki at vaksa um rúmdina á húsunum.

Vísandi til undirskrivaðu brúksavtaluna, sí skjal nr. *25/00209-11, 199f – Undirskrivað brúksavtala*, er tað óheppið, at býarskipanin skal broytast, samstundis sum partarnir til eina og hvørja tíð kunnu uppsiga tíðarskeiðið fyri brúksavtaluni.

Við at broyta býarskipanina økist virðið á privatu ognini, verandi býarskipan verður ikki vird, og við skilagóðari grundgeving kann brúksavtalan uppsigast til eina og hvørja tíð. Hetta hevur við sær, at býarskipanin verður brúkt sum semingsamboð, og virðið á býarskipanini verður við tílíkum avtalum niðurraðfest.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Umsókn um serloyvi til broyting av byggisamtyktini fyri stykkið á matr. nr. 25, Kollafirði,* journal 19/02131.
- *Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar,* journal nr. 21/04609 (25/00209).
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð,* journal nr. 22/00463.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
<u>Viðmerking frá Umhvørvisdeildini:</u>
Umhvørvisdeildin metir, at broytingar í byggisamtyktum frá D1 til A1 eru óhepnar og eiga sum meginregla ikki at verða framdar, hetta fyri at tryggja, at grønir geirar og fríøki verða varðveitt og vard.
Málið um heitu kelduna í Kollafirði (21/04609 og 25/00209) snýr seg í høvuðsheitinum um at eitt borihol, sum kommunan hevur goldið fyri, er borað á privatari grund av óvart. Fyri at kommunan skal fáa atkomu til boriholið, soleiðis at heita vatnið kann gagnnýtast til hita í kommunalu bygningunum við Sjógv, hava eigararnir av matr. nr. 199f sett sum treyt, at byggisamtyktin fyri matrikkulin verður broytt. Ein brúksavtala er tí undirskrivað (25/00209-11) millum kommununa og matrikkul-eigararnar, ið fellur burtur um broyting av byggisamtykt fyri matr. nr 199f og 200, Kollafjørður, ikki verður samtykt.
Verður byggisamtyktin ikki broytt, má støða takast til, hvussu víðari skal farast fram í málinum um heitu kelduna í Kollafirði.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**

- *Býarskipan Kollafjørður 1987,* journal nr. 25/09481-3.
- *Galdandi býarskipan 1978-1990,* journal nr. 25/09481-4.
- *Grønur strukturur,* journal nr. 25/09481-6.
- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting*, journal nr. 25/09481-5.
- *199f – Undirskrivað brúksavtala,* journal nr. 25/00209-11.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 199f, Kollafjørður, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Útsett.

**Ískoyti:**

Viðmerking frá Umhvørvisdeildini:
Um byggisamtyktin ikki verður broytt, er ein møgulig loysn at tetta og avtaka (plug and abandon) verandi hol á matr. nr. 199f, og síðan bora eitt nýtt hol við síðurnar av, á kommunalum øki. Ein slík loysn verður mett at kosta umleið 150.000 kr. Hendan loysn tryggjar, at atgongd og rakstur kunnu skipast á kommunalari ogn, uttan at neyðugt er at gera broytingar í byggisamtyktini.

Sundurgreining:

Metti samlaði kostnaðurin á umleið 150.000 kr. fyri at tetta og avtaka verandi borihol, umframt at bora eitt nýtt hol, byggir á hesa fyribils kostnaðarmeting:

- Ikki undir 30.000 kr. fyri at tetta (plugga) verandi hol sambært galdandi krøvum
- Uml. 20.000 kr. fyri at avtaka útgerð og handa lendið aftur í sama standi sum áður
- Uml. 50.000 kr. fyri at bora eitt nýtt hol
- Uml. 25.000 kr. til tilfar og arbeiði at tryggja og verja nýggja holið, so tað er trygt og atkomuligt
- Uml. 25.000 kr. sett av til óvæntaðar útreiðslur

Sostatt er hædd er tikin fyri bæði beinleiðis arbeiðskostnaði og eini rímiligari trygd fyri óvæntaðum útreiðslum.

Sjálv verkætlanin verður viðgjørd í mál 25/00209 – *Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar*, og verður tað viðgjørt í Náttúru- og umhvørvisnevndini í næstum.

Viðmerkingar frá Býarskipanardeildini:
Eins og áður víst á, so verður verandi býarskipan ikki vird við at broyta býarskipanina, og økist virðið á privatu ognini eisini, um býarskipanin verður broytt. Harumframt er at vísa á, at við skilagóðari grundgeving kann brúksavtalan uppsigast til eina og hvørja tíð. Hetta hevur við sær, at býarskipanin verður brúkt sum semingsamboð, og virðið á býarskipanini verður við tílíkum avtalum niðurraðfest.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at sýta umbønini um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 199f, Kollafjørður, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen og Kári Johansen taka støðu á seinni fundi.

**Kollafjarðarnevndin 09. juni 2026:** Staðbundna nevndin vil hava at byggisamtyktin verður broytt eins og eigararnar ynskja tað.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 836 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 837<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 218/26 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 333, 331 og 330, Tróndargøta 36 og 40, City Church, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 66/26 | 25/09667-8 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 135/26 | 25/09667-8 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 218/26 | 25/09667-8 |

**Upprunin til málið**
Umsókn er komin frá eigaranum av matr. nr. 333 og 331, City Church, Tórshavn, um at broyta byggisamtyktina fyri ognirnar, soleiðis at meir bygging kann loyvast á ognunum.

**Lýsing av málinum**
Síðani bygningurin hjá City Church, matr. nr. 331, fór í eldskaða í februar 2024, hava tey húsast í lándum hølum í býnum. Ynskið er at byggja nýggjan bygning til virksemið á somu ognum. Víst verður á, at ynskið er at byggja bygning til sjálvt virksemið hjá City Churh, umframt at bygningurin verður eitt býarhús, ið kann nýtast til annað virksemi, konsertir, almenn tiltøk og City Meal, sum er eitt tiltak City Church skipar fyri einaferð um vikuna, har familjur og fólk annars kunnu fáa eina ókeypis máltíð.

Matr. nr. 333 og 331 liggja í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Bygningurin, ið var har áðrenn eldsbrunan, var stórri í vavi, enn ásetingarnar fyri økið loyva. Í sambandi við at byggjast skal nýtt, er ynskið hjá umsøkjara at byggja ein nýmótans bygning, ið kann rúma ætlaða virkseminum, og er ynskið helst at sleppa at byggja eitt sindur meir, enn bygt varð áðrenn - og í øllum førum at fáa loyvi at sleppa at byggja líka nógv upp aftur, sum tað varð áðrenn. Tískil søkir umsøkjari um at broyta byggisamtyktina, ella gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 2. Grundumráði eru m.a.:

- Stk. 1. 2. Grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging.
- Stk. 2. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
- Stk. 3. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,7. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 2 vísir.
- Stk. 4. Hús við vanligar mønureising skulu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Stk. 5. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 10 m til hægsta punkt við útvegg.
- Stk. 7. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í sambandi við ynskið umsøkjarans um at byggja nýggjan bygning á ognunum, hevur samskiftið verður aftur og fram millum partarnar, fundir hava verið hildnir, og onkrar tekningar eru sendar kommununi. Í skrivi sent til umsøkjara 23. desember 2025 hevur umsitingin lýst, hvat umsitingin metir kann byggjast í økinum. Sí skjal *Viðmerkingar til umsókn 23.12.25.* Á fundi 27. januar 2026 staðfesti umsøkjari, at tey mettu seg kunna rúmast innan tey mørkini, umsitingin hevði lýst.

Ein fortreyt fyri metiningini er, hvussu ein nýggjur bygningur hevði ávirkað ljósviðurskiftini í Grasagarði, umframt hvussu bygningurin hóskar inn í nærumhvørvið. Fyri at meta um hetta, hevur umsitingin gjørt nakrar 3d kanningar ið vísa, hvussu høg byggingin kann vera, uttan at hon skuggar inn í Grasagarð – fortreytin er, at nýggi bygningurin ikki skal skugga meir enn 10 m inn í Grasagarð tá sólin stendur hægst á várjavndøgri. Ein onnur fortreyt fyri mest loyvdu hædd er, at byggingin ikki fer upp um mønuna á

skiparahúsunum á matr. nr. 333, hetta soleiðis at byggingin í vavi hóskar til byggingina í nærøkinum. Sí diagram, sum lýsir hæddarviðurskifti á skjalinum *City Church mest loyvdu mát diagram_v.*

Niðanfyri er talva, ið lýsir úrslitið av kanningunum. Bygningurin á matr. nr. 333 er í tveimum – eini gomul stoypt skiparahús, ið verða mett at verða elstu stoyptu húsini í Tórshavn, og eiga at verða varðveitt, og ein nýggjari part, ið kann takast niður og gerast partur av nýggju byggingini. Talvan viðv. matr. nr. 333 lýsir byggingina fyri tann nýggjara partin.

| Matr. nr. 331 | Bygging áðrenn eldsbruna | Loyvt smb. almennu byggisamtyktini | Nýggj mett loyvd bygging |
|---|---|---|---|
| Byggistig | Uml. 0,8 | 0,5 | 0,9 |
| Nýtslustig | Uml. 2,1 | 0,9 | 2,7 |
| Hædd | Uml. 2,5 hæddir | 8 m til útvegg/10 m til mønu | 12 m mált frá planering á matr. nr. 330 |

| Matr. nr. 333 | Bygging áðrenn eldsbruna | Loyvt smb. almennu byggisamtyktini | Nýggj mett loyvd bygging |
|---|---|---|---|
| Byggistig | Uml. 0,5 | 0,5 | 0,65 |
| Nýtslustig | Uml. 1,2 | 0,95 | 1,95 |
| Hædd | Uml. 2,5 hæddir | 8 m til útvegg/10 m til mønu | 12 m mált frá planering á matr. nr. 330 |

Í skrivinum eru harumframt nakrar byggilistarligar meginreglur lýstar, m.a.:

- Býarmenningarinntriv skulu verða gjørd almannagagnlig og við virðing og skili.
- Bygningurin skal fyrihalda seg til, at hann er ein hornabygningur og hevur týdning fyri miðingar- og gongulinjur.
- Hjúklast skal um framsíðurnar, við serligum atliti at teimum mest "almennu" framsíðunum (suður, eystur og vestur). Hetta kann t.d. vera við tilfari, smálutum og væl umhugsaðum dimensjónum.
- Veghæddin eigur at kennast opin, løtt og innbjóðandi.
- Sjónlig brot skulu vera í framsíðuni, við t.d. forskjótingum og innvikum.
- Byggilinjan fram við Niels Winthers gøtu og Tróndargøtu skal haldast.

Um byggingin, sum er lýst omanfyri skal kunna loyvast, má serstøk byggisamtykt gerast fyri økið. Umsitingin metir tað verða mest skynsamt, um serstaka byggisamtyktin fyri Kommunuskúlan (Finsen) verður víðka til somuleiðis at fevna um økið við marki móti Tórsgøtu, Niels Winthers gøtu, Tróndargøtu og Kongagøtu. Hesi bæði økini – økið við Finsen og økið við Grasagarði eru skipaði á ein hátt, ið er eitt sindur karré kendur, við opnum fríøkjum í miðjuni, og tættari bygging við markið av økinum. Hesum eigur serstaka byggisamtyktin at stuðla undir, og eru ætlaninar hjá City Church í trá við hetta. Soleiðis ber m.a. eisini til at áseta í byggisamtykt, at byggjast ikki skal í Grasagarði, og til ber at gera varðveitandi ásetingar fyri t.d. Tilhaldið og Móttøkuhúsið.

Um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri hetta økið er somuleiðis neyðugt at gera greiningar av hinum bygningunum í økinum og samráðast skal við hinar privatu eigararnar av ognum í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Viðmerkingar til umsókn 23.12.25,* journal nr. 25/09667-6.

- *City Church mest loyvdu mát diagram_v,* journal nr. 25/09667-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður málið og tekur støðu til, um uppskot at víðka serstøku byggisamtyktina fyri Finsen skal gerast, so sum lýst omanfyri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur undir við, at uppskot at víðka serstøku byggisamtyktina fyri Finsen skal gerast, so sum lýst omanfyri.

Annita á Fríðriksmørk tekur ikki undir við, at uppskot at víðka serstøku byggisamtyktina fyri Finsen skal gerast, so sum lýst omanfyri.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið við Finsen og Grasagarð í samsvari við meginreglurnar lýstar omanfyri, sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Finsen og Grasagarð.* Talan er um eina serstaka byggisamtykt, ið lutvíst varðveitir tey varðveitingarverdu virðini í økinum og gevur rúm fyri nýggjari bygging, har tørvur og møguleikar eru fyri tí.

Í stuttum kann sigast, at uppskotið býtir økið í trý:

1. Øki A, ið er tann størsti parturin av økinum, og í høvuðsheitum fevnir um garðarnar, ið skulu varðveitast óbygdir, umframt teir varðveitingarverdu bygningarnar í økinum, ið somuleiðis skulu varðveitast sum teir eru.
2. Øki B, ið fevnir um part av Miðstovninum. Ásetingarnar fyri hetta økið eru við støði í bygninginum, sum stendur har í dag, men í mun til ásetingarnar fyri øki A, so loyva ásetingarnar, at broytingar/nýggj bygging kann gerast, ístaðin fyri tað, ið er.
3. Øki C, ið fevnir um matr. nr. 331 og part av matr. nr. 333, sum eru ognir hjá City Church. Ásetingarnar fyri hetta økið eru gjørdar við støði í meginreglunum nevndar omanfyri, sum m.a. rúma einum hóskandi bygningi til virksemið hjá City Church, umframt at tryggjað verður, at bygningurin ikki skuggar ov nógv inn í spæliplássið í Grasagarði.

Ein serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Kommunuskúlan í 2016, sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Kommunuskúlan*, og er henda framvegis galdandi. Í sambandi við at uppskot til serstaka byggisamtykt er gjørt fyri Finsen og Grasagarð, verður samstundis mælt til, at serstaka byggisamtyktin fyri Kommunuskúlan verður avtikin.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Orðingarnar í serstøku byggisamtyktini eru umrøddar við Byggimálsdeildina.

Byggimálsdeildin hevur hesa yvirskipaðu viðmerkingina:
*Byggimálsdeildin ger vart við, at tess fleiri serstakar byggisamtyktir verða gjørdar við hvør sínum ser-reglum fyri bygging, tess torgreiddari verður rættarsøðan fyri borgaran, vinnulívið og fyri almennar myndugleikar at umsita. Ein støðugt vaksandi mongd av ser-reglum hevur sum heild eina dýrkandi ávirkan fyri byggiverkætlanir, eins og tað sum heild økir um útreiðslir til og málsviðgerðartíð í kommunalu umsitingini.*

Tekniska deild hevur ongar viðmerkingar til uppskotið til serstøku byggisamtyktina.

**Skjøl:**

- *Serstøk byggisamtykt fyri Finsen og Grasagarð, mai 2026,* journal nr. 25/09667 – 18
- *Serstøk byggisamtykt fyri Kommunuskúlan,* journal nr. 25/09667- 15.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Finsen og Grasagarð sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Finsen og Grasagarð, mai 2026,* avtaka galdandi serstøku byggisamtyktina fyri Kommunuskúlan, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 219/26 Nýggj serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 35/26 | 25/10305-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 61/26 | 25/10305-5 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 84/26 | 25/10305-5 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 140/26 | 25/10305-5 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 219/26 | 25/10305-5 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av ognunum 1094c og 1094d undir Gráasteini, Tórshavn, ynskir at skipa økið við íbúðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Ynskið er at skipa økið við uml. 38-40 íbúðum, sum eru 70-75 $m^2$ og 120-140 $m^2$ til víddar. Byggingin er í trimum hæddum og verður skipað sum tríggjar lonir kring eitt opið felagsøki í miðjuni. Parkering er skipað í kantinum av ognini, og atkoman verður frá vegnum undir Gráasteini. Sí uppskot til støðumynd á viðhefta skjali *Tekning nr. 1 - Støðumynd.* Ein skitsa av hugsaða dáminum á bygginini sæst á skjalinum *Tekning nr. 4 - Íbúðarbygging við grannalag.* Hesar tekningar eru tó ikki endaligar, og kunnu tískil ikki metast sum bindandi fyri verkætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt til útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9. (Hæddarásetingar)

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at farast kann undir at gera uppskot til serstaka byggisamtykt í samsvari við umsókn umsøkjarans.

Tørvur er á fleiri bústøðum í høvuðsstaðnum, og tí er umráðandi at verandi byggilendi verður gagnýtt á mest skynsaman hátt. Økið er nær bústaðardeplinum í Marknagili, umframt at tað liggur nær vinarásini, og er hetta somuleiðis ein orsøk til, at tað verður mett skynsamt at innrætta økið við íbúðum.

Økið liggur við eitt stórt vegamót og liggur á markinum millum sethúsabygging, raðhúsabygging, íbúðarbygging, miðstaðarbygging og vinnubygging, og hevur økið sostatt ikki ein einstakan dám, ið byggingin skal fyrihalda seg til. Tó, so verður yvirskipað mett um íbúðarbygging, at hetta eigur at gerast soleiðis, at byggingin fær ein føroyskan dám, við t.d. innvikum í framsíðunum, mønutekju o.ø. Júst hvørji krøv verða sett í serstøku byggisamtyktina, verður mett um seinni í tilgongdini.

Byggingin verður í mun til byggi- og nýtslustig tað sama, sum fyri A1 øki annars, men til ber at gagnýta lendi meira skynsamt við at loyva bygging í 3 hæddum og, at økið verður skipað til íbúðir, ístaðin fyri at útstykkja til t.d. sethús, umframt at fleiri eindir verða, tá økið verður skipað við íbúðum.

| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 842<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Um tikið verður undir við at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, verður málið viðgjørt saman við øðrum viðkomandi deildum í teknisku fyrisiting.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- *Tekning nr. 1 – Støðumynd,* journal nr. 25/10305-4.
- *Tekning nr. 4 – Íbúðarbygging við grannalag,* journal nr. 25/10305-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður málið og tekur støðu til, um uppskot til serstaka byggisamtyktið, ið m.a. loyvir íbúðarbygging á matr. 1094c og 1094d, verður gjørt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Við støði í meginleistunum lýstir omanfyri, er uppskot til serstaka byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d, gjørt, sí skjal *Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d*.

Uppskotið er gjørt í samstarvi við Teknisku deild og Byggimálsdeildina.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Transformarastøð liggur við síðunar av matr. nr. 1094c og 1094d, og uppskotið til serstaka byggisamtykt verður sent SEV til viðmerkingar.

**Skjøl:**
- *Serstøk byggysamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d,* journal nr. 25/10305-14.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt undir Gráasteini, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð

samtykt við tólv atkvøðum fyri, ein atkvøða ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein..

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson,

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina, sum var frá 7. apríl 2026 til 19. mai 2026, kom ein viðmerking frá einum íbúgva undir Gráasteini, sí skjal *Viðmerking 1.*

Í viðmerkingini verður víst á trý ymisk viðurskifti, ið eiga at verða havd í huga, tá økið verður skipað.

1. Víst verður á, at rættiliga stórur hæddarmunur er á stykkinum, og biðið verður um, at stykkið verður grivið niður frá ovasta vestasta horni, soleiðis at stykkið verður minst 4-5 metrar lækkað frá vestasta horni. Hetta fyri at byggingin ikki kemur alt ov langt upp, umframt at tað hóskar best inn í landslagi.
2. Biðið verður um, at innkoyringin til økið verður frá Marknagilsvegnum ístaðinfyri frá vegnum Undir Gráasteini og Kirkjubøarvegnum. Víst verður á, at at hendan leið Undir Gráasteini er at meta sum ein partur av gongustrekkinum út til Norðasta Horn, og fer at ávirka hesi.
3. Heitt verður á kommununa um at gera gongubreytir Undir Gráasteini – antin báðu megin við, ella á einari síðu.

Ad. 1. Planering er vanliga ikki partur av serstøkum byggisamtyktum, men partur av byggimálsviðgerðini. Byggimálsdeildin verður kunnað um hesa viðmerkingina, men tað er byggimálsviðgerðin, sum ásetur planeringskotu, og verður hetta gjørt í mun til verandi lendi, vegir og bygging í nærumhvørvinum.

Ad. 2. Sambært teknisku deild ber ikki til at knýta í Marknagilsvegin. Marknagilsvegurin skal vera tað man kallar “facaduleysur”, tvs. so fáar íbindingar sum møguligt, hetta tí ferðslan er ovurstór. Frammanundan eru tvær íbindingar í Marknagilsvegin beint við økið, sum byggjast skal á, Landavegurin og vegurin út á Norðasta Horn. Um ein triðja íbinding verður gjørd her, verður ferðslukaos, og tað er ikki ráðiligt.

Ad. 3. Sambært býarverkfrøðinginum eru í løtuni ongar ætlanir um at gera gongubreytir Undir Gráasteini.

**Skjøl:**

- *Viðmerking 1,* journal nr. 25/10305-20.

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at halda fast við verandi uppskoti til serstaka byggisamtykt undir Gráasteini og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson,

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 844<br>Forkvinnunnar merki: |

# 220/26 Íbúðarbygging á matr. nr. 859e, 869b, 858ab og 860a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 34/26 | 25/10368-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 159/26 | 25/10368-5 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 220/26 | 25/10368-5 |

**Upprunin til málið**
Umsókn er send kommununi um loyvi at fremja íbúðarverkætlan á ognini, sum áður var Restorff's bryggjarí, sí skjal *Restorff Skitsuuppskot 2025*.

**Lýsing av málinum**
Ynskið er at byggja tvær lonir í 2-3 hæddum, umframt mønu. Ímillum lonirnar er ynskið at byggja eitt yvirdekkað útirúm, sum bindir báðar lonirnar saman. Umleið 24 íbúðir eru í verkætlanini og hava hesar 7 ymisk snið og støddir, frá 28 $m^2$ til 125 $m^2$.

Byggi- og nýtslustigið í ynsktu verkætlanini er 0,5 og 1,44. Byggistigið er minni, enn tað var áðrenn niðurtøkuna av bygningunum á ognini.
Umsøkjari roknar ikki ætlaða yvirdekkaða útirúmið við í byggi- og nýtslustigið, men roknireglur viðv. byggi- og nýtslustigi áseta, at hetta skal teljast við. Sostatt gerst veruliga byggi- og nýtslustigið nakað hægri enn upplýst omanfyri.

Umsøkjari grundgevur fyri týdninginum av útirúminum við at vísa á sosiala týdningin av hesum, at útiøkið gerst meira brúkiligt, umframt at passivi hitin kann gera orkunýtsluna í íbúðunum minni.

Verkætlanin nøktar ikki tørvin, hvat viðvíkur krøvum til parkeringspláss, men víst verður á ymiskar almennar parkeringsmøguleikar í nærøkinum, umframt at grundgivið verður fyri, at talan er um øki, ið er nær miðbýnum og nær góðari almennari ferðslu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
- Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina høgri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9. [Byggistig og nýtslustig]

**Upplýsingar frá umsitingini**
Býarskipanarliga verður tað mett vera skynsamt at byggja íbúðir í økinum.

<u>Yvirskipað:</u>
Tørvur er á fleiri bústøðum í høvuðsstaðnum, og býartættan er eitt av bestu amboðunum at fáa fleiri bústaðir í bygda umhvørvið. Økið liggur minni enn 500 m frá miðbýnum, í einum øki við blandaðari bygging – raðhúsabygging, sethúsabygging og stovnsbygging. Talan er harumframt um eina ogn, sum

frammanundan varð ábygd við stórum fabriksbygningum, og tískil verður tað ikki mett at broyta stórvegis uppá dámin í økinum, um bygningar, sum eru líkir í vavi, verða bygdir upp aftur.

Byggisamtykt:
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini, sum er øki lagt til stakhúsabygging. Í serstakari byggisamtykt ber til at loyva íbúðum, sum eru hægri enn annars ásett í A1 øki, men ásetingar viðv. byggistigi og nýtslustigi eru tær somu sum í A1 økjum annars.

Sambært galdandi reglum í almennu byggisamtyktini ber ikki til at loyva hægri byggi- og nýtslustigi enn 0,3 og 0,7 í A1 øki – ei heldur, um serstøk byggisamtykt verður gjørd. Um byggingin, sum umsøkjari ynskir, skal kunna loyvast, má loysn finnast á hesum, antin við einum fráviki, grundað á at byggingin í vavi er at meta við byggingina, sum var har frammanundan, ella við at ásetingarnar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini verða broyttar.

Um samtykt verður at arbeiða víðari við at gera serstaka byggisamtykt, verður tað mett ráðiligt at serstaka byggisamtyktin fevnir um eitt størri øki, millum Jóanesar Paturssonar gøtu, Fríðirks Petersens gøtu og Landavegin, sí kort *Møguligt byggisamtykarøki.* Hetta tí at møguleikarnir fyri at fremja skynsama býarskipan verða mettir at verða størri, tá byggisamtyktarøkið hevur eina ávísa støðd. Soleiðis hevði m.a. somuleiðis verið høvið at gjørt ásetingar fyri raðhúsabyggingina fram við Jóanesar Paturssonar gøtu, sum verður mett at verða varðvetingarverdug.

Parkering:
Verkætlanin nøktar ikki tørvin á parkeringsplássum eftir galdandi normum. Tó, so hevur í fleiri umførum verið umrøtt, um tað ikki eigur at bera til at minka um normin í tílíkum førum, tá talan er um bygging nær miðbýnum, og við stuttari frástøðu til almenna ferðslu. Hetta fyri at tryggja fleiri bústaðir í bygdum øki og eina burðardygga býarmenning, ið tekur atlit til fleiri flutningshættir enn bert bilin. Um samtykt verður at arbeiða víðari við at gera uppskot til serstaka byggisamtykt, má støða takast til hetta.

Sambært gladandi reglum í Bygningskunngerðini 2017, § 2.4.2, stk. 2, so eru víddin á parkeringsøkjum ásett av kommunala byggimyndugleikanum, og verður víst á vegleiðandi normar, t.d. í minsta lagi 1,0 pláss pr. 75 $m^2$ íbúð á felags parkeringsplássi. Kommunan kann sostatt gera metingar í hvørjum ítøkiliga máli. Um víkjast skal frá vegleiðingini, er neyðugt, at kommunan við reglugerð ella broyting av almennu byggisamtyktini, ger nýggjar reglur fyri parkering í sambandi við íbúðarbygging.

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

-

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Um tikið verður undir við at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, verður málið viðgjørt saman við øðrum viðkomandi deildum í Teknisku fyrisiting.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

### Skjøl

- *Restorff Skitsuuppskot 2025,* journal nr. 25/10368-2.
- *Møguligt byggisamtyktarøki,* journal nr. 25/10368-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður málið og tekur støðu til:

- Um uppskot til serstaka byggisamtykt fyri eitt avmarkað øki millum Fríðriks Petersens gøtu, Landavegin og Jóannesar Paturssonargøtu, ið m.a. loyvir íbúðarbygging á matr. 859e, 869b, 858ab og 860a, verður gjørt.
- Um uppskot til broyting í almennu byggisamtyktini skal fyrireikast, har tað í serstakari byggisamtykt er loyvt at víkja frá ásetingunum í § 5, stk 5 og 6, og harvið loyva einum hægri byggi- og nýtslustigi í sambandi við íbúðarbygging.
- Um umsitingin skal fara í eina tilgongd at gera nýggjar treytir til parkering til íbúðarbygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Nevndin tekur undir við punkti 1 og 2 og 3. Treytað av at parkeringsviðurskiftini verða loyst samsvarandi verandi mannagongdum.

**Ískoyti:**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini varð samtykt, at parkeringsviðurskifti til íbúðarbyggingina í gamla Restroff's bryggjaríið, skuldu verða loyst samsvarandi veranadi mannagongum. Umsøkjari hevur tillagað verkætlanina, soleiðis at tað nú eru min. 1 parkeringspláss til hvørja íbúð. Somuleiðis er verkætlanin broytt, soleiðis at tað ístaðin fyri eitt yvirdekkað útiøki, er eitt opið útiøki, og soleiðis er byggi- og nýtslustigið munandi lægri í nýggja uppskotinum, enn tað var í fyrra. Sí nýggja uppskotið í skjali 25/10368-17, *Restorff, apríl 2026.*

Umsitingin hevur gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt, sum fevnir um økið millum Jóannesar Paturssonar gøtu, Landavegin, Grønlandsvegin og Fríðriks Petersens gøtu, sí skjal 25/10368-20, *Serstøk byggisamtykt millum Jóannesar Paturssonar gøtu og Landavegin, juni 2026.*

Tað verður mett skynsamt at serstaka byggisamtyktin fevnir um hetta ítøkiliga økið, av tí at økið soleiðis hevur eina tílíka vídd, at til ber at fremja skynsama býarskipan, ið tekur atlit til økið í síni heild. Uppskotið skipar økið við einari greiðari framsíðu móti høvuðsvegunum, meðan tað "aftanfyri", ikki er eins skipað. Mett verður, at partur av ognini 858c, ið er kommunal ogn, einaferð í framtíðini kann verða nýtt sum grønt alment samlingstað, men av tí at tað framvegis er óvist, hvat ognin endaliga skal nýtast til, eru tað ikki gjørdar bindandi ásetingar hesum viðvíkjandi.

Raðhúsabyggingin fram við Jóannesar Paturssonar gøtu verða mett at verða varðveitingarverd – ella lutvíst varðveitingarverd, og eiga tað at verða gjørdar neyvar ásetingar í sambandi við hetta. Soleiðis er tað skilagott at hendan byggingin er partur av serstøku byggisamtyktini, soleiðis at hesar ásetingar kunnu gerast, tá neyðuga kanningararbeiðið er gjørt.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina býtir økið í 4:

- **Øki A, sum er sethúsini, samkomurnar og almenni stovnurin í økinum.**
  Ásetingarnar í uppskotinum fyri hetta økið loyva, umframt tí, sum er galdandi fyri A1 øki, somuleiðis íbúðum. Mett verður, at økið hevur ein tílíkan nærleika til miðbýin, at hettar økið er væl egnað til íbúðir. Harumframt er tað smb. Uppskotinum loyvt at hava grundstykkir, sum eru í minsta lagi 400 $m^2$. Ásetingar um bygging, so sum byggistig, nýtslustig og hæddir, eru tær somu, sum í A1 økjum annars.
- **Øki B, sum er raðhúsabyggingin fram við Jóannesar Paturssonargøtu 9-39 (Reyðu/hvítu raðhúsini).**

Einasta áseting í hesum økinum er, at byggjast skulu raðhús. Ætlanin er, at ásetingarnar fyri hetta økið seinni skulu útgreinast við tí fyri eyga at varðveita økið, men hetta krevur eitt gjøllari kanningararbeiði, soleiðis at røttu ásetingar kunnu gerast. Inntil hetta arbeiðið er gjørt, verður mælt til at byggiregulerandi ásetingarnar verða tær somu, sum tær eru í dag.

- **Øki C, sum er raðhúsabyggingin fram við Jóannesar Paturssonargøtu 43-59 (Gulu raðhúsini).**
  Einasta áseting í hesum økinum er, at byggjast skulu raðhús. Ætlanin er, at ásetingarnar fyri hetta økið seinni skulu útgreinast við tí fyri eyga at varðveita økið, men hetta krevur eitt gjøllari kanningararbeiði, soleiðis at røttu ásetingar kunnu gerast. Inntil hetta arbeiðið er gjørt, verður mælt til at byggiregulerandi ásetingarnar verða tær somu, sum tær eru í dag.
- **Øki D, sum er gamla Restorff's bryggjarí.**
  Ásetingarnar í uppskotinum fyri hetta økið er í trá við ta lýstu bygginginan í skjalinum 25/10368-17, *Restorff, apríl 2026.* Ásetingarnar viðv. Hædd, byggi- og nýtslustigi eru hægri í hesum økinum, enn í økinum annars, men tær eru hóast alt lægri, enn byggingin, ið er/var har frammanundan (gamla Restorff's bryggjarí). Hetta er ein mannagongd, ið verður mett at hóska seg, tá talan er um at endurnýta gamlar vinnubygningar í bústaðarøkjum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Býarverkfrøðingurin viðmerkir yvirskipað, at tað er trupult at fyrihalda seg til økta ferðslutrýstið og trýstið á verandi kloakk- og vatnleiðingar hjá kommununi. Neyðugt er við nýggjum leiðingum, um býlistalið í miðbýnum økist munandi, og er hetta tengt at nýtsluni.

Uppskotið er viðgjørt saman við Tekniska stjóranum.

**Skjøl:**
- Skjal 25/10368-17 – *Restorff, apríl 2026.*
- Skjal 25/10368-20 – *Serstøk byggisamtykt millum Jóannesar Paturssonar gøtu og Landavegin, juni 2026.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til Serstøk byggisamtykt millum Jóannesar Paturssonar gøtu og Landavegin, juni 2026, og beina tað í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 221/26 Verkætlan frá Steinatúni til Frælsið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 73/26 | 26/04175-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 158/26 | 26/04175-2 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 221/26 | 26/04175-2 |

**Upprunin til málið**
Sum partur av málinum hjá býráðnum um at bøta um ferðsluviðurskifti í kommununi og átakinum Tórshavn sum súkklubýur verður víst til mál nr. 25/05916 Havnin sum súkklubýur - 19/01370, har býráðið 18.06.2025 samtykti at játta kr. 3 mió til arbeiðið á L81061 Gongu- og súkklubreytir undir kontu 8175 Vegir (íløgur).

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útbjóðing at tillaga gongubreytir á strekkinum frá Steinatúni til Frælsið. Talan er um ymsar ábøtur og tillagingar á verandi gongubreytum og vegamótum á uml 40 ymsum økjum.

**Skjøl**
J.nr. 26/04175-3 Tekningar_28.05.2026
J.nr. 26/04175-5 Til teir bjóðandi
J.nr. 25/05916-1 Havnin sum súkklubýur – 19/01370
J.nr. 26/04175-1 26-04175 Førleikamatrix

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og gera sáttmála við tann tilboðsgevaran, ið hevur lægsta boðið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhemsen, tekur undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Annfinn Brekkstein.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 849 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 222/26 Fríplássskipan til Tórshavnar musikkskúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.06.2026 | 83/26 | 26/04298-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 136/26 | 26/04298-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 222/26 | 26/04298-1 |
| 4 Mentamálanevndin | | | 26/04298-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt í mentamálanevndini 15. apríl 2026

**Lýsing av málinum**

Í arbeiðnum við at menna eina skipan um frípláss til Tórshavnar musikkskúla (TM) hevur mentamáladeildin hugt eftir tveimum leistum:

1. Leisturin sum TK nýtir til at veita frípláss til dagstovnar
2. Leisturin sum Barnabati nýtir til at veita t.d. hjálp til at keypa ítróttarbúnar, jólahjálp osfr.

Í viðgerðini hevur dentur verið lagdur á, at

- Avslátturin skal gera mun fyri tey, sum hava tørv á honum og fella innanfyri ásettar treytir
- Tað skal vera so einfalt sum gjørligt at søkja um frípláss ella avsláttur
- Skipanin skal vera so einføld sum gjørlig at umsita

Høvuðsendamálið við at hava eina tílíka skipan, er at geva so nógvum børnum og ungum sum gjørligt atgongd til musikkskúlaundirvísing.

<u>Leisturin við dagstovnafríplássum</u>
Frípláss til dagstovnar verða veittir eftir einum stiga, sum almannamálaráðið ásetir (sí viðhefta skjal).

Mannagongdin er tann, at borgara søkja um frípláss umvegis Vangan, og viðhefta útskrift við upplýsingum um inntøku frá borgaraglugganum.
Hesin leisturin byggir á brutto-inntøkur per húski. Minsti avstlátturin er 5% og hann veksur so við einum prosentstigi í senn alt eftir inntøkuni upp til 100%. Fyri at fáa fullan avsláttur, skal samlaða inntøka áðrenn skatt vera lægri enn 339.700kr. Er inntøkan hægri enn 415.700kr rindar tú fult gjald.

Næmingagjøldini í TM kunnu sum so ikki sammetast við dagstovnagjøld. Vanliga næmigagjaldið fyri ljóðførisundirvísing í TM fyri eitt ár verður í august 2.500kr. Árliga gjaldið fyri barnagarð er 28.292kr.

5% í avslátri av 2.500kr er 125kr. Hóskandi hevði verið at minsti avslátturin fyri musikkskúlagjald var í minsta lagi 25%, um hann skal gera nakran mun.

<u>Leisturin hjá Barnabata</u>
Leisturin hjá Barnabata byggir á fátækraváða. Hagstova Føroya ger á hvørjum ári eina útrokning, sum vísir á, hvar markið fyri at fólk liva í fátækraváða liggur. Hetta byggir á altjóða standardir, sum siga, at um tøka inntøkan liggur 60% ella meira undir miðal, so livir man í fátækraváða. Hetta talið verður roknað fyri ein persón, og fyri húski brúkar tú so ein lykil, har ein vaksin telur 0,5 og eitt barn telur 0,3. Tað verður so lagt saman og so skal samlaða tøka inntøkan liggja undir tað talið sum samsvarar við húskið (sí viðhefta yvirlit). T.d. skal eitt húski við 2 vaksnum og 2 børnum hava eina tøka inntøku (t.e. inntøka eftir skatt osfr) á 373.800kr um árið og 1 vaksin við einum barni skal hava tøka innøku á 231.400kr um árið.

Mannagongdin hjá barnabata er, at borgara søkja umvegis heimasíðuna og upplýsa inntøku, samanseting av húski o.l. og viðhefta síðan avrit av bankanum, sum vísir útgjøld eftir skatt umframt aðrar veitingar. Spurt verður eisini um fastar útreiðslur o.l., men sambært aðalskrivaranum verður hetta ikki nýtt í sjálvari metingini. Tey hyggja bara eftir fátækraváðamarkinum.

Her verða allar veitingar tiknar við so sum familjuískoyti, barnapeningur osfr, og tað gera skipanina, ella rættari skjalprógvingina, eitt sindur trupla, tí allar veitingar koma ikki hvønn mánaða ella ymsar tíðir á mánaðinum, so tað er trupult at fáa eitt samlað yvirlit.  Í Borgaraglugganum ber til at fáa upplýsingar um bæði brutto- og nettoinntøku, men ikki aðrar veitingar.

Barnabati umsitur eisini fríplássskipan hjá ÍSF, men tey biða ikki um nakrar upplýsingar um inntøku, men arbeiða eftir tí sjónarmiði, at tey, sum søkja, hava tørv á tí.

--

Um vit samanbera hesar báðar skipanirnar, og tey tilboðini tær snúgva seg um, so er nokk rættast at siga, at musikkskúlatilboðið liggur tættari at tí, sum Barnabati veitir stuðul til enn dagstovnatilboðini. Frítíðarítriv so sum ítróttur og musikkkskúli eru tilboð, sum fólk velja til ella frá í størri mun enn dagstovnapláss, sum jú eru neyðug fyri at vera á arbeiðsmarknaðinum osfr.

Tískil verður mett, at ein leistur, við íblástri úr tí hjá Barnabata, har markið fyri fátækraváða verður nýtt sum skilarmark, hóskar seg best. Tó við nøkrum tillagingum, fyri at skipanin skal vera einkult hjá bæði umsøkjarum og umsiting. M.a. verður støði tikið í nettoinntøku sambært upplýsingum frá Borgaraglugganum, heldur enn eini fullari uppgerð av allari tøkari inntøku við øllum veitingum.

**<u>Uppskot til leist 1</u>**
Húski sum uppfylla treytirnar fyri at vera í fátækraváða – tvs. at tey sum hava eina samlaða netto-inntøku, sum er lægri enn tann, sum samsvarar við samansetingina av húskinum sambært yvirlitinum hjá Hagstovu Føroya – kunnu søkja um og fáa fríplass til næmingar í Tórshavnar Musikkskúla, sum eru undir 18 ár.

Frípláss verður ikki latið stigvíst sum prosentavsláttur, men annaðhvørt sum fult frípláss ella ikki.

Søkjast skal umvegis Vangan og hesir upplýsingar skulu latast:
- Upplýsingar um umsøkjara og næming á musikkskúlanum
- Upplýsingar um, hvat søkt verður um frípláss til (einstaklingaundirvísing, bólkaundirvísing osfr)
- Upplýsingar um húskið (húskið er øll, sum hava bústað á sama staði)
- Upplýsingar um netto-inntøku (íroknað A og B-inntøku) (skjalprógv um útgoldna inntøku skal veitast frá Borgaraglugganum – vegleiðing verður veitt um hetta).

Møguliga verður annað lagt afturat, um tað verður mett at vera neyðugt fyri viðgerina.

<u>Kostnaður</u>
Sambært tølum á heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya liva 6,4% av fólkum í TK í fátækraváða.

Inntøkan frá næmingagjøldum er í fíggjarætlanini fyri 2026 sett at vera 1.650.000kr (viðmerkjast skal tó, at TM hevur ynskt at hetta verður sett niður, tí at tey megna ikki at røkka hesum).

6,4% av 1.650.000 er 105.600kr.

Við tað at skipanin byggir á skattskylduga inntøku og ikki tekur hædd fyri øðrum veitingum, kann væntast, at talið av teimum, sum kunnu fáa játtað frípláss, verður nakað hægri enn talið av húskjum, sum sambært Hagstovu Føroya liva í fátækraváða.

Mett verður at 120.000kr er hóskandi at seta av, og má hetta síggjast aftur sum ein minking í inntøku frá næmingagjøldum í fíggjarætlanini hjá TM fyri 2027.

**Uppskot til leist 2**
Afturat teimum, sum sambært leisti 1 kunnu søkja og fáa játtað frípláss, kunnu tey, sum liggja beint omanfyri markið fyri fátækraváða – t.e. upp til 10% yvir markið – søkja um og fáa játtaðan 50% í avsláttri.

Søkjast skal umvegis Vangan og somu upplýsingar skulu latast sum í uppskotinum fyri leist 1.

Kostnaður
Mett verður, at 150.000kr er hóskandi at seta av til hendan leistin, og má hetta síggjast aftur sum ein minking í inntøku frá næmingagjøldum í fíggjarætlanini hjá TM fyri 2027.

--

Systkinaavsláttur
Tórshavnar musikkskúli hevur skipan við systkinaavsláttri, har fyrsta barnið rindar fult gjald og systkin rinda 50%. Hetta er tó einans galdandi fyri systkin upp til 18 ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
Inntøkustigi frípláss til dagstovnar
Barnavati roknifrymil fátækraváði

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 852<br><br>Forkvinnunnar merki: |

## Játtan:

Vanlig játtan ☐

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 5110 | | Musikkskúlin |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| 120000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta í verk fríplássskipan eftir uppskotinum um leist 1.

Mælt verður eisini til at minka um inntøkurnar hjá musikkskúlanum frá næmingagjøldum við 120.000 kr. í fíggjarætlanini fyri 2027.

**Mentamálanevndin 03. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Aftur í mentamálanevndina at eftirmeta skipanina til fundin í mai 2027.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 853 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 223/26 Vanligur stuðul, KÍF Kappróður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.06.2026 | 94/26 | 26/04481-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 223/26 | 26/04481-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um íløgustuðul til kappróðrarbát.

**Lýsing av málinum**
Inn er komin umsókn frá KÍF Kappróður um íløgustuðul á 50.000 kr. til nýggja 5-mannafarið, Kollur. Kappróðrarbáturin er so gott sum gjørdur, og hann skal brúkast á Norðoyastevnu í ár. Tað er bátasmiðurin í Kollafirði, Terji Jacobsen, ið hevur smíða nýggja bátin.

Felagið kunnar um, at báturin kostar 180.000 kr. Felagið søkir um 50.000 kr í stuðli, og er tað sostatt undir 1/3 av kostnaðinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs 3. september 2015.

Víst verður á fylgjandi greinar í leiðregluni:
§3 stk. 3: *Stuðul verður ikki latin til bygging, sum er byrjað ella liðug.*
§5 stk. 1*: Um serligar umstøður tala fyri tí, kann býráðið víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 854 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla frá at játta stuðul, vísandi til §3 stk. 3 í leiðregluni um stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 03. juni 2026:** Nevndin mælir til at játta umsóknina um stuðul og beina málið í býráðið, vísandi til leiðreglurnar.

Bergur Robert Dam Jensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 855<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 224/26 Nýtt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 54/26 | 26/01674-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 88/26 | 26/01674-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 116/26 | 26/01674-2 |
| 4 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 149/26 | 26/01674-2 |
| 5 Tekniska nevnd | 15.06.2026 | 81/26 | 26/01674-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 160/26 | 26/01674-2 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 224/26 | 26/01674-2 |

**Lýsing av málinum**
Staðfest er, at fleiri størri reinsiverk í kommununi eru bygd í sjeytiárunum og treingja til dagføringar. Reinsiverkini eru beton, og eru ótíðarhóskandi, tí tey leka, og kloakkvatn seyrar undan hesum reinsiverkunum. Talið av hesum reinisverkum er umleið 8.

Sum liður í at dagføra hesi reinsverk var í 2022 farið undir at dagføra kloakkreinsiverkið á Mýrini, sí mál nr. 22/01107. Framhaldandi av hesum arbeiði verður mett, at reinsiverkið við Sanatoriivegin er næsta reinsiverk, sum skal dagførast ella gerast av nýggjum.

Reinsiverkið var gjørt ísv. útstykkingina oman Hoydalar, og eftirfylgjandi vóru útstykkingarnar fram við Flatavegi, millum Gilja og Eystan Gil bundin í reinsiverkið. Hetta førdi við sær stórar kloakktrupulleikar, og fyri at avlasta reinsiverkið var í 2007-08 farið undir at staðseta reinsiverk á p-plássinum vestan fyri Lívdina.

Kostnaðarmeting
Sambært fyribilsmetingum kann væntast, at kostnaðurin fyri ráðgeving og at dagføra ella útskifta reinsiverkið verður uml. kr. 2.200.000

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6875 | | | Nytt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum |

| **Upphædd** |
|---|
| 2.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við at prosjektera og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.
- at játta kr. 2.200.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir (íløgur), á nýggja verkætlan "Nýtt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum" undir konto 6875 Kloakkir (íløgur).
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot um at taka undir við teknisku nevnd, at beina sáttmálan aftur í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina til avgerðar, og at tekniska nevnd fær innlit í alt útboðið, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Tekniska nevnd hevur 13.04.2026 tikið undir við tlimælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum um

- at taka undir við at fara undir at prosjektera og bjóða arbeiðið út í innboodna lisitatión
- at játta kr. 2,2 mió til prosjektering og útbjóðing
- at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Á býráðsfundi 05.05.2026 var atkvøtt um at taka undir við teknisku nevnd og beina sáttmálan aftur í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevnd til avgerðar, og at tekniska nevnd fær innlit í útboðið.

Tað fyriliggur eingin sáttmáli og einki útbjóðingartilfar til ráðgeva fyri arbeiðið at fyrireika at dagføra ella útskifta reinsiverkið. Av somu orsøk fyriliggur heldur einki útbjóðingartilfar til arbeiðstakarar.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til sama tilmælið til fundin í teknisku nevnd 13.04.2026.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Tikið av skrá.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 857 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 225/26 Kanning av verandi støðu á kloakkleiðing við Sjósavnið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 32/25 | 25/05866-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 117/25 | 25/05866-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 167/25 | 25/05866-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 53/26 | 25/05866-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 86/26 | 25/05866-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 114/26 | 25/05866-1 |
| 7 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 147/26 | 25/05866-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 79/26 | 25/05866-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 146/26 | 25/05866-1 |
| 10 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 225/26 | 25/05866-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framløgd í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstraræltan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um at kanna og gera fyrireikingararbeiði á landi við Sjósavnið.

Arbeiðið verður mett til at kosta 2 mió kr. Farið er undir fyrireikandi ráðgevingararbeiði á landi, og ætlanin er at fara undir útbjóðing skjótast til ber, so farast kann undir kloakkarbeiði á landi.

Tíðarætlan: Prosjektering juni-juli 2025. Anlægsarbeiðið byrjar í september 2025

Verða innkomnu tilboð hægri enn tillutað játtan, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur.

**Skjøl**
jnr. 25/00417-1 Íløgu- og rakstraræltan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Nýggj havleiðing við Sjósavnið | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

| Býráðsfundur<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 858<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

1) Játta kr. 2.000.000,- av kto 6875 Kloakkir LK68999 Kloakkir (íløgur) á kto 6875, Nýggj havleiðing við Sjósavnið, fyri 2025 til at kanna og gera fyrireikingararbeiði á landi við Sjósavnið og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir viðtilmællinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fyrirekingararbeiðið fyri kloakkarbeiði á landi er nú liðugt og klárt er at bjóða arbeiði út. Kostnaðarmetingin at gera kloakkarbeiði er býtt í tveir partar – ein á landi og hin í sjónum.

Sambært fyrireiekingararbeiðinum verður parturin á landi og parturin í sjónum mettur til samanlagt 12,5 mió. Víst verður til kostnaðarmeting – skjal nr. 25/05866 "Kostnaðarmeting.xlsx".

Ætlanin er at fara undir kloakkarbeiði á landi í ár og seinna partin á sjónum í 2027.

Fíggjartørvurin er tískil fyri 2026 – kr. 5.664.000 og fyri 2027 kr. 6.797.000.
Tá farið verður undir framhaldandi arbeiði í sjónum í 2027, verður málið at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

Tá havleiðingin er liðug er møguleiki at knýta fleiri partar av Argjum í hesa leiðing fyri at minka um tal av teimum stuttu útleiðingunum og fyri at fáa veitt spillivatnið langt frá landi, har rák og uppíblandingin er væl størri.

**Skjøl**
25/05866-6     25-05866 Kostnaðarmeting.xlsx

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Nýggj kloakkleiðing fram við Sjósavninum | 5.664.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til fyri fíggjarárið 2026

- at bjóða arbeiði út í innbodna lisitatión
- at játta kr. 5.664.000 av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan "Nýggj kloakkleiðing fram við Sjósavninum" undir konto 6875
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot um at taka undir við teknisku nevnd, at beina sáttmálan aftur í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina til avgerðar, og at tekniska nevnd fær innlit í alt útboðið, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 1 atkvøðu ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Arbeiðið hevur verið boðið út, og tilboð eru komin inn.
5 vildu vera við at bjóða, 1 gav avboð dagin fyri licitatión, og bert 2 bjóðaðu.
Bæði tilboð vóru undir kostnaðarmetingina, og mælt verður til at taka av lægsta tilboð áljóðandi uml. kr. 4,53 mió.

**Skjøl**
25/00417-1 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025
25/05866-6 25-05866 Kostnaðarmeting.xlsx
25/05866-14 Tilmælið í sambandi við kloakk við Sjósavnið á Argjum
25/05866-7 Útbjóðingartilfar

**Tilmæli**
Víst verður til samtyktina í teknisku nevnd 13. apríl 2026. Harumframt mæla tekniski stjórin og Býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboð frá lægstbjóðandi, áljóðandi kr. 4,53 mió og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 860<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 226/26 Hosufóðring 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 51/26 | 26/01677-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 90/26 | 26/01677-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 118/26 | 26/01677-1 |
| 4 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 151/26 | 26/01677-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 78/26 | 26/01677-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 147/26 | 26/01677-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 226/26 | 26/01677-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvurin á at dagføra og betra verandi spillivatnsleiðingar í miðbýnum, har fleiri av leiðingunum eru gamlar og í ringum standi.

Av tí at leiðingarnar liggja í økjum við nógvari ferðslu og útbygdum økjum, er tað trupult at fremja arbeiðið við vanligari uppgraving.

**Lýsing av málinum**
Málið snýr seg um at halda fram við nýtslu av hosufóðring.
Henda loysn fevnir um, at ein fleksibul slanga, ið er gjørd úr glasfipri ella filt og imprægnerað við epoxy, verður førd inn í verandi rør, blást upp og herdað, soleiðis at eitt nýtt og tætt rør verður skapt inni í tí gamla.

Arbeiðshátturin er nýttur seinastu árini við góðum úrslitum, og verður nú endurtikin sum partur av framhaldandi viðlíkahaldi av kloakkskipanini.
Serliga í miðbýnum er hetta ein hóskandi loysn, tí hon sleppur undan, í nú verandi løtu, stórum uppgrevstri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at hosufóðring er ein væl egnaður og kostnaðareffektivur háttur at umvæla gamlar spillivatnsleiðingar.

Loysnin hevur víst seg at vera haldfør og á støði við at leggja nýggj rør, samstundis sum hon minkar um órógv og arbeiðstíð í økjum við nógvari ferðslu.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 862 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Hosufóðring 2026 | 7.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út til ráðgeva, at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.
- at játta kr. 7.000.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan "Hosufóðring 2026" undir konto 6875 Kloakkir (íløgur).
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot um at taka undir við teknisku nevnd, at beina sáttmálan aftur í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina til avgerðar, og at tekniska nevnd fær innlit í alt útboðið, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Ein veitari, sum hevur serkøna vitan á økinum, er biðin at geva tilboð.
Útboðstilfar er grundað á kloakk-videofilmar.
Ein partur av hesum tilfari verður lagt fram á fundinum.
Tilboð er innan fyri játtanina.

**Skjøl**
26/01677-7 Kort yvir hosufóðring 2026

26/01677-8 203352583 Budget 12-03-2026 (1).pdf
26/01677-9 Dømi um strekkir 2026

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og Býarverkfrøðingurin mæla til at:

- tikið verður av tilboðnum frá veitaranum áljóðandi 5,5 mió kr, og sáttmála um hetta arbeiðið verður gjørdur og undirskrivaður.
- harumframt verða játtaðar 1,5 mió kr til byggiharraðútreiðslur í samband við verkætlanina.
- beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 864 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

# 227/26 TV-kanningar av spillivatnsleiðingum 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 76/26 | 26/01691-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 148/26 | 26/01691-3 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 227/26 | 26/01691-3 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framlagt í máli nr. 25/00417. Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um at kanna, filma og spula kloakkleiðingar í allari kommununi.

**Lýsing av málinum**
Tørvur er á at fáa framhaldandi kanning av kloakkleiðingunum í kommununi.

Í hesum málinum er talan um kanningararbeiði fyri 2026, sum farið var undir í 2021. Samlaða kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er mett til kr 1.000.000.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Samskifti hevur verið við veitara, sum hevur servitan og útgerð innan arbeiðsøkið.

**Skjøl**
Sambært korti skjal nr. 26/01691-04 eru higartil gjørdar TV-kanningar á hesum økjum:
1) Øki 01-14
2) Øki 15-21
3) Øki 22-25

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) | 6875 | | | TV-kanningar av spillivatnsleiðingum | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

- Játta kr. 1.000.000 av løgukarmi LK68999 undir konto 6875 Kloakkir (íløgur), á nýggja verkætlan “TV-kanningar av spillivatnsleiðingum” undir somu konto.
- Heimila umsitingini at prosjektera, gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út, samráðast við tann, sum hevur besta boð, undirskriva sáttmála.
- beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við elluvu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 866 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 228/26 Reinsiverk til vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 44/25 | 25/05863-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 145/25 | 25/05863-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 193/25 | 25/05863-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 69/26 | 25/05863-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 141/26 | 25/05863-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 228/26 | 25/05863-1 |
| 7 Býráðsfundur | | | 25/05863-1 |
| 8 Tekniska nevnd | | | 25/05863-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við útstykkingararbeiðið til vinnustykkini á Ovara Hjalla og á Stórutjørn, verður neyðugt at staðseta eitt nýtt reinsiverk við vegamótið á Hjalla og Hvítanesvegurin, sum skal kunna rúma ca. 800 rúmmetrum.

Samstundis sum arbeitt verður við loysnini at staðseta reinsiverkið, er neyðugt at gera nakrar tillagingar á verandi kloakkleiðingum frá øllum vinnuøkinum á Hjalla.

Tørvur er á at fáa gjørt útbjóðingartilfar, har byggiskráin skal fevna um staðseting av reinsiverki við leiðingum frá:

1) Vinnustykkjunum á ovara Hjalla
2) Útstykkingini á Stórutjørn
3) Verandi útstykking á Hjalla
4) Við Tjarnir

Harumframt skal byggiskráin fevna um at leggja høvuðskloakkleiðing frá reinsiverkinum og oman til sjóvarmálan sunnanvert Byrsumúla. Mett verður, at verandi høvuðskloakk, oman fyri Hvítanes, ikki klárar at taka ímóti meiri spillvatni.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 867<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) | 6875 | | | Reinsiverk á Hjalla | 750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 750.000 av løgukarmi fyri kloakkir LK68999 undir kontu 6875, Kloakkir (íløgur) til nýggja verkætlan "Reinsiverk á Hjalla" og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Ein milliluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:**

Atkvøtt varð um tilmælið:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddu: ongin

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

**Ískoyti**
Prosjekteringin av reinsiverkinum er liðug, og mettur kostnaður verður kr. 23,542 mió. íroknað eftirlit, keyp av lendi/matrikulútreiðslur og ókend viðurskifti orsakað av ótryggum tilfarsprísum. Víst verður til kostnaðarmeting j.nr. 25/05863-6 Samlað kostnaðarmeting.

Sambært galdandi tíðarætlan verða øll vinnustykkini avhendað í juli 2026, og væntast kann tí, at fyrstu eigararnir av vinnustykkjunum fara undir sítt virksemi í hest. Tískil hevur verkætlanin skund.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 868<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Skjøl**
25/05863-6 Samlað kostnaðarmeting
22/01377-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla
25/05863-11 Sáttmáli við Articon at gera Stórutjørn, og optión at gera trixtanga.pdf
25/05863-12 Flatmynd atkoma og økið við reinsiverkum.pdf
25/05863-13 Grátt spillivatn út á sjógv G101.pdf
25/05863-14 Yvirlitsmynd B100.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn B1 og B4 (Útlegg) | 6875 | L68050 | Reinsiverk á Hjalla | | 20.542.000 |
| 6975 | L69004 | Vinnuútstykkin g á Ovara Hjalla (Útlegg) | 6875 | L68050 | Reinsiverk á Hjalla | | 3.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 24.292.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 750.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
1. Bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.
2. Heimila umsitingini at taka av lægsta tilboði innan játtaða fíggjarkarmin og at seta arbeiðið í verk.
3. Játta kr. 20.542.000 til verkætlanina sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn B1 og B2.
4. Játta kr. 3.000.000 til verkætlanina sum útlegg á verkætlan L69004 Vinnustykkini á Ovara Hjalla.
5. beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at málið verður lagt fyri nevndina aftur til støðutakan, tá tilboðini fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 870 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 229/26 Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 38/26 | 26/00599-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 25/26 | 26/00599-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 35/26 | 26/00599-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 45/26 | 26/00599-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 87/26 | 26/00599-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 70/26 | 26/00599-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 142/26 | 26/00599-1 |
| 8 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 229/26 | 26/00599-1 |
| 9 Býráðsfundur | | | 26/00599-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/00581

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við útstykkingararbeiðið á Stórutjørn, skal støða verða tikin til um farast skal undir arbeiði at leggja fjarhita ella ikki. Fjarhitafelagið hevur boðað frá, at fíggjarligt rúm er ikki til at bera kostnaðin at leggja fjarhitaleiðingar. Tískil er neyðugt at kommunan í samstarvi við Fjarhitafelagið rindar fyri arbeiðið eins og gjørt er í sambandi við veitan av fjarhitaleiðingum til vinnustykki á Ovara Hjalla. Víst verður til mál nr. 22/01377 og 25/01179

Vísandi til at útstykkingararbeiðið er longu sett í verk í 2024 og at støða enn ikki er tiknin um at fjarhitaleiðing, er neyðugt er at taka eina skjóta avgerð so arbeiðið ikki steðgar upp. Vanliga hevur Fjarhitafelagið ikið sær av at veita og leggja fjarhitaleiðingar, men orsaka av væntandi haldføri hjá felagnum er støða ikki tikin til hetta eftir at farið var undir ústykkingararbeiði.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
26/00599-2 Upplegg til sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Fjarhitafelagið ver5.docx
25/08816-5 137/25 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 29.09.2025 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/08816-2 Upprunalig málslýsing mál nr. 25_00581 Útstykking til sethús við Stórutjørn 22_02943
25/08816-1 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/00581-2 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943
25/01179-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 871<br><br>Forkvinnunnar merki: |

Verkætlanin at leggja fjarhitarør í Stórutjørn verður mett at kosta uml. kr. 8 mió. Talan er um prosjektering, at veita og leggja fjarhitarør og eftirlit. Neyvari kostnaðarmeting fyriliggur, tá ið prosjekteringsarbeiðið er liðugt væntandi primo apríl 2026.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6475 | | | Fjarhiti til útstykking til Sethús Stórutjørn | 8.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 8.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | ultimo 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

1) heimila umsitingini at gera avtalu við Fjarhitafelagið um planlegging, fremjan og avhandan av fjarhitaanleggi til býlingarnar B1 og B4 við Stórutjørn.
2) kr. 8 mió. verða játtaðar til at leggja fjarhita o.a. í sambandi við hetta útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1 og B4, verður hækkað við 8 mió kr., sum eykajáttan til kr. 134.825.142.
3) beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, við tí nágreining at endalig avtala við Fjarhitafelagið verður løgd fyri býráðið aftur til góðkenningar, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála,

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Eingin.

**Ískoyti**
Í sambandi við detailprosjekteringina av fjarhitanum til útstykkingini á Stórutjørn er komið fram, at meirikostnaðurin er uml. kr. 8 mió.
Sí j. nr. 26/00599-18, 26/00599-19, og 26/00599-20

Høvuðsorsøkirnar til, at arbeiðið er dýrkað, er, at sveisi- og muffuarbeiðið vísti seg at blíva væl dýrari, enn upprunaliga mett, vegna tvørligar arbeiðsumstøður, og at fleiri stikk eru løgd inn til randarhúsini.

Tað kann viðmerkjast, at arbeiðið at leggja fjarhitarør er gjørt í tøttum samstarvi við Fjarhitafelagið, ið skal yvirtaka/keypa verkætlanina eftir nærri avtalu. Samstarvið viðførir, at arbeiðið er gjørt á sama hátt, sum um tað var Fjarhitafelagið, ið gjørdi tað – Mest sveisar og muffar, Glasir ger kontrol av sveisingum, SMJ prosjekterar og hevur eftirlit. Eisini verða rørini keypt frá Logstor har vit, sum fjarhitafelagið, fáa avsláttur uppá á 62%.

**Skjøl**
26/00599-18 Upprunaliga kostnaðarmetingin Fjarhiti - Stórutjørn Kostnaðarmeting_pdf.msg
26/00599-19 Dagførd kostnaðarmeting Fjarhiti - Stórutjørn og Vinnuøkini Kostnaðarmeting_pdf.msg
26/00599-20 26-00599 Samlað dagførd kostnaðarmeting.xlsx

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn B1 og B4 (Útlegg) | 6475 | L64023 | Fjarhiti til útstykking til Sethús Stórutjørn | | 8.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 16.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 8.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- kr. 8.000.000, verða játtaðar til at leggja fjarhita o.a. í sambandi við hetta útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn,
- B1 og B4, verður hækkað við 8 mió kr., sum eykajáttan til kr. 142.825.142.

  og beina málið um fíggjarnevndina til 2 viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum, grundað á at SEV, sum annar eigari av Fjarhitafelagnum, ikki er við í fíggingini í hesum umfari.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, og Annfinn Brekkstein.

## 230/26 Kommunala fyrisitingin í Sjóvinnuhúsið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 143/26 | 26/04400-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 230/26 | 26/04400-1 |

**Upprunin til málið**
Í fleiri umførum hevur málið um hølisviðurskiftini hjá fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu verið umrøtt og viðgjørt, eitt nú í sambandi við makaskifti av gamla Venjingarskúlanum og í sambandi við miðbýarætlanina. Í umrøðum hevur í fleiri ár verið ró framundir, at fyrisitingin skal savnast í Sjóvinnuhúsinum á vestaru bryggju. Tørvur er á eini prinsipiellari avgerð um flytingina.

**Lýsing av málinum**

Søgulig støða
Eindarfyrisitingin hjá Tórshavnar Kommunu telur í løtuni 188 fólk. Eindarfyrisitingin er býtt í 4 “fak”-fyrisitingar við tilsamans 16 ymiskum deildum. Nógv tann største deildin er Sosiala deild, ið telur 36 starvsfólk. Minsta deildin er Umhvørvisdeildin við 5 fólkum.

Deildirnar eru spjaddar í bygningum nærhendis miðbýnum, har Ráðhúsið á Vaglinum er miðdepil fyri sambandið millum stjórn og deildir. Flestu deildir hava, umvegis stjórn, regluligt samband við politisku skipanina á Vaglinum. Matarstaðið er Posthúskjallarin, har flest øll hava fá fet til gerandis miðmála.

Verandi hølir eru sera ymisk í stødd, skapi og standi. Steinatún, Posthúsið og Meiaríið eru ogn, ímeðan hølini, har deildin “Børn&Ung” húsast, eru leiga. Felags fyri allar deildir er plásstrot.

Lógarbundna fortreytin fyri skrivstovuarbeiðspláss er í høvuðsheitum rúmd og inniumhvørvi til tað einstaka starvsfólkið. Fortreytin fyri eini vælvirkandi eindarfyrisiting er harafturat at skipa samstarv ímillum starvsfólk í hølum, sum stuðla undir endamálið hjá fyrisitingini. Staðfestast má, at verandi hølir liva ikki upp til lógina og tørvin hjá eindarfyrisitingini, og tí er alneyðugt at gera broytingar.

Miðbýðurin skal mennast
Umframt staðfestingina av, at verandi hølir ikki eru nøktandi, eru flest øll samd um, at miðbýnum tørvar munandi dagføring. Tað er sjónligt forfall av gomlum bygningum og avmarkað lív uttanfyri friðarligu skrivstovurnar.

Fleiri miðbýarætlanir hava verið á borðinum gjøgnum mong ár, og roynt hevur verið, at gjørt samanhangandi dagføringar eftir førimuni. Tað var á býráðsfundinum hin 26. januar 2023, at “Urtagarðsbýurin” varð samtyktur. Talan er um eina langskygda ætlan, har høvuðsvisiónin er “at skapa lív í býnum” . Ein av høvuðsháttunum í ætlanini er at minka um skrivstovuhølir í miðbýnum, og í staðin gera betri pláss til bústaðir og borgaravendar funktiónir.

Miðbýarætlanin leggur samstundis upp til, at Ráðhúsið skal hýsa býráðssali, fundarhølum og umframt býráðsarbeiði, eisini hava rúm fyri móttøkum, framsýningum o.ø. alment gagnligum endamálum.

Tá hugsað verður um plásstrotið hjá eindarfyrisitingini og visiónina í miðbýarætlanini, gerst greitt, at skrivstovurnar í fyrisitingini mugu flyta úr miðbýnum.

Plásstørvur
Skrivstovufólk skulu sambært lóg hava rúmd – t.e. fermetrar og rúmmetrar til sítt dagliga arbeiði, lógliga arbeiðsumhvørvið til skrivstovur umfatar eisini hóskandi matarstað, toilett og eina brunatrygga innrætting. Harafturat koma fundarhølir og onnur hølir sum stuðla undir virksemið á einstøku deildini. Nakrar funktiónir

arbeiða í trúnaði og tørva tí einkult- ella tveyrúmsskrivstovur. Aðrar deildir kunnu arbeiða í størri og minni felagsskrivstovum.

Lyklatal fyri samlaðan plásstørv til hvørt starvsfólki liggur onkrastaðni millum 20 og 30 fermetur. So statt er núverandi tørvur áleið 188 x 25 = 4.700 fermetrar. Kravið til parkeringspláss til skrivstovur er 1 pláss pr. 30 fermetur = 157 p-pláss. Plásstørvur til nøktandi p-pláss er tí umleið 4.000 fermetur.

Siga vit, at skrivstovurnar skulu skipast undir sama taki á 5 hæddum, so er runt roknað tørvur á einum "fótaspori" á tilsamans 5.000 fermetrar. (5.000 / 5 + 4.000).

<u>Staðseting</u>
Støddin á "fótasporinum" og frástøðan til Vaglið, har býráðssalurin og borgaravendar funktiónir hjá fyrisitingini verða verandi, avmarkar møguleikarnar fyri staðseting. Frúutrøð, sum onkuntíð er nevnt sum møguleiki, er til dømis einans 3.500 fermetrar og hevði tí kravt ein bygning í 6 hæddum. Ein slík loysn hevði gjørt stóran skaða á lágu bústaðarbyggingina í økinum. Sama er galdandi í nógvum grannaløgum nærhendis miðbýarkjarnuni. Leitað hevur eisini verið eftir staðseting á Hálsi og aðrastaðni við.

Í 2022 gjørdu táverandi borgarstjóri og táverandi kommunustjóri niðurstøðu um, at arbeiða við Sjóvinnuhúsinum á Vestaru bryggju. Sjóvinnuhúsið er bygningur í 5 hæddum og við tilsamans omanfyri 7.000 gólvfermetrum, umframt okkurt um 5.000 fermetrum av parkeringsøki. Hóast bygningurin er nóg stórur, hevur hann nakrar avmarkingar í mun til ein nýggjan bygning. Eitt stórt minus er manglandi dagsljós á norðursíðuni, og avbjóðingar eru eisini við ovurhita á suðursíðuni sum er úr glasi. Ventilatiónsverk er í bygninginum, men alt eftir innrætting megnar ventilatiónin tó ikki at veita nøktandi inniluft í hvønn krók. Ein leyslig meting er at tað skulu brúkast eitt stað í millum 4-8000 kr pr. fermetur, til tess at bygningurin kemur á hædd við ein nýbygning. Endaligi kostnaðurin fyri flyting í Sjóvinnuhúsið kemur tí at liggja í millum kr. 20 og 40 mió. Til samanberingar hevði ein nýbygningur (uttan keyp av grundøkið) kostað eitt stað ímillum 40 og 50 túsund kr pr. fermetur ella o.u. 200 til 250 mió. at byggja.

Miðbýarætlanin nevnir fleiri ferð, at ætlanin er at flyta umsitingina hjá Tórshavnar Kommunu út á Vestaru Bryggju. Undanfarna býráð, sum samtykti miðbýarætlanina, samtykti eisini mál um makaskifti av Venjingarskúlanum og Hoydølum, har táverandi landstýrismaður undirskrivaði avtalu um, at Fróðskaparsetri skal flyta úr Sjóvinnuhúsinum fyri at gera pláss til, at fyrisitingin hjá Tórshavnar Kommunu kann flyta inn.

<u>Principiell avgerð</u>
Hóast omanfyristandandi tilgongd peikar á Sjóvinnuhúsið, sum egnaða loysn til alneyðugu dagføringina av hølisviðurskiftunum hjá samlaðu eindarfyrisitingini, sum kann røkka mong ár út í framtíðina, so er eingin endalig fyrisitingarlig niðurstøða og politisk samtykt gjørd um hetta mál. Neyðugt er at seta pening av til fyrireiking, og at samtykkja, at arbeitt verður víðari við málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022
- Kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 um bygningskunngerð 2017
- Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/03066 Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum
25/07477_Bráðflyting av Teknisku Fyrisiting til Sjóvinnuhúsið
25/09097 Hølisviðurskifti hjá fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu

| | Blað nr.: 876 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Forkvinnunnar merki: |

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevnd og býráði til

- at geva umsitingini heimild at fara undir ítøkiligar fyrireikingar at flyta alla kommunalu fyrisitingina í Sjóvinnuhúsið á Vestaru Bryggju.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið. Meirilutin hevur ta viðmerking, at uppskotið sum úrslit av ítøkiligum fyrireikingum verður lagt fyri aftur til støðutakan, herundir hvat kommunalu bygningarnir kunnu brúkast til.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum. Hann vil vita hvat bygningarnir skulu brúkast til ella seljast, áðrenn umsitingin flytir út.

**Skjøl og leinki**
22/03571-1 Miðbýarkjarnan
https://www.torshavn.fo/temu/byarmenning/urtagardsbyurin-heildaraetlan-fyri-midbyarkjarnuna

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

# 231/26 Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi - 24/01098

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 24/25 | 25/00167-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 75/25 | 25/00167-1 |
| 3 Kaldbaksnevndin | 20.05.2025 | 18/25 | 25/00167-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 108/25 | 25/00167-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2026 | 39/26 | 25/00167-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 144/26 | 25/00167-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 231/26 | 25/00167-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við ynski um at endurskoða burturkastøkið í Tórshavnar kommunu, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot til framtíðarætlan fyri burturkastøkið, har ein partur av virkseminum á Hjalla verður fluttur inn á Sund, og har ein stórur partur av økinum á Hjalla skal brúkast til endurnýtslu og endurvinning.

**Lýsing av málinum**
Víst verður til frágreiðing jnr. 24/01098-2, sum er uppskot til broytingar á burturkastøkinum. Í hesi frágreiðing er ein nærri lýsing av málinum.

Ætlanin er at umskipa økið, soleiðis at bilar, jarn, dekk, rottangabilar, slammbilur og øki til Politiið at seta upptiknar bilar inn á, verður alt flutt inn á økið á Sundi, sunnari partur. Økið má gerast klárt og innrættast til endamálið.

Í sambandi við leigu av økinum á Sundi verður víst til mál j.nr. 24/01097, har Havnanevndin tann 16. apríl 2024 og fíggjarnevndin tann 23. apríl 2024 hava samtykt at taka undir við at flyta part av virkseminum hjá Brennistøðini inn á Sund. Málið skal leggjast fyri Havnanevndina, fíggjarnevndina og býráðið í sambandi við leigusáttmála, tá kostnaður fyriliggur.

Økið á Hjalla verður síðani býtt upp í 4 partar, tað er:
1. Endurnýtslupláss (vestan fyri brennistøðina, har jarnplássið er)
2. Brennistøð
3. Móttøkupláss (tað sum í dag er endurnýtslan eystan fyri brennistøðina)
4. Víðkan av móttøkuplássinum eystureftir (ikki útgrivið)

Nærri lýsing av økjunum er í frágreiðingini.

Mánadagin tann 24. februar 2025 var framløga fyri øllum býráðslimum á Hotel Hafnia, har ætlanin varð løgd fram.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ætlanin er at arbeiða víðari við hugskotsætlanini og at fáa gjørt eina byggiskrá og prosjektuppskot, soleiðis at farast kann undir at prosjektera, gera útbjóðingartilfar og bjóða arbeiðini út, umframt at fáa øll loyvir upp á pláss.

Neyðugt er eisini at gera tilfar, sum kann nýtast til at kunna staðbundnu nevndina í Kaldbak og fólk sum búgva í Kaldbak.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 878 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Av tí at talan er um eitt so stórt og umfatandi arbeiði, verður neyðugt at brúka uttanhýsis ráðgevar til ymiskar uppgávur.

Ætlanin er at skipa arbeiðið soleiðis:

1) Settur verður ein stýrisbólkur (Borgarstjórin setir bólkin)
2) Settur verður ein verkætlanarleiðari (Bygningsdeildin)
3) Settur verður ein arbeiðsbólkur, at gera útgreiningar o.a.
4) Neyðug uttanhýsis ráðgeving

Biðið verður um at fáa kr. 1.550.000 av løgukontu 7175 í 2025, til at gera byggiskrá og annað fyri.

Játtanin á løgukonto 7175 fyri 2025 er íalt kr. 13.000.000,00, harafturat standa kr. 2.159.000 frá 2024, sum ikki eru brúktar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
24/01097 Leiga av øki á Sundi
25/03238 Raðfestingar á løgukonto 7175 Renovasjón - 2025

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
jnr. 25/03238-5 Framløga um burturkastøkið (frá kunningarfundinum tann 24. februar 2025).
jnr. 24/01098-2 Uppskot til broytingar á burturkastøkinum.
jnr. 24/01098-6 Brennistøðin, tíðarætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 7175 | | Virksemið á Sundi og á Hjalla | |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.550.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 1.550.000 av løgukarminum LK71999 Renovation inn á nýggja verkætlan, Virksemið á Sundi og á Hjalla, undir kt. 7175, til at gera útgreiningar, byggiskrá og annað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjanevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Annita á Fríðriksmørk, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, tekur støðu á seinni fundi, tá ið meiri nágreiniligt tilfar, ið hoyrir til málið frá áðrenn 01.01.2025, fyriliggur at taka støðu til.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum frá Náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið við teirri viðmerking, at tá ið tilfarið fyriliggur verður tað sent til hoyringar hjá staðbundnu nevndini, Kaldbaksnevndini.

Tróndur Sigurðsson, mælir til at útseta málið til tess at hoyra staðbundnu nevndina, Kaldbaksnevndina, áðrenn peningur verður brúktur til verkætlanina.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um uppskot frá Kára Johansen um at beina málið aftur í nevnd. Uppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Trónda Sigurðsson um at hoyra staðbundnu nevndina, Kaldbaksnevndina, áðrenn peningur verður brúktur til verkætlanina.

Uppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

**Kaldbaksnevndin 20. mai 2025:** Kunnað varð um málið. Leiðarin á umhvørvisdeildini hevði framløgu um ætlanirnar viðvíkjandi kommunalu brennistøðini.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við at gera eitt skipanaruppskot fyri økið á Sundi. Eftir nakrar tillagingar av prosjektinum, m.a. fyri at fáa kostnaðin niður, hevur stýrisbólkurin góðkent skipanaruppskotið, j.nr. 25/00167-7.

Skipanaruppskotið umfatar at innrætta sunnasta partin av havnaøkinum á Sundi til skrott bilar, jarn og metal, o.a., soleiðis at hetta virksemið kann flytast frá á Hjalla til á Sundi.

Økið inniheldur eina heildarloysn:
- Bygning til víðkaða umhvørvisviðgerð av bilum, pressu og starvsfólkaviðurskifti á, uml. 1.800 $m^2$
- Ein bygning/høll til rottangabilar, uml. 470 $m^2$
- Øki til goymslu av skrott tilfar, dekkum og annað
- Øki til ymiskt stórt, sum skal takast/skerast sundur
- Øki til el-battarí frá bilum
- Móttøka, vekt, parkeringsviðurskifti, og politigarður

Alt økið er um 1.390 $m^2$ til víddar.

Økið verður innhegnað, lendið verður asfalterað ella stoypt.
Øki verður gjørt soleiðis, at tað uppfyllir øll krøv til umhvørvi, trygd o.a.

Arbeiðið á Sundi er mett at kosta tilsamans kr. 74 mió., tá er alt við uttan maskinur og amboð, sum skulu keypast út yvir tað, sum longu er.

Á løgukonto 7175 Renovastjón eru avsettar kr. 15 mió. í 2026. Av hesum eru kr. 1,6 míо. játtaðar til nýtt ruskpláss í Kollafirði, kr. 4,25 mió verða væntandi játtaðar til nýggjan economiser til Brennistøðina.

Eftir á karminum verða so statt 9,15 mió.

Mælt verður nú til at játta kr. 8,65 mió. til framhaldandi arbeiði á Sundi.

Næsta stig á Sundi er at gera útbjóðingartilfar, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út, og at fáa øll loyvir upp á pláss, so sum byggiloyvi, góðkenning frá Umhvørvisstovuni, í sambandi við at talan er um eitt kap. 5 virki, og at gera leiguavtalu við Tórshavnar Havn um at leiga økið. Tá alt hetta er gjørt, kann byggiarbeiðið byrja.

Mett verður, at byggiarbeiðið kemur at taka 2 ár, tað kann verða 2027 og 2028, treytað av at neyðug játtan verður sett av í 2027 og 2028.

Mælt verður frá at leingja byggitíðina út um 2 ár, tí tað kann gera verkætlanina dýrari og føra til ósemjur millum partarnar.

**Skjøl**
j.nr. 25/00167-6
- 2. Framløga, dagfest 27.04.2026.

j.nr. 25/00167-7
- 3. Støðumynd, nr. 3
- 4. Framsíður og skurður, nr. 4
- 5. Yvirlit yvir belegningar
- 6. Kostnaðarmeting, nr. 6

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 881 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión | 7175 | L71009 | Virksemið á Sundi og á Hjalla | | 8.650.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli:

Tekniski stjóri, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til:

- at játtaðar verða kr. 8,65 mió av løgukarminum LK71999 Renovation inn á verkætlan L71009 Virksemið á Sundi og á Hjalla, undir kt. 7175 Renovatión (íløgur).
- at umsitingin innheintar tilboð uppá at gera útbjóðingartilfar, at leggja fyri nevndina aftur.
  og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til samtyktina 31. mars 2026, eins og býráðið ikki hevur viðgjørt og tikið støðu til fíggingina á kr. 74 mió. til verkætlanina á umhvørvisøkinum, eins og málið ikki er endaliga avgreitt í Havnanevndini.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við meirilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdottir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Høgni Vilhelmsen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 882 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 232/26 Sólorkuskipanir á kommunalar bygningar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2026 | 43/26 | 26/04363-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 145/26 | 26/04363-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 232/26 | 26/04363-1 |

**Upprunin til málið**
Í umhvørvispolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu stendur, at allur hiti og streymur hjá kommununi skal koma frá varandi orkukeldum í 2030. Eisini skal viðlíkahald av bygningum raðfestast, og ábøtur skulu gerast á verandi bygningar, sum minka um orkunýtsluna.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur verið runt í kommununi og kannað ymiskar bygningar, sum møguliga kundu verið egnaðir til eina sólorkuskipan. Kravið til eina sólorkuskipan er, at tekjan er rímiliga nýggj og nóg sterk til at festa sólorkupanelir á. Eisini er neyðugt, at tekjan vendir rætt í mun til sólina, soleiðis at sólorkuskipanin kann framleiða so nógva orku sum møguligt.

Umsitingin hevur funnið 8 bygningar sum høvdu verið væl egnaðir til eina sólorkuskipan:

1. Dagstovnurin Sólareyga
2. Dagstovnurin á Velbastað
3. Nólsoyar skúli
4. Látrið í Nólsoy
5. Margarinfabrikkin
6. Dagstovnurin í Øksnagerði
7. Dagstovnurin Flatnagarður í Kaldbak
8. Fimleikahøllin í Kollafjarðar skúla

Tríggir teir fyrstu bygningarnir hava longu eina sólorkuskipan, men umsitingin mælir til, at víðkað verður um hesar skipanirnar. Av tí at LM hevði lægsta boð og stóð fyri arbeiðinum av verandi sólorkuskipanum, mælir umsitingin til, at víðkanin eisini verður gjørd av LM – hetta fyri at kommunan kann brúka somu stýringar o.s.fr. Umsitingin hevur fingið eitt tilboð frá LM um at víðka um verandi sólorkuskipan.

Hinir fimm bygningarnir hava onga sólorkuskipan sum er, og mælir umsitingin tí til, at hesar sólorkuskipanirnar verða boðnar út.

Út frá innkomnu tilboðunum frá LM, hevur umsitingin gjørt eina meting av kostnaðinum av sólorkuskipanunum til allar 8 bygningarnar.

| | | |
|---|---|---|
| Kostnaður av sólorkuskipan til 1711 $m^2$ | 3.572.000 | kr. |
| | | |
| Fyrivarni fyri veður og vind 10% | 357.200 | kr. |
| Óvæntað 15% | 535.800 | kr. |
| Ráðgeving 10% | 357.200 | kr. |
| Samlaður íløgukostnaður | 4.822.200 | kr. |
| | | |
| Samlaður íløgukostnaður íroknað 6,25% | 5.123.588 | kr. |

Mett verður, at samlaða afturgjaldstíðin fyri hesa íløguna liggur um 9 ár.

Hendan íløgan fer eisini at minka um $CO_2$ -útlátið við 100 tonsum um árið.

Upprunaliga verkætlanin, at fáa eina sólorkuskipan til svimjihøllina, er nøkulunda á støðd við hesar verkætlanirnar.

Svimjihøllin er 1400 m$^2$ og samlaða víddin á hesum bygningunum er 1711 m$^2$.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 6177 | | | Sólorkuskipanir á kommunalar bygningar |

| Upphædd |
|---|
| 5.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla nevndini til:

- At játta 5,2 mió. av løgukarmi LK61705 undir konto 6177 á nýggja verkætlan, Sólorkuskipanir á kommunalar bygningar.
- At tikið verður av tilboðnum frá LM um at víðka verandi sólorkuskipanir á trimum bygningum.
- At sólorkuskipan á hinar 5 bygningarnar verður boðin út.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Kristianna Winther Poulsen legði fram broytingaruppskot, at tikið verður undir við tilmælinum við teirri broyting, at Býlingshúsið á Ternuryggi verður valt í staðin fyri Dagstovnin í Kaldbak (Flatnagarður), ið varð samtykt við elluvu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 885 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 233/26 Tórshavnar havn : Leigusáttmáli við AK-Sauna.fo í Kollafirðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 09.06.2026 | 35/26 | 26/04505-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 233/26 | 26/04505-2 |

**Upprunin til málið**
Mál um sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu J.nr. 25/02597.

**Lýsing av málinum**
Býráðið samtykti hin 26.februar 2026 at gera leigusáttmála at gera leigusáttmála við Saunagos um saunavirksemi við Sjógv í Kollafirði.

Tórshavnar havn hevur gjørt uppskot til leigusáttmála við nýstovnaða felagið AK-Sauna.fo um saunagos við Sjógv í Kollafirði, j.nr 26/04505-1.

Sambært útbjóðingartilfarinum skal sáttmálin verða galdandi í 3 ár. Sáttmálin kann síðani leingjast við 10 árum treytað av eini nøktandi eftirmeting av virkseminum, sum partarnir skulu gera í felag, í seinasta lagi 3 mánaðar áðrenn tey 3 árini eru liðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J.nr. 25/02597 : Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
26/04505-1 : Leigusáttmáli AK Sauna Kollafjørður

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

| | Býráðsfundur<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 886 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Tilmæli**:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála við AK-Saunagos.fo j.nr 26/04505-1, og at beina málið í býráðið.

**Havnanevndin 09. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 887<br><br>Forkvinnunnar merki: |

## 234/26 Tórshavnar havn : Verkætlan nýggjur terminalur "Molin"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 10.03.2026 | 20/26 | 26/02437-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 66/26 | 26/02437-1 |
| 3 Havnanevndin | 16.03.2026 | 24/26 | 26/02437-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 92/26 | 26/02437-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 149/26 | 26/02437-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 161/26 | 26/02437-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 234/26 | 26/02437-1 |

**Upprunin til málið**
Skriv frá Smyril Line viðvíkjandi byggingini av “Molanum”

**Lýsing av málinum**
Smyril Line hevur í skrivum d.f 13/2-2026 og 6/3-2026 boða frá eini hækking av byggikostnaðinum fyri verkætlanina “Molan”, sum er nýggi terminalurin hjá Tórshavnar havn og nýggja høvuðssæti og pakkhús hjá Smyril Line á molanum.

Kostnaðurin fyri partin hjá Tórshavnar havn er mettur at hækka við uml 10,6 mió. Tá er hædd tikin fyri, at eyka útreiðslur kunnu koma aftrat í byggitíðini, sum eftir er.

Smyril Line biður í skrivinum um, at Tórshavnar kommuna í sambandi við byggifíggingina undirskrivar eina bindandi váttan mótvegis fíggingarstovnunum um keyp og fígging av bygninginum, tá ið hann er liðugur.

Játtanin til verkælanina higartil er í alt 140 mió kr. Neyðugt er tí at játta uml. 10,6 mió aftrat til verkætlanina. Kostnaðurin má fíggjast við lántøku, sum verður viðgjørd í øðrum máli seinni.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á løgukarminum P00 hjá Tórshavnar havn vóru 0,81 mió kr í avlopi frá 2025, og í 2026 eru 10 mió kr settar á løgukarmin, sum ikki eru markaðar til ávísa íløgu.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 21/02574 : Leigusáttmáli Smyril Line

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
J.Nr. 26/02437-2 : Skriv frá Smyril Line

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 888 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at játta 10 mió kr. av løgukarminum P00 hjá Tórshavnar havn fyri 2026, og 0,63 mió kr. av avlopinum á løgukarminum P00 hjá Tórshavnar havn fyri 2025, til verkætlanina "P41 – Farstøð á molanum", og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 10. mars 2026:**
Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Guttormur í Skála og Anja Weyhe tekur undir við tilmælinum.
Ein minniluti: Kári Johansen og Birgir Nielsen tekur ikki undir við tilmælinum og ynskja at fáa meira innlit í meirkostnaðin.

**Havnanevndin 16. mars 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Umrøtt og verður tikið upp aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:**
Sí viðfestan teldupost um uppskot til svar til bankan um bindandi váttan viðvíkjandi hækkan av byggifígging.

**Skjøl:**
26/02437-7: "*Skriv til uppskot til svar til bankan um bindandi váttan viðvíkjandi hækkan av byggifígging*"

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og stjórin í Tórshavnar havn mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at:
- At senda viðmælta uppskotið til bankan
- Og at viðmælta uppskotið verður sent Smyril Line til kunningar

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Útsett til næsta fund.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 889<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☒

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| P00 | | Molin | P41 | | Farstøð á molanum | | 10,63 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 150,63 mió |
| Áður játtað | Upphædd: | 140 mió |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Ískoyti:**
Støða skal takast til at hækka løgukarmin frá kr.140 mió til 150,63 mió sum samtykt í havnanevndini 10. mars 2026, og at senda bankanum nýggja bindandi váttan av byggiláninum sum samtykt av fíggjarnevndini 10. juni 2026. Viðmerkjast skal at í fíggjarnevndarnevndini 10. juni 2026 varð av misgáum víst til skjal nr. 26/2037-7 hetta skal vera 26/02437-13 um bindandi váttan til bankarnar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og stjórin í Tórshavnar havn mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at hækka løgukarmin til tvær viðgerðir og at samtykkja nýggja uppskotið til bindandi váttan til bankarnar til eina viðgerð.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Tikið av skrá.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 890 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 235/26 Óbygt grundstykki. Matr.nr. 91s, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 150/26 | 25/00219-6 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 235/26 | 25/00219-6 |

**Upprunin til málið.** Stykkið liggur óbygt.

**Lýsing av málinum**
Matr.nr. 91s, Kollafjørður. Skeytið er tinglýst 12.04.2021 Stykkið liggur óbygt. Kommunan hevur rykt uppá byggifreist, og eru eigarar nú sinnaðir til at afturskeyta kommununi grundstykkið, sum síðani verður lutað útaftur sambært reglugerð um útlutan av kommunalum grundstykkjum.

Afturkeypsprísurin er kr. 235.005,00 sum er samsvarandi upprunaliga keypsprísinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Ásetingar í tinglýstum skeyti. Reglugerð um útlutan av kommunalum grundstykkjum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 891<br><br>Forkvinnunnar merki: |

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| 235.005,00 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 235.005,00 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli**: Kommunustjórin mælir til at keypa grundstykkið matr.nr. 91s, Kollafjørður aftur frá verandi eigarum fyri kr. 235.005,00 ( Seljarin rindar útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps-skeytinum )

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | | Blað nr.: 892 |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Forkvinnunnar merki: |

## 236/26 Leigumál Almannaverkið - Matr.nr. 645a, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 68/26 | 25/06036-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 236/26 | 25/06036-2 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá Almannaverkinum.

**Lýsing av málinum.**

Almannaverkið leigar hølini í parti av bygninginum Frúutrøð 1. Leigumálið umfatar 471m², og er leigan sambært galdandi sáttmála sum er undirskrivaður 09.08.2022, kr. 950,- kr. pr. fermetur/ár. Og rindar leigarin harumframt hita og el.

Leigumálið verður prístalsviðgjørt sambært almenna brúkaraprístalinum, og rindar leigarin í dag kr. 959,44 kr. pr. fermetur/ár.

Almannaverkið rekur frítíðarskúla virksemi til børn við serligum tørvi, frá 3. flokki til 18 ár.

Kommunan innrættaði hølini til endamálið.

Almannaverkið søkir um at verandi leigumál til somu treytir verður framlongt til 31.12.2029

Almannaverkið vísir á, at verandi leigusáttmáli gongur út 31. juli, 2027, men var leigumálið ikki klárt til nýtslu fyrr enn í januar 2023.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl:
22/03526-20 Verandi sáttmáli
25/06036-1. Umsókn frá Almannaverkinum.
25/06036 -3 Ískoyti til sáttmála.

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 893 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at samtykkja eina framlonging av verandi leigusáttmála,( Skjal 22/03526-20 ) til og við 31.12.2029. Sáttmálin verður annars óbroyttur galdandi í øllum orðum og setningum tess.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen,

# 237/26 Umsókn um avtøku av servittutti um víðarisølu, matr. nr. 135nn, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 153/26 | 26/04735-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 237/26 | 26/04735-1 |

**Upprunin til málið**
Eigarin at matr. nr. 135nn, Hoyvík, hevur selt grundstykkið.

**Lýsing av málinum**
Eigarin av matr.nr. 135nn, Hoyvík, hevur biðið um, at tinglýsti servitutturin um bústaðarskyldu og treytir fyri víðarisølu verður strikaður. Umsóknin er grundað á, at ognin varð fingin við makaskifti við kommununa í 2022, og at servitutturin eftir hansara meting lækkar virðið á ognini.

Málið hevur sín uppruna í søluni av matr.nr. 138dn í 2016. Sambært skeytinum vóru treytir settar um bygging innan ávísa freist, avmarkingar í víðarisølu og afturkeypsrætt hjá kommununi. Treytirnar vórðu tinglýstar sum servituttir á ognina.

Eftir at bygging ikki varð framd innan ásettu freistina, hevði kommunan møguleika at gera nýtslu av afturkeypsrættinum. Í staðin varð farið undir samráðingar um makaskifti, tí kommunan hevði tørv á økinum í sambandi við framtíðar skipan av økinum kring fótbóltsvøllin í Hoyvík.

Makaskiftið millum matr.nr. 138dn og matr.nr. 135nn varð samtykt av Fíggjarnevndini og Býráðnum í februar 2022 og síðani góðkent av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Góðkenningin varð grundað á, at talan var um kommunalt endamál, at ognirnar vóru samanberiligar, og at marknaðarvirði lá til grund fyri avtaluni.

Í november 2022 varð málið aftur viðgjørt politiskt í sambandi við víðarisølu av matr.nr. 135nn. Býráðið samtykti tá at loyva fríari sølu av ognini, men samstundis varð samtykt, at verandi tinglýstu servituttirnir framvegis skuldu galda.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Grein 7 í upprunaskeytinum ið ásetur, at:

> "(...)
> Keyparin hevur ikki loyvið til at selja stykkið víðari, fyrr enn egin sethús til privatan bústað eru bygd á stykkinum og keyparin hevur búð í privatu húsunum í 3 ár. Tórshavnar býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur
> (...)"

**Upplýsingar frá umsitingini**
Makaskiftið í sjálvum sær broytir ikki rættarstøðuna hjá teimum tinglýstu byrðunum. Einki í makaskiftisavtaluni, politisku samtyktunum hjá býráðnum ella góðkenningin frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum (*Kommunala eftirlitinum*) bendir á, at ætlanin hevur verið at strika servituttirnar.

Tað er í hesum sambandi týdningarmikið at leggja dent á, at tað at eitt makaskifti er farið fram, sum eisini er góðkent av Kommunala Eftirlitinum, kann ikki í sjálvum sær broyta tær rættarligu fortreytirnar fyri, hvørt kommunan skal strika ein tinglýstan servitutt um víðarisølu.

Makaskiftið broytir sostatt ikki innihaldið av teimum byrðum, ið eru tinglýstar á grundstykkið, uttan so at partarnir serstakt hava avtalað nakað annað, sum ikki er tilburðurin í hesum dømi.

Eigarin vísir á nøkur dømir um strikan av servituttum á grundstykkjum, sum eigarin metir kunnu samanlíknast við hetta ítøkiliga málið.

Til hetta skal viðmerkjast, at Kommunala eftirlitið hevur beinleiðis lagt til grund, at talan var um samanberiligar ognir í makaskiftinum, og at virðini vóru ásett eftir marknaðarvirði. Harumframt hevur eigarin longu fingið loyvi til fría sølu í tann mun, at hann kann selja til hvønn hann vil, tó við teimum treytum, sum eru tinglýstar.

At ein potentiellur keypari setir sum treyt, at servitutturin verður strikaður, ber í veruleikanum brá av, at ætlanin er at byggja og síðani selja víðari. Tað er júst slík spekulativ nýtsla, sum servitutturin er ætlaður at forða fyri. Servitutturin hevur sostatt eitt sakligt og viðkomandi endamál, sum er at tryggja, at grundstykkir verða nýtt til bústaðarendamál, og ikki sum spekulativ handilsvøra.

Einki forðar kortini fyri, at keypari byggir sethús á stykkinum og síðani t.d. leigar ognina út. Á henda hátt verður bæði byggiskylda og bústaðarkravið lokið, uttan at servitutturin verður strikaður.

Við atliti at málsviðgerðini, politisku samtyktunum hjá býráðnum í 2022, góðkenningin frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum (*Kommunala eftirlitinum*) og teimum rættarligu fortreytunum annars, verður mett, at ikki er komið fram nakað nýtt ella haldgott grundarlag fyri at strika servituttin um víðarisølu.

Mælt verður tí Býráðnum til at sýta umsóknini um at strika servituttin á matr.nr. 135nn og at verandi tinglýstu treytir framvegis skulu galda.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**

21/03637-35: “*256/22 Samtykt Býráðsfundur, 24.11.2022 Matr.nr. 138dn, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti.*”
26/00158-5: “*Umsókn um at strika servitutt / byrðu á matr. nr. 135nn, Hoyvík*”
26/00158-6: “*Kort. Matr.nr. 135nn, Hoyvík*”
26/00158-7: “*Um at avtaka byrðar burtur á grundstykki matr. nr. 135nn, Hoyvík - frágreiðing um gerðabýti*”
26/04735-2: “*TK fíggjarnevnd*”
26/04735-2: “*Um misskiltar byrðar fyri sølu grundstykki hjá mær*”

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 896<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at sýta umsóknini um at strika servituttin á matr.nr. 135nn og at verandi tinglýstu servituttar framvegis skulu galda.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Høgni Vilhelmsen.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 897<br><br>Forkvinnunnar merki: |

## 238/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 48/26 | 26/00100-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 67/26 | 26/00100-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 73/26 | 26/00100-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 96/26 | 26/00100-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 99/26 | 26/00100-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 29.04.2026 | 107/26 | 26/00100-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 136/26 | 26/00100-1 |
| 8 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 169/26 | 26/00100-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 128/26 | 26/00100-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 27.05.2026 | 134/26 | 26/00100-1 |
| 11 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 198/26 | 26/00100-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 154/26 | 26/00100-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 163/26 | 26/00100-1 |
| 14 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 238/26 | 26/00100-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 898<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagt frá á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2026:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Framlagt og góðkent.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Framlagt og góðkent.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 900 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 239/26 Eldradepil í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 05.06.2025 | 16/25 | 25/06061-1 |
| 2 Heilsu- og eldranevndin | 04.09.2025 | 18/25 | 25/06061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 134/25 | 25/06061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 187/25 | 25/06061-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 24.09.2025 | 14/25 | 25/06061-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 239/26 | 25/06061-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekstur og tilmæli kemur áðrenn fundin.

**Heilsu- og eldranevndin 05. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í septembur 2017 samtykti býráðið eina útbyggingarætlan fyri eldraøkið í Tórshavnar kommunu. Síðsta tilmælið í útbýggingarætlanini var at gera ein eldradepil í Kollafirði. Hini tilmælini í útbygginargarætlanini eru gjørd ella eru í gerð. Urd og Demensdepilin vóru liðug  og lótu upp á sumri í 2021, og nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 røktaríbúðum er í gerð á Stórubrekku í Hoyvík.

Síðan útbyggingarætlanin bleiv samtykt hevur Heilsu- og umsorganartænastan miðvíst arbeitt við ymsum átøkum, sum stuðla undir, at fólk á eldraøkinum klára seg betur sjálvi og hetta sæst aftur í bíðilistunum. Serliga sæst broyting í bíðilistunum, eftir at Urd og demensdepilin lótu upp á sumri í 2021. Hóast fólkatalið er javnt vaksandi, hevur biðilistin til búpláss verið rættiliga stabilur í nøkur ár. Nú er bíðilistin spakuliga byrjaður at vaksa aftur, tó ikki til sama stig, sum áðrenn 2021.

Væntandi kemur bíðilistin til búpláss aftur á stigið  frá  2022, tá nýggja røktarheimið á Stórubrekku letur upp.

Síðsta tilmæli í útbyggingarætlanini er at gera eldradepil í Kollafirði.

Í virkisætlanini stendur soleiðis í tilmælinum um eldradepil í Kollafirði:

*5. Eldradepil í Kollafirði 2024-2025*
*Mælt verður til:*
*- At bygdur verður eldradepil við umleið 24-30 plássum. Blandað røktarbúpláss, stutttíðarpláss og røktaríbúðir saman við dagtilhaldi og venjingarumstøðum.  Við atliti at tørvinum á størri røktarbygging í høvuðsstaðarøkinum, verður mett, at eldradepilin í Kollafirði verður raðfestur at taka í nýtslu um 7-8 ár.*
*- At heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at ávísa hóskandi grundøki til at byggja á.*

Verðandi umstøður á Sambýlinum í Kollafirði eru als ikki nøktandi. Kømrini eru smá og hava ikki egi wc. Arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum eru ikki nøktandi, og umstøðurnar eru soleiðis, at ikki ber til at hava fólk við stórum røktartørvi ella demenssjúku búgvandi á sambýlinum. Hetta ger, at tað til tíðir eru tøk pláss, tí tey sum hava tørv á plássunum ikki rúmast á sambýlinum, men mugu flyta til Havnar í hóskandi umstøður á heimum, sum eru gjørd til tørvin.

| Ár | 2000 | 2005 | 2010 | 2015 | 2020 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal í alt | 1.188 | 3.278 | 3.249 | 3.196 | 3.293 | 3.304 |
| Fólkatal 67+ | 99 | 110 | 138 | 169 | 179 | 197 |
| Fólkatal 80+ | 27 | 32 | 38 | 53 | 47 | 59 |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| - Kollafjørður | | | | | | |
| - Oyrareingir | | | | | | |
| - Signabøur | | | | | | |
| - Kaldbak | | | | | | |
| - Kaldbaksbotnur | | | | | | |
| - Mjørkadalur | | | | | | |
| - Sund | | | | | | |
| - Norðradalur | | | | | | |
| - Syðradalur, Streymoy | | | | | | |

Talvan omanfyri vísir samlaðu gongdina í fólkatalinum í nevndu bygdum frá 2000 til 2025. Runt roknað kann man siga, at talið av fólki ávíkavist 67+ og 80+ er dupult so stórt í 2025, sum tað var í 2000.

Til ber ikki at fáa framroknaði tøl frá hagstovunum um nevndu økir. Tó vita vit, at talið av eldri borgarum fer at vaksa fleiri ár afturat.

Í løtuni (juli 2025) búgva 10 borgarar á røktarheimi í Tórshavn, sum áðrenn tey fluttu inn, høvdu bústað í Kollafirði. Tað búgva í løtuni 6 fólk á sambýlinum í Kollafirði. Tað vil siga í løtuni búgva 16 fólk úr Kollafirði á búplássum í kommununi.

Við hesum í huga og at talið av eldri fer at vaksa í framtíðini er tað hóskandi, at ein eldradepil í Kollafirðið rúmar eini 24 búfólkum við blandaðum tørvi. Tað verið seg tørvur á lættari røkt (sambýli) tyngri røkt (røktarheim) og demenssjúkum (demensdeild). Eisini er hugsa, at umlætting kann rúmast á teimum 26 plássunum. Umráðandi er, at eldradepilin í Kollafirðið kann vera fleksibul við atliti at tørvinum hjá borgarunum.

Ein loysn kann vera at skipa eldradepilin við tveimum deildum við 11 búfólkum og tveimum atknýttum í røktaríbúðum pr. deild. Soleiðis, at samlaða talið verður 26 pláss til tann blandaða tørvin. Hetta eigur tó at vera lýst nærri í einari neyvari tørvslýsing, so atlit eisini verður tikið til framtíðar rakstur av eldradeplinum.

**Frontaldemens deild á eldradeplinum í Kollafirði.**
Í Tórshavnar kommunu er stórur tøvur á at skipa frontaldemesøkið. Arbeiðið við at menna fakligt tilboð til fólk við frontaldemens er í gongd, men tað er trupult at veita hetta tilboð á vanligum demensdeildum, tí tørvurin á hjálp, røkt, vegleiðing osv. hjá fólki við frontaldemens er ikki tann sami, sum tørvurin hjá fólki við øðrum demenssjúkum. At fólk við frontaldemenssjúku búgva millum við øðrum demenssjúkum skapar stórar avbjóðingar á deildunum. At hesi búgva á somu deildum er ikki nøktandi tilboð fyri hvørgan partin.
Tað er sera trupult hjá starvsfólkunum at tryggja eina góða røkt til allar borgarar, tá fólk við frontaldemens og fólk við øðrum demenssjúkum er saman á røktarheimum.

Tørvur er á at skipa eitt samlað frontaldemenstilboð í Tórshavnar kommunu, bæði viðvíkjandi hølisviðurskiftum og fakligaheit. Hetta kundi møguliga verið gjørt í samstarvi við aðrar kommunur.

Frontaldemens er sergrein innan demensøkið, og tí er umráðandi, at servitanin verður savnað á einum stað fyri at tryggja borgaranum allar bestu røktina í sínari demenssjúku.

Í dag hava vit ikki umstøður at skipa eitt samlasamlað tilboð til borgarar við frontaldemens á einum stað.

Ein møguleiki kundi verið at skipa eina frontaldemensdeild í samband við byggingina av eldradeplinum í Kollafirði.

Ein frontaldemensdeild eigur at hava gott pláss soleiðis, at møguleiki er at skerma hvønn einkultan borgara, bæði fyri at verja viðkomandi og fyri at verja hini, sum eru á deildini. Eisini skal vera møguleiki hjá borgaranum at fara útum,uttan at vera til vanda fyri seg sjálvan ella onnur. Tvs. at ein góður garður eigur at vera uttanum.

Frontaldemensdeildin eigur at hava pláss fyri 6 borgarum. Um man ynskir at kunna bjóða tænastuna til aðarar kommunur í Føroyum, so kundi talan verið um 8 pláss. Ábendinagar eru um, at áhugi er fyri hesum uttanfyri Tórshavnar kommunu. Hetta skal tó kannast nærri og skipast í fasta legu. Tó ber til eftir lógini um heimatænasu, eldrarøkt v.m at bjóða tænastur út til onnur samstørv.

Samlað svarar tað til ein eldradepil, sum hevur búpláss til 32 fólk. (34 fólk) Umlætting og búpláss verður skipað eftir galdandi tørvinum til eina og hvørja tíð.

Umframt blandað pláss fyri 32 fólkum, (34), skal eldradepilin hava rúm fyri dagtilhaldi til 30 fólk og venjingarhølir til bæði heimabúgvandi og búfólk. Felagskøkur má vera í húsinum, sum ger mat til búfólk og fólk á dagtilhaldinum. Eisini eiga hølir at vera gjørd til heimatænastuna evt. sum sjúkrarøktarfrøðingaklinikk. Umframt hetta so mugu vera øll vanlig arbeiðsrúm, skrivstovur, samrøðurúm og fundarhøli. Kølirúm eigur at vera í húsinum. Hugsast má um uttanum øki har tað skulu vera góðir møguleika at fara útum, og tað er serliga umráðandi, at uttanum øki á frontaldemseindini er skipað soleiðis, at borgarin fær góðan møguleika at røra seg.

Hóast bíðilistarnir til búpláss ikki eru á sama stigi, sum tá virksemisætlanin bleiv samtykt, so er ongin ivi um, at Sambýlið í Kollafirðið ikki longur er tíðarhóskandi og kann ikki halda fram at vera sambýli. Um ein frontaldemenseind kann rúmast í projektinum, verður hetta eitt nýbrot innan eldraøkið og ein stórur bati fyri tænastuna og tilboðini á eldraøkinum í Tórshavnar kommunu

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorgarnarstjórin og leiðarin á heilsu- og umsorganardeildini mæla til, at valda staðseting verður endaliga fingin uppá pláss. Haraftrat at seta bygginevnd til eldradepilin í Kollafirði, at heimila fyrisitingini at fara undir at gera byggiskrá, og til tað endamálið at játta kr. 1 mio av L27013 Eldradepil í Kollafirði til LK 27013 Eldradepil í Kollafirði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Heilsu- og eldranevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

Somuleiðis einmælt samtykt at velja hesi í bygginevndina fyri verkætlanina: Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen.

**Kollafjarðarnevndin 24. september 2025:** Kunnað varð um málið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2026 | Blað nr.: 904<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Ískoyti:**
Bergur Robert Dam Jensen biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Tikið av skrá.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe/Jón Kragesteen | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen/<br>Elin Heðinsdóttir Joensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Astrið Breckmann | |